ÁLIT



# STJÓRNARSKIPAN FØROYA

**Stjórnarskipanarnevndin**

18. DESEMBER 2006

Stjórnarskipan Føroya

Stjórnarskipan Føroya

# Álit

Stjórnarskipanarnevndin 2006

**Stjórnarskipan Føroya – Álit**
Samskipan og ritstjórnan: Jóan Pauli Joensen (ábyrgd) og Rúni Rasmussen
Útgevari: Stjórnarskipanarnevndin, 2006
Umbróting, perma, prent og innbinding: Føroyaprent

Heimasíða: www.ssn.fo
Teldupostur: ssn@ssn.fo

ISBN 99918-3-214-9

# Innihaldsyvirlit


Fororð . . . . . . . . . . 7

Stjórnarskipanarnevndin . . . . . . . . . . 9

Inngangur . . . . . . . . . . 11
Tjóðskaparliga semjunevndin . . . . . . . . . . 15
Hví stjórnarskipan? . . . . . . . . . . 17
Stjórnarskipanir og tann søguligi møguleikin . . . . . . . . . . 23

Stjórnarskipan Føroya uppskot . . . . . . . . . . 26

Stjórnarskipan Føroya við viðmerkingum . . . . . . . . . . 42

Minnilutaálit
- Jóannes Hansen, Bárður Larsen og Ingibjørg Berg . . . . . . . . . . 99
- Kári á Rógvi . . . . . . . . . . 102
- Jóannes Eidesgaard . . . . . . . . . . 104
- Bárður Nielsen . . . . . . . . . . 106
- Kaj Leo Johannesen . . . . . . . . . . 108
- Høgni Hoydal . . . . . . . . . . 110

- Skriv frá Tjóðveldisflokkinum, Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum . . . . . . . . 112

Fylgiskjøl . . . . . . . . . . 113
Fylgiskjal A – Yvirlit yvir fundir . . . . . . . . . . 115
Fylgiskjal Á – Yvirlit yvir kunningartiltøk . . . . . . . . . . 116
Fylgiskjal B – Keldur – útvaldar heimasíður . . . . . . . . . . 118
Fylgiskjal D – Keldur – útvaldar bókmentir . . . . . . . . . . 121

# Fororð

Hetta álit við uppskoti til eina nýggja føroyska stjórnarskipan verður við hesum latið Føroya Løgmanni.

Innihaldið í hesum áliti er fyrst ein inngangur, síðani ein rættiliga nágreinilig lýsing av, hví vit hava tørv á eini stjórnarskipan, og um tann søguliga møguleikan sum vit hava í hesum sambandi. Eisini verður greitt frá arbeiðinum í teirri undirnevnd, ið hevur tikið sær av teimum spurningunum, sum trupult hevur verið at fingið semju um. Sjálvt uppskotið til stjórnarskipan kemur í álitinum fyrst fyri í reinum líki og síðani við viðmerkingum. Síðan eru prentaðar minnilutaviðmerkingar frá nevndarlimum. Seinast í álitinum eru fylgiskjøl av týdningi fyri arbeiðið í nevndini og fyri framhaldandi viðgerð.

Við framløguni av hesum áliti verður hildin tann freist, sum ásett er í løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003, seinni broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 23. mai 2005 um stjórnarskipanarnevnd. Í hesi lóg stendur, at álit skal verða handað løgmanni áðrenn 31. desember 2006. Eins og tíðarfreistin var hildin fyri ***Fyrra Flaggdagsáliti,*** er tíðarfreistin eisini hildin fyri hetta álit, sum vit kunnu nevna ***Jólaálitið***.

Hóast tað er eitt og annað, sum fleiri meiningar eru um, so er semja um tað allarmesta, og tað verður neyvan nakrantíð semja um alt. Í seinasta lagi um eitt gott ár verður løgtingsval, so útlitini til nú at fáa semju um hvønn smálut eru tí ikki tey bestu. Tí er tað í hesum áliti eisini givið rúm fyri minnilutaviðmerkingum, sum kunnu takast við í teirri viðgerð, sum kemur at fara fram í løgtinginum, áðrenn álitið verður sent til endaliga atkvøðu. Líka til tá hava føroyingar høvi til at koma við sínum viðmerkingum.

Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin hava við skrivi dagfest 7. desember 2006 heitt á formannin í Stjórnarskipanarnevndini um at mæla løgmanni til at leingja freistina fyri framløguna av endaliga uppskotinum til seint á vári 2007. Formaðurin hevur sent uppskot teirra til løgmann uttan viðmerkingar. Uttan mun til, hvat hendir ella ikki, so verður tað Føroya Løgmaður sum eigur næsta leik í hesum talvi.

Tórshavn tann 18. desember 2006.
Jóan Pauli Joensen
Formaður

# Stjórnarskipanarnevndin

Jóannes Eidesgaard løgmaður í landsstýrinum, sum varð skipað 31. januar 2004, heitti á Jóan Paula Joensen um at halda áfram sum formaður í Stjórnarskipanarnevndini, sum sbrt. løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003 um stjórnarskipanarnevnd (seinni broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 23. mai 2005), sum kom ístaðin fyri Grundlógarnevndina. Formaðurin tilnevndi allar limirnar í serfrøðingabólkinum av nýggjum. Politisku umboðini eru vald av politisku flokkunum og millum landsstýrismenn. Bert teir smáu flokkarnir Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkarnir hava rætt til varamann.

**Serfrøðingabólkurin:**

Jóan Pauli Joensen, fil.dr. & dr.phil., rektari, professari, Fróðskaparsetur Føroya, formaður

Kári á Rógvi, cand. jur., LL. M. Ph.D.-lesandi, Háskóli Íslands, næstformaður

Bárður Larsen, cand. jur., ráðgevi, Kommunusamskipan Føroya, nevndarlimur

Ingibjørg Berg, cand. scient. pol., trivnaðarstjóri, Tórshavnar kommuna, nevndarlimur

Jóannes Hansen, cand. mag., rektari, Føroya Læraraskúli, nevndarlimur

Gurið Ann Joensen, cand. jur., stjóri, Kærustovnurin, nevndarlimur

Herluf Sigvaldsson, MSS, deildarstjóri, Løgmansskrivstovan, nevndarlimur

Birita L. Poulsen, cand. jur., ráðgevi, Løgtingsins Umboðsmaður, nevndarlimur

***Skrivari:***

Rúni Rasmussen, M.S.Sc.

**Politisku umboðini**

***Fólkaflokkurin:***

Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður
Poul Michelsen, løgtingsmaður
Jacob Vestergaard, landsstýrismaður

***Tjóðveldisflokkurin:***

Høgni Hoydal, løgtingsmaður
Annita á Fríðriksmørk, løgtingsmaður
Finnur Helmsdal, løgtingsmaður

***Javnaðarflokkurin:***

Jóannes Eidesgaard, løgmaður
John Johannesen, løgtingsmaður
Kristian Magnussen, løgtingsmaður

***Sambandsflokkurin:***

Edmund Joensen, tingformaður
Bárður Nielsen, landsstýrismaður
Lisabeth L. Petersen, løgtingsmaður

***Miðflokkurin:***

Jenis av Rana, løgtingsmaður
Bill Justinussen, varalimur og løgtingsmaður

***Sjálvstýrisflokkurin:***

Kári P. Højgaard, løgtingsmaður
Dánjal Petur Hansen, varamaður

# Inngangur

***Frágreiðingin um grundlógararbeiði*** frá formanninum í grundlógarnevndini, varð latin landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum 31. desember 2001, og eftir at verða løgfrøðiliga kannað og rættað, endaliga lagt fram fyri almenningin 14. mars 2002. Eftir at henda formansfrágreiðingin frá 2001 var latin úr hondum, dovnaði politiski áhugin fyri grundlógararbeiðinum eina tíð, tí val stóð fyri durum. Eftir løgtingsvalið 30. apríl 2002 var semja um at halda fram við arbeiðinum við støði í eini dagførdari lóg um grundlógarnevnd – løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003 um grundlógarnevnd. Arbeiðið byrjaði so smátt aftur av álvara, men politisku leikirnir førdu nú aftur við sær, at løgmaður útskrivaði val at verða 20. januar 2004. Dagarnir hjá fullveldissamgonguni, sum hevði hildið saman síðani 1998, vóru nú taldir.

31. januar 2004 skipaðu Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin landsstýri. Vanliga arbeiðið í grundlógarnevndini helt mestsum uppat, men tað var kortini einki, ið forðaði fyri, at formaðurin saman við næstformanninum Kára á Rógvi og skrivaranum Bárði Larsen fingu gjørt eina formansfrágreiðing við einum fullfíggjaðum uppskoti til eina føroyska grundlóg (stjórnarskipan). Hetta álit kallaðist ***Fyrra Flaggdagsálit. Frágreiðing frá formanninum í grundlógarnevndini***, og varð latið løgmanni flaggdagin 2004.

Grundarlagið fyri arbeiðinum í Stjórnarskipanarnevndini er framvegis løgtingslóg nr. 79 frá 8. mai 2003, broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 23. mai 2005, soleiðis, at orðið Grundlógarnevnd er skift út við Stjórnarskipanarnevnd. Fyri at uppfylla lógarinnar krøv skal løgmaður hava álitið og uppskot til stjórnarskipan handað í seinasta lagi 31. desember 2006; hetta verður tí eitt Jólaálit.

Hetta álit, sum nú verður lagt fram, byggir á tað arbeiðið, sum er gjørt frammanundan, fyrst og fremst á ***Fyrra Flaggdagsálitið***, bæði tá ið talan er um uppskot til lógargreinar og viðmerkingar. Nevndararbeiðið er farið fram á tann hátt, at arbeitt hevur verið í tveimum høpum, ávikavist ***Lítla Kamari*** og ***Stóra Kamari.*** Í Lítla Kamari hava bert serfrøðingarnir sitið, meðan øll Stjórnarskipanarnevndin hevur møtt í Stóra Kamari. So hvørt sum Lítla Kamar er komið ásamt um orðingar, eru tær lagdar fyri Stóra Kamar til viðgerðar, soleiðis at nevndarlimirnir eru bidnir um at koma við skrivligum viðmerkingum, fyri at lætta um hjá formanni og skrivara, men hesin arbeiðsháttur kom tíverri ikki at verða nógv nýttur, so flestu viðmerkingarnar eru komnar munnliga í orðaskiftinum á sjálvum fundunum.

Hetta hevur verið eitt drúgt arbeiði, og tað hevur í rættiliga stóran mun eydnast at koma til semju um tað mesta, hóast okkurt enn er, sum fleiri meiningar eru um, eins og tað eru greinar og viðmerkingar, sum høvdu kunnað trongt til meira tíð og nágreiniligari viðgerð. Tað er møguligt, at øll Stjórnarskipanarnevndin at enda hevði kunnað funnið saman um eina semju um hvørja einstaka grein í uppskotinum, eins og semja hevði kunnað verið um viðmerkingarnar til hvørja grein, men tað hevði tikið sera langa tíð, og ta tíðina hevur

nevndin ikki. Vandi hevði eisini verið fyri at hugbindingin hjá serfrøðingunum av álvara fór at dovna burtur, um útlit var til at freistin ikki fór at verða hildin.

Formaðurin hevur ta áskoðan, at nú er komið so langt á mál, sum tað nú einaferð ber til innan fyri tær umstøður og karmar, sum nevndin hevur havt at virka innanfyri. Uppskotið skal eisini viðgerast í løgtinginum, har tær seinastu semjurnar mugu finnast. Hóast tað hevði verið tað besta, so nýtist kortini ikki at vera semja um alt í einum nevndaruppskoti. Allir nevndarlimirnir, bæði teir politiskt valdu og teir sum formaðurin hevur tilnevnt, hava fingið høvi til at koma við minnilutauppskotum og -viðmerkingum í sjálvum álitinum, sum kunnu takast við í endaligu viðgerðini av uppskotinum um eina føroyska stjórnarskipan. Mótsett serfrøðingunum í nevndini fáa politikararnir høvi at viðgera endaliga uppskotið á tingi.

Frá byrjan varð avgjørt at seta eina undirnevnd við formonnum og serliga tilnevndum umboði frá teimum politisku flokkunum at viðgera tær greinir, har tað kundi væntast at koma at verða trupult at fáa semju. Formaðurin tilnevndi Herluf Sigvaldsson til formann í hesi undirnevnd. Úrslitið av tí, sum er tulkað sum semja, er tikið við sum partur av uppskotinum til stjórnarskipan, men høvi hevur ikki verið at viðgjørt tær í plenum. Hetta eru greinirnar 1 (fólkið og landið), 58 (skipan), 59 (umskipan), 78 (uttanríkisvald), 79 (samveldi), 82 (samtykt) umframt formælið. Løgmaður, sum eisini er limur í stjórnarskipanarnevndini, hevur nýtt høvi til at vísa á, at hann ikki tekur undir við øllum, sum stendur um uttanríkisvald (§ 78) og um skipan av landsstýrinum (§ 58).

Eftir samtykt í plenum av grein 47 (2) um, at tveir triðingar av tingmonnum kunnu samtykkja, at val skal vera í ótíð, hevur ein meiriluti í teirri tjóðskaparligu semjunevndini ikki tikið undir við hesum. Meirilutin í hesi serligu nevnd mælti heldur til at staðfesta verandi støðu, har løgmaður kann skriva út val. Grundgevingin var, at grein 47 (2), sum hon stendur, hevur óhepnar avleiðingar fyri valdsjavnvágina millum útinnandi og lóggevandi valdið. Ásetingin er kortini varðveitt, tí nevndin í plenum samtykti hana, áðrenn semjunevndin tók hana upp aftur til viðgerðar.

Í uppskotinum hava vit endurnýtt orð sum ***landsstýri***, ***løgmaður*** og ***landsstýrismenn***. Í undirnevndini vóru fleiri, sum heldur vildu skifta um orðið ***landsstýri*** við ***stjórn***, orðið ***løgmaður*** við ***forsætisráðharri*** og orðið ***landsstýrismenn*** við ***ráðharrar***. T.d. fer landsstýrismaður í uttanríkismálum at eita ***uttanríkisráðharri***. Øvugt av greinunum um til dømis skipan, umskipan og samtykt, sum niðurstøða var um í undirbólkinum, so varð fatanin um broyting av heitunum ikki greið. Tí er eingin broyting framd av heitum í mun til verandi stýrisskipan. Verður politisk semja um hetta, so er sjálvsagt einki til hindurs fyri, at ***landsstýrismaður*** verður broytt til ***ráðharri*** og uppskotið til stjórnarskipan lagað eftir hesum. Greitt verður aðrastaðni í álitinum frá mannagongdini í arbeiðinum í hesi undirnevnd (sí síðu 15).

Viðmerkjast skal, at tað eru partar í hesum stjórnarskipanaruppskoti, sum hava ásetingar um øki, sum føroysku myndugleikarnir ikki hava yvirtikið. Dømi

um hetta er parturin um dómsvald. Í samveldisstøðu eru eyðvitað oftast samveldisdómstólar. Nú stjórnarskipanin verður til, eru dómsmál felagsmál millum Danmark og Føroyar, men nýliga er staðfest, við serligari yvirtøkulóg, at føroyingar kunnu stovna egnar dómstólar á lægri stigi. Tískil er skilagott eisini at hava ásetingar um dómsvald, hóast í løtuni ikki partur av okkara skipan.

Viðmerkingar eru ikki gjørdar til allar lógargreinarnar í uppskotinum. Formansskapurin og samfelagsfrøðingarnir hava ta áskoðan, at tað er gott við viðmerkingum, men at viðmerkingar ikki eru eitt endamál í sær sjálvum, sum onkuntíð í vanligum lógarsmíði. Greinarnar sjálvar, og ikki viðmerkingarnar, hava normerandi virði.

Tað stendur í § 4 í lóg um stjórnarskipanarnevnd, at meðan nevndin arbeiðir, skipar hon fyri at kunna og hoyra føroyska fólkið. Hetta hevur nevndin gjørt við at skipa fyri fleiri almennum kunningarfundum og kunningartiltøkum í skúlum og fyri áhugabólkum. Eisini stendur í § 4, stk. 2.: ***„At tryggja innlit og ávirkan fólksins skal nevndin lata landsstýrinum fyribils álit og uppskot til stjórnarskipan. Nevndin skipar síðani fyri hoyringum í øllum valdømum, har fólkið, kommunur og áhugabólkar fáa høvi at ummæla arbeiðið hjá stjórnarskipanarnevndini.“*** Uppskotið til føroyska stjórnarskipan, kortini uttan viðmerkingar, sum tað stendur í ***Fyrra Flaggdagsáliti*** er eisini umsett til enskt, og hava løgfrøðingar uttan fyri Føroyar sýnt stóran áhuga fyri hesum. Tað hevur sostatt borið væl til at kunna seg um arbeiðið hjá nevndini. Eisini hevur nevndin sína egnu heimasíðu www.ssn.fo.

Í sambandi við kunningina hevur ***Fyrra Flaggdagsálitið*** verið nýtt sum eitt fyribils álit. Liður í kravdu kunningini er eisini, at nú uppundir endan á arbeiðinum, fær hvørt húski í Føroyum seinasta uppskotið við einum upplýsandi inngangi.

Eftir 31. desember 2006 verður løgmaður at taka stig til, hvat víðari hendir í hesum máli.

# Tjóðskaparliga semjunevndin

## HERLUF SIGVALDSSON, FORMAÐUR

Á einum av sínum fyrstu fundum avráddi stjórnarskipanarnevndin at seta eina undirnevnd at viðgera truplu spurningarnar í stjórnarskipanaruppskotinum. Nevndin, ið gekk undir heitinum tjóðskaparliga semjunevndin, var mannað við formanninum í Stjórnarskipanarnevndini og einum umboði fyri hvønn flokk á tingi. Harumframt luttók undirritaði sum nevndarformaður og skrivarin á uttanríkisdeildini sum nevndarskrivari.

Spurningarnir, ið vórðu tiknir upp til máls í nevndini, vóru hugtøk og heiti, formæli, fólkið og landið, stýrislag, skipan, umskipan, uttanríkisvald, samtykt og gildi. Mannagongdin fyri nevndarviðgerðini var skipað við orðaskifti fyri hvørjum spurningi sær, har allar røddir vóru frammi. Síðan varð málið viðgjørt á næsta fundi við samtykt fyri eyga av ítøkiligum orðingum við støði í orðaskiftinum frammanundan. Talt varð eftir tingmannatali hjá hvørjum einstøkum umboði fyri hvønn flokk á tingi, tá ið samtyktir vórðu gjørdar.

Verður tikið samanum, ber til at siga, at nevndin var samd um orðingarnar viðvíkjandi formæli, fólkið og landið umframt samtykt og gildi. Hinvegin var nevndin ikki fullsamd um orðingarnar viðvíkjandi stýrislagi, skipan, umskipan og uttanríkisvaldi. Ein breiður meiriluti umboðandi 25 tingmenn á tingi tók undir við orðingunum, meðan ein minniluti umboðandi 7 tingmenn á tingi var ímóti. Tá ið ræður um orðingarnar viðvíkjandi samveldi undir uttanríkisvaldi tók ein meiriluti umboðandi 18 tingmenn á tingi undir við orðingunum, meðan ein minniluti umboðandi 14 tingmenn á tingi var ímóti.

Spurningar, ið vórðu havdir á lofti undir viðgerðini, vóru millum aðrar mangar, hvørt tað er neyðugt at nakað stendur um viðurskifti Føroya við onnur lond og ríki ella um orðingarnar tvørturímóti skuldu gerast meira ítøkiligar um hesi viðurskifti. Eisini varð spurningurin drúgt viðgjørdur, hvørt stjórnarskipanin skuldi heimila lóggávuvaldinum at seta á stovn forseta á sama hátt sum heimilað verður lóggávuvaldinum at umskipa løgmansembætið.

Annars skal verða sagt frá, at stóra óloysta ósemjan fevndi sum áður umrøtt um orðingarnar viðvíkjandi samveldi, og serliga ásetingina um at fara burtur úr samveldi. Teir, ið vóru fyri, hildu fast um mannagongdina um meiriluta av teimum, sum vóru á fólkaatkvøðu, meðan teir, ið vóru ímóti, hildu fast um mannagongdina um meiriluta av øllum teimum, sum hava atkvøðurætt. Í hesum sambandi vórðu neyðsemjur royndar, ið fevndu um tvær løgtingssamtyktir við løgtingsvali ímillum undan fólkaatkvøðu eins og at seta valluttøku á fólka-

atkvøðu uppá í minsta lagi tveir triðingar av øllum veljarum sum gildistreyt. Hesar neyðsemjur vunnu tó ikki frama.

Eg skal at enda siga um tjóðskaparligu semjunevndina, at limirnir tóku virknan lut á teimum seks fundunum, ið vóru, og viðgjørdu ymsu málini við fullum álvara. Annars eri eg sannførdur um, at spurningurin um hvussu ein fólkaatkvøða skal fara fram viðvíkjandi samveldi, heruppií at siga úr gildi samveldið við Danmørk og Grønland, var ikki búgvin at royna semju um á hesum sinni og krevur sostatt fleiri politiskar mýkingar til tess at eingin skal kenna rættarstøðu fólksins skerda.

# Hví stjórnarskipan?

***Øll lond hava stjórnarskipanir, men virði teirra veldst um fólkið í landinum tekur undir við teimum og gevur seg undir stýri teirra. Grannatjóðir okkara hava flestar langt síðani skrivað og samtykt stjórnarskjøl. Noreg fekk stjórnarskipan í 1814, Danmark í 1849, Ísland í 1874. Við slíkum skjali verður valdið skipað, fólksins rættindi vard, og tjóðin mennist.***

Í Føroyum hevur fólkið tikið undir við og virt landsins stýri í so langa tíð, at vit vita ikki rættiliga, nær Føroyar eru skipaðar sum land, tað er sum politisk eind við egnum stovnum og lógum. Føroyska tjóðin kennir seg knýtta saman í felagsskap og samleika og kennir seg heima í Føroyum. Føroyingar virða føroysku stjórnarskipanina – eisini tá tey ráðandi gera mistøk. Stjórnarskipanin, sum nú er í uppskoti, er hin seinasta og mest víðfevnda føroyska stjórnarskipanin, men søgan byrjar ikki her. Heldur enn at stovna Føroyar sum land og løgdømi, er stjórnarskipanin í uppskoti víðari menning av teimum siðvenjum og lógum, sum saman eru stjórnarskipan Føroya.

**Aftur um stjórnarskipanina í uppskoti**

Ikki er dulsmál, at stjórnarskipanin í uppskoti upprunaliga stavar frá grundlógarnevndini, sum varð sett tíðliga í 1999. Grundlógararbeiðið var upprunaliga partur av fullveldisætlanini hjá landsstýrinum, ið sett varð í 1998 og í broyttum líki sat fram til valið í 2004. Tíðliga í tilgongdini varnaðust tey í nevndini kortini, at grundlóg er gott hugskot fyri eitt og hvørt samfelag, við ella uttan fullveldi. Næstu grannalond okkara, Noreg og Ísland, fingu eisini sínar skipanir í samveldisstøðu. Henda hugsan mentist, og tóku bæði samveldis- og sjálvræðissinnaði undir við, at nevndin skuldi arbeiða fram ímóti grundleggjandi skjali fyri Føroya fólk, landið og løgdømið Føroyar. Í hesum samstarvsanda fekk nevndin navnið Stjórnarskipanarnevndin, og skjalið heitið Stjórnarskipan.

**Tjóðskaparlig semja – felags grundvøllur at minka um ósemjur**

Hvør er so stjórnarskipanin í uppskoti, og hvussu skulu føroyingar fata hana? Tulking og fatan av stjórnarskipan ella grundlóg veldst um ráðandi virðini, ið komandi ættarlið leggja í hana. Stjórnarskipanarnevndin og Føroya fólk í dag hava bert avmarkaða ávirkan á hesi viðurskifti. Nevnd og fólk, ið taka undir, hava kortini ta ávirkan á eftirtíðina at seta snið og skipan á tey orð og ásetingar, ið skulu vera støði undir framtíðar stýri og stjórnarskipan.

At undirtøka er fyri, at skilagott er við grundleggjandi politiskum og løgfrøðiligum skjali fyri landið Føroyar, sigur frá grundleggjandi hugsjón um samfelag, ið tørvar felags grundvøll. Henda grundvøll hava føroyingar í felags siðum, søgu og mentan. Men alt er ikki semja. Hóast einsháttaðir og samdir á mangan hátt,

standa føroyingar eyðvitað spjaddir í mongum lutum. Uttan trætu og orðaskifti í virðisspurningum verður eingin tillaging og framburður. Men tað stríð innanhýsis, ið verið hevur um sambandið við danska ríkið, hevur møtt og órógvað okkum ov mikið.

Tí vilja vit við hesi stjórnarskipan skapa betri tóna og samanhald í tjóð og samfelag okkara, tí hóast ósemju um samveldi og sjálvræði, ber til at kjakast um politisku sjónarmiðini og áhugamálini innan fyri somu karmar. Ber til at halda ósemjur og áhugamál innan sama grundleggjandi karm – sama grundleggjandi tekst, sum allir føroyingar hava tikið undir við – so er grundarlag skapt fyri einum meira virðiligum og semjusøkjandi samfelag.

Stjórnarskipanin ber í sær semju um støðu okkara og semju um, hvagar vit kunnu fara, og hvussu vit tá gera.

At skapa meira støðugt, virðiligt og semjusøkjandi samfelag er aðalendamál við skrivaðari stjórnarskipan sum henni í uppskoti. Tí skjóta vit upp eina sokallaða tjóðskaparliga semju. Hon ber í sær, at vit føroyingar staðfesta á skrift, at vit eru samdir um, at vit eru tjóð og land. Eisini staðfesta vit mannagongdir fyri, hvussu gerast skal, tá og um vit loysa frá verandi samveldisskipan – ella teingja okkum at øðrum skipanum. Við hesum hava vit ikki loyst ósemjuna um loysing ella samband; tað er heldur ikki endamálið. Men heldur jarða vit so stóran part av hesi ósemju sum gjørligt; tá er nógv vunnið, og tá hava vit fingið til vega felags fatan um verandi støðu, hvagar vit kunnu fara og hvussu.

Í uppskotinum til nýggja stjórnarskipan fyri Føroyar hava vit fyri at slóða fyri semju roynt at sett orð á verandi skipan og mannagongdir at broyta hana. Hetta merkir, at vit samtykkja, at:

- Føroyar eru land
- Føroyingar eru tjóð
- Føroyar eru í sáttmálakendum samveldi
- Føroyar kunnu eftir serligari mannagongd taka seg úr ella geva seg í samveldi, tá tjóðin vil tað

Vit eru nú í samveldi við Danmark og Grønland. Løgtingið hevur samtykt heimastýrisskipanina og hevur virkað eftir henni. Heimastýrisskipanin er sum aðrar avtalur, ið lond gera sínámillum, soleiðis háttað, at hvør parturin hevur líka góðan rætt at tulka hana. Við nýggju stjórnarskipanini samtykkja føroyingar, at hetta er okkara fatan av støðuni.

Hetta er neyvan fjart frá støðuni hjá dønum heldur. Seinast danski forsætisráðharrin alment segði frá teirri donsku støðuni, segði hann, at føroyingar kundu loysa frá Danmark og taka fullveldi, um teir vildu tað. Sjálvur ynskti hann tó, at føroyingar ikki fóru nakran veg stjórnarliga, men heldur valdu at

tillaga verandi skipan. Eisini mangir føroyingar halda, at skipanin við Danmark er til fyrimuns fyri okkum, og at vit skulu halda fast við henda felagsskap við danska ríkið. Men valla nakar føroyingur ivast í, at vit kunnu taka okkum burturúr, um og tá vit vilja tað.

Ein spurningur verður tí, hvussu vit vita, at føroyingar vilja taka seg burtur úr samveldi sínum við Danmark. Uppskot okkara er, at vit samtykkja mannagongd, so eingin ivi skal vera.

**Vit hava eina skipan til vit velja eina aðra**

Onkur hevur hildið, at uppskotið hjá okkum at seta orð á føroysku stjórnarskipanina skal stríða ímóti heimastýrisskipanini ella tingskipanini ella øðrum reglum.

Fyrr var illa. Tað var eitt ilt spjað av eini stjórnarskipan, sum ikki onkursvegna stríddi ímóti teirri skipan, ið var frammanundan.

Fyri at taka stutt samanum føroyska stjórnarsøgu, so hava vit so mangan fingið brot við eldri skipan. Tá Sigmundur Brestisson skeyt upp, at tingið skuldi samtykkja at føroyingar skuldu taka við kristnari trúgv, var hetta klárt í stríði við galdandi skipan. Sama var, tá ið tingið, helst við ringum tannabiti, samtykti at virða norska kongin. Eisini tá ið kongur í síni tíð tók sær einaveldi og noyddi fólk at svørja sær trygdareið, var hetta ólógligt. Einaveldiskongur setti í gildi Kongalógina sum grundlóg. Kongalógin sigur seg at galda ævigt. Longu av teirri orsøk skuldu bæði norska og danska grundlógin verið vístar burtur sum ólógligar og stríðandi móti Kongalógini. Og tó eru tær samtyktar og frammi hvønn dag.

Heimastýrisskipanin er í so máta eisini lógarbrót. Danska ríkisgrundlógin sigur kong at hava vald at skriva út val, staðfesta lógir og velja landsins stjórn. Hon sigur danska ríkistingið eiga vald at samtykkja lógir, áleggja skatt og játta pengar. Men hóast tað, ja so legði heimastýrisskipanin, ið fyrst føroyingar, síðani danir samtyktu, allar hesar heimildir til føroyskar myndugleikar.

Tá danir tó í 1953 smíðaðu og samtyktu nýggja ríkisgrundlóg, søgdu tey lærdu og lógkønu í áliti sínum, at heimastýrisskipanin mátti metast at vera í samsvari við ríkisgrundlógina, tí annars var hon jú ikki sett í gildi.

Sama siga vit. Tá ið vit hava samtykt hesa stjórnarskipan, og hon ótarnað verður vird og brúkt, so má hon metast at vera í samsvari við verandi skipan – ella at hava broytt verandi skipan.

Í øllum førum eiga vit rættin at siga, hvat vit halda er sambærligt við heimastýrisskipanina. Føroyingar allir mugu taka støðu til, um teir taka undir við uppskotinum um Stjórnarskipan Føroya, tað – og bara tað – ger av, um hon fær gildi.

**Hvat stendur í eini stjórnarskipan?**

Til ber at býta mest vanligu stjórnarskipanir upp í ymsar tættir:

- Ásetingar um sjálvsfatan og samleika hjá landi og tjóð
- Ásetingar um viðurskifti landsins úteftir og møguligt sundurbýti inneftir
- Ásetingar um stýri, hvørjir stovnar eru, hvat vald teir hava, og hvussu teir fremja tað
- Ásetingar um rættindi fólksins og aðrar avmarkingar av almenna valdinum
- Ásetingar um, hvussu skipanin sjálv kann verða broytt

Uppskotið um Stjórnarskipan Føroya hevur øll hesi eyðkenni. Sum grundleggjandi lóg ella skipan er uppskotið tí meiri fullfíggjað enn nakað skjal, føroyingar higartil hava samtykt.

Verandi stýrisskipanarlóg hevur bert ásetingar um stýri landsins og fyri tað mesta ásetingar umsettar úr donskum. Uppskotið um Stjórnarskipan Føroya er bæði ein betri og endurskoðað stýrisskipan, ***umframt*** at hava ásetingar um tjóðskaparliga sjálvsfatan, samveldisstøðu og mannarættindi.

Stjórnarskipan Føroya í uppskoti er býtt í formæli og tríggjar partar:

Fyrsti partur tekur saman um alla stjórnarskipanina. Í fyrsta parti verða ásettar tær meginreglur og tey prinsipp, sum útleidd føra til tær ítøkiligaru ásetingarnar um rættindi og stýrisskipan landsins. Ásetingarnar í fyrsta kapitli lýsa í stuttum føroysku stjórnarskipanina og kunnu tí nevnast hin stutta stjórnarskipanin.

Annar partur lýsir tey rættindi, fólkið hevur. Rættindi eru antin tað vald, ið landsins almennu stovnar ikki hava, ella tær avmarkingar í valdinum, sum stovnarnir mugu virða. Føroyar eru bundnar av ásetingum í altjóða sáttmálum, men hóast tað verður hildið neyðugt at orða rættindini nágreiniliga í stjórnarskipanini, bæði til tess at tryggja avgerðarheimild løgtingsins, at tryggja serlig føroysk rættindi, og fyri at tryggja almennu tilvitanina um rættindini.

Triði partur um stýrisskipanina inniheldur ásetingarnar um vøldini øll og viðurskiftini hjá teimum hvørjum mótvegis øðrum. Í øllum førum upprunaliga hevur parturin um stýrisskipanina verið hildin at vera mest týðandi í eini stjórnarskipan. Í tíðini stutt eftir, at tær fyrstu modernaðu stjórnarskipanirnar vórðu til, var heilt vanligt at halda stjórnarskipanina sjálva bara fevna um stýrisskipanina. Sum kunnugt verða nú eisini onnur øki enn stýrisskipanin roknað til stjórnarskipanina.

**Meginreglur um stjórnarskipanarsmíð**

Fyri at Stjórnarskipan Føroya í uppskoti verður ein felags grund, sum allir føroyingar taka undir við, hava vit valt at binda so nógv aftur í okkara løgligu og

politisku søgu sum møguligt. Samleiki okkara kann ikki slítast frá søguni, og vit meta, at einans við at minnast og virða gomlu siðirnar ber til at skapa grundleggjandi skjal, ið fólkið sær seg aftur í og tí tekur undir. Eingin orsøk er til at royna at skriva av nýggjum gamlar siðir og góðar og fólkaræðisligar venjur. Formælið til stjórnarskipanina er besta dømi um hetta; har verður einki ásett av nýggjum, heldur verður tikið saman um okkara søgu og verandi støðu sum gamalt land og fólk, og endamál við teirri nýggju skipanini verða lýst.

*Val millum stuttar orðingar og greiðar og almennar orðingar*

Sum bæði yvirskipað lóg og politiskt skjal er stjórnarskipanin bland millum stuttar, greiðar orðingar og stuttar, minni greiðar orðingar. Stremban okkara eftir tí fullkomna kann freista okkum at royna at skriva niður allar smálutir og at leggja upp fyri øllum. Slík tilgongd er ikki haldgóð og fær okkum, heldur enn at loysa trupulleikarnar, at seta fleiri spurningar og kroysta trupulleikar undan okkum í alsamt vaksandi og fløktari dunga. Jú meira verður ásett, fleiri verða ivamálini. Tí heldur stutt og greitt.

Skal stjórnarskipan ella lóg virka væl at stýra atferð hjá borgarum, má hon hava stuttar orðingar, tí drúgvar ásetingar føra til iva og misfatan. Fyrimunurin við stuttum ásetingum er hartil, at tá er bara tað týdningarmesta ásett í skipanini, og at øll minni týðandi viðurskifti verða at greiða seg í roynd og venju. At mangir tulkingarspurningar tá verða um minni týðandi viðurskifti, ið ikki eru avgreidd, er kortini betri enn øvuta valið. Stuttar orðingar gera skipanina liðiliga og betur egnaða at tillaga seg broyttar tíðir og umstøður, og bara tá virkar skipanin væl sum felags karmur um samfelagið.

Greiðar orðingar egna seg væl at áseta politisku skipanina, hvussu vøldini landsstýri, løgting og rættirnir virka og eru skipað sínámillum. Øðrvísi er við virðisspurningum, ið seta sín dám á rættindapartin av stjórnarskipanini. Eisini í rættindapartinum er gott við stuttum orðingum, tí sama er galdandi, at fólk skilja best og lata seg mest ávirka av stuttum orðingum. Men nú er eingin orsøk til, at orðingarnar eru so avgjørdar og endaligar. Nú eru mong altráð eftir at fáa staðfest sína virðisfatan í mannarættindaskjølum, men henda fatan ber ikki fram. Rættindaorðingar í stjórnarskipanum og sáttmálum eiga meira at vera royndir at orða siðalæru og virðisfatan enn sum vanligar lógir endaliga at áseta rættarstøðuna. Ósemja í virðisspurningum skilur heldur fólk sundur enn at skapa felagsskap. Rættindaásetingar eiga mestan at virka sum orðaligur karmur um kjakið og at smalka ósemjur heldur enn at gera tær endaliga av.

*Longd og broyting*

Skildur við spurningin um stuttar ella langar orðingar er spurningurin, hvussu trupul skipanin skal vera at broyta. Drúgvar stjórnarskipanir og tær, ið eru lættar at broyta, verða oftast at minna um vanligar lógir. Tær verða ov ofta

endurskoðaðar og fáa ikki dám av at vera hægri, týðari og sannari enn aðrar ásetingar.

Føroyska stjórnarskipanin í uppskoti er millum stytstu í heiminum og er við einans umleið 3600 orðum styttri enn amerikanska og danska stjórnarskipanin, ið annars eru millum stytstu og mest virdu skipanir. Broytingarreglan er ikki av teim truplastu, krevur avgjørdan meiriluta á tingi (í dag 17 av 32 tinglimum), og síðan fólkaatkvøðu í minsta lagi hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða. Tá skipanin er stutt, yvirskipað og ikki ger av allar týðandi stríðsspurningar endaliga, eru tó góð útlit fyri, at Stjórnarskipan Føroya fer at virka væl og ikki verður broytt ov ofta.

**Meinbogar og møguleikar**

Allar tilgongdir at skriva nýggjar stjórnarskipanir verða merktar av grundleggjandi trupulleikum. Flestu skrivaðu stjórnarskipanir ella grundlógir eru vorðnar til í kjalarvørrinum av samfelagskreppum; tær koma í bylgjum eftir kreppur. Helst er rímiligt at siga, at stjórnarskipanin í uppskoti er úrslit av rembingum og andanum frá búskaparligu kreppuni í 90'árunum og ókyrru umstøðunum aftaná. Tað er í kjalarvørrinum av hesi kreppu, at fólk og politisk skipan hava verið nóg opin til at taka samfelagsins grundleggjandi viðurskifti upp til endurskoðan.

Men ikki er neyðugt at bíða eftir kreppum at loysa hesar spurningar. Heldur eiga vit at fegnast um, at vit í rættiliga góðum og friðarligum tíðum kunnu geva okkum stundir at taka støðu til hesar grundleggjandi spurningar:

- Hvussu kunnu vit seta orð á ríkisstøðuna, so føroyingar semjast?
- Hvussu kunnu vit skipa mannagongdir, so ríkisstøðan kann broytast í semju?
- Hvussu kunnu vit betra stýrislagið í landinum?
- Hvussu kunnu vit avmarka og skipa valdið sum best?
- Hvussu kunnu vit orða og tryggja rættindi fólksins?

Tá ið Stjórnarskipanarnevndin sum grundlógarnevnd fór undir arbeiði sítt, vóru mong altráð eftir at skriva og samtykkja grundleggjandi skjal fyri Føroya fólk og land. Nú er hinvegin so mikið fráliðið, at vit eru komin á politisk kyrrindi. Tí mugu bæði tjóð og fólkavald vera hyggin og kvika sær at royna at fáa Stjórnarskipan Føroya undir høgg, meðan stundir eru.

# Stjórnarskipanir og tann søguligi møguleikin

Í hesi grein verður greitt frá teirri fólkaræðisligu gongdini seinastu árini. Hugtøkini konstitutionalisma og stjórnarskipan verða lýst. Eisini verður víst á tann søguliga møguleikan fyri at semjast um eina nýggja føroyska stjórnarskipan.

**Fólkaræðisvøkstur**

Støðan hjá nógvum londum er grundleggjandi broytt seinastu 50 árini. Fleiri lond vunnu sjálvstýri og gjørdust fullveldisríki. Fólkaræðishugsjónin hevur í stóran mun broytt tilveruna bæði hjá samfeløgum og einstaklingum. Hugtøkini fólkaræði og frælsi hava verið natúrligur partur av almenna og politiska orðaskiftinum kring heimin. Serliga aftan á, at kommunisman fall í Sovjetsamveldinum og Eysturevropa í tíðarskeiðinum 1989-1991, hava hesi bæði hugtøkini verið nógv nýtt. Einaveldi fullu, og royndir at smíða frælsar, fólkaræðisligar skipanir vórðu framdar í fyrrverandi kommunistisku londunum.

At smíða og evna til eina politiska skipan, sum skal staðfesta og seta á stovn fólkaræði, er ein hin størsta avbjóðingin, ið eitt fólk møtir. Hetta er serliga galdandi fyri tey lond, sum ikki hava havt nakra fólkaræðisliga siðvenju ella mentan. Hagtøl vísa tó, at til ber at smíða eina nýggja politiska skipan, sum tekur av gamlar, og ofta kúgandi, skipanir og skapa nýggja skipan, sum hevur sum endamál at tryggja frælsi hjá borgarum landsins. Hesar skipanir, sum hava frælsi sum endamál, eru aloftast grundaðar á verju av grundleggjandi rættindum, fólkaræði, valdsbýti (valdsavmarking) og løgræði. Slíkar stjórnarskipanir (grundlógir) hava veruliga vunnið frama kring heimin seinastu 50 árini.

Sambært kenda granskingarstovninum Freedom House (www.freedomhouse.org) er politiska frælsið økt munandi seinastu 30 árini. Stovnurin býtir upp heimin í tríggjar partar: frælsi heimurin, lutvíst frælsi heimum og ófrælsi heimurin. Í 1974 vóru 42 lond mett at vera fræls, 48 lond vóru mett at vera lutvíst fræls, og 63 lond vóru mett at vera ófræls. Tølini fyri 2004 vísa, at munandi fleiri lond eru vorðin fræls. Í 2004 vóru 89 lond mett at vera fræls. Í 2004 var heimsns fólkatal 6,4 mia. Av hesum búðu 2,8 mia. fólk (44 %) í frælsa heiminum, 1,9 mia. fólk (18,59 %) búðu í lutvíst frælsa heiminum, og 2,4 mia. fólk (37,33 %) búðu í ófrælsa heiminum. Í 2004 búðu 2,8 mia. fólk (44 %) í frælsa heiminum í mun til 1,4 mia. fólk (24,83 %) í 1992. Hesi tøl eru áhugaverd og viðkomandi fyri ein og hvønn, sum hevur áhuga fyri politisku støðuni í heiminum og fyri alheims fólkaræðisligu gongdini.

Øll hesi lond, sum hava sett á stovn fólkaræði og eru vorðin bólkað sum fræls, hava verið ígjøgnum eina tilgongd, sum hevur kravt dirvi, vilja og semjusøkjandi mannagongdir. Fólkaræði verður ikki sett á stovn eftir einum degi. Tilgongdin tekur tíð. Eingi lond eru eins, og eingin endalig og fullkomin frælsisuppskrift er tøk, men tó eru nøkur felagseyðkenni fyri fræls og fólkaræðislig lond.

Í fólkaræðisligari skipan fær fólkið rødd og ávirkan á avgerðir, og til tess at

tryggja frælsið hjá borgarunum ímóti ágangi frá myndugleikunum, verður roynt at avmarka valdið hjá myndugleikunum og skapa eina valdsjavnvág millum ymisku vøldini. Løgræði er eisini partur av fólkaræðisligari skipan. Løgræði tryggjar, at borgarar og almennir myndugleikar skulu geva seg undir lógirnar í landinum; eingin er hevjaður upp um lógirnar. Hugtakið konstitutionalisma er nær knýtt at bæði fólkaræðis- og løgræðishugtakinum.

**Konstitutionalisma**

Tað er eingin røtt ella skeiv allýsing av konstitutionalismu, men talan kann vera um góðar og minni góðar allýsingar. Konstitutionalisma er eitt hugtak, ið ofta verður sett í samband við politisku ástøðini hjá enska heimspekinginum John Locke og teir amerikonsku stjórnarskipanarsmiðirnar (founding fathers) um lógarásetta avmarking av valdinum hjá almennu myndugleikunum. Teir amerikonsku stjórnarskipanarsmiðirnir hugleiddu dúgliga um, hvussu ein góð og frælsistryggjandi stjórnarskipan skuldi skipast. Í greinasavninum ***The Federalist Papers*** verður roynt at lýsa avbjóðingar og loysnir í sambandi við tilevningina av amerikonsku stjórnarskipanini, sum varð skrivað í 1787.

Konstitutionalisma snýr seg í stóran mun um avmarking av valdinum hjá politiska myndugleikanum fyri at tryggja frælsið hjá borgarunum. Aloftast verða grundleggjandi rættindi og valdsavmarkingar, ofta valdsbýti, staðfest í týdningarmiklasta politiska skjalinum, nevniliga landsins stjórnarskipan (grundlóg).

Sigast kann, at hornasteinar í modernaðari konstitutiomalismu er býti og avmarking av stjórnarvaldi, verja av borgararættindum og hugsanin um umboðandi ella fólkaræðisligt stýri.

**Stjórnarskipan**

Stjórnarskipanir eru ymiskar frá einum landi til eitt annað. Tó eru nøkur alfevnd eyðkenni. Stjórnarskipanir regulera skipanina av stjórnini, áseta ofta slag av politiskari skipan (forsetaskipan, tingræðisskipan ella blandingsskipan), skipa starv og avmarkingar hjá tí lóggevandi, tí útinnandi og tí dømandi valdinum og viðurskiftini teirra millum, og hvussu valdið er býtt ímillum meginstjórn og statir/landspartar. Eisini er vanligt, at grundleggjandi rættindaverja (Bill of Rights) verður staðfest í eini stjórnarskipan.

Ein stjórnarskipan er eitt slag av spælireglum, sum skipa politisku institutiónirnar og royna at staðfesta greiðar og skilagóðar mannagongdir fyri at tryggja effektivitet og politiskan stabilitet. Tað øvuta av slíkum skipaðum stjórnarligum viðurskiftum er tilvildarligt og sjálvráðið stjórnarvald.

**Ein føroysk stjórnarskipan**

Ofta verða nýggjar stjórnarskipanir smíðaðar í sambandi við kreppu ella kollvelting. Tá eru flestu borgarar ikki nóg „edrúiligir" politiskt til at staðfesta og allýsa virði fyri framtíðar samfelagið. Løgfrøðingarnir Bárður Larsen og Kári á Rógvi hava skrivað áhugaverda grein í ***Fyrra flaggdagsáliti***, sum teir nevna ***Skipanin***. Um fyritreytirnar hjá føroyingum at smíða eina stjórnarskipan siga

teir t.d.: ***Møguleiki er tó fyri, at føroyingar í síni tilgongd eru hepnari enn flest onnur fólk. Long tíð er nú liðin síðan seinastu kreppu, og fólkið kann sigast aftur at vera nóg „edrúiligt“ til at leggja treytir fyri komandi samfelagið.***

Arbeitt hevur verið við at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Grundarlagið fyri hesum arbeiði hevur verið ***Frágreiðing um grundlógararbeiðið*** frá 2001 og ***Fyrra flaggdagsálit*** frá 2004.

Stjórnarskipanarnevndin hevur havt ein søguligan møguleika at smíða eina grundleggjandi lóg fyri Føroyar. Stríð um ríkisrættarliga spurningin hevur í stóran mun eyðkent politiska kjakið í Føroyum. Arbeiðið í Stjórnarskipanarnevndini hevur verið eitt gylt høvi hjá øllum politiskum flokkum at prógva, at føroyingar kunnu semjast um at staðfesta elligomlu virði okkara, støðu okkara við onnur lond og tey rættindi, sum fólkið longu hevur, og menna tey víðari. Tað er týdningarmikið, at vit sum fólk staðfesta og lýsa á okkara egna máli, hvørji vit eru og hvørja grund vit byggja okkara samfelag á.

Ein nýggj stjórnarskipan verður samtykt av fólkinum. Tað er fólkið, sum, við hesi skipan, staðfestir sín samleika, virði og rættindi. Upprunin til hesa nýggju grundleggjandi lóg er sostatt føroyska fólkið. Fólksins vilji er tann evsti myndugleikin, og tí skulu aðrar lógir smíðast við støði í andanum í nýggju skipan okkara.

Í uppskoti til formæli stendur: ***„Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundarlag undir stýri okkara og fyriskipanin, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.“***

Vónandi fer viljin at fáa í lag tjóðskaparliga semju at vinna á teimum ósemjum og trætum, sum forða fyri, at føroyingar samtykkja egna grundleggjandi skipan við støði í felags samleika.

# STJÓRNARSKIPAN FØROYA
## Uppskot

# Stjórnarskipan Føroya

## *Formæli*

*Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundarlag undir stýri okkara og fyriskipanin, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.*

*Vit bygdu landið í fornari tíð og skipaðu okkum við tingi, lógum, rættindum og skyldum.*

*Vit hava hildið ting til henda dag og skipað okkum eftir tørvi okkara um landið alt.*

*Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki. Einki kann tó sløkkja sjálvræði landsins ella sjálvsavgerðarrætt okkara. Landsins egnu lógir og avgerðir eru einans tær, sum framdar eru á rættan hátt í landinum sjálvum eftir fólksins vilja.*

*Føroyar verða skipaðar eftir nútíðar tørvi á siðaarv okkara við fólkaræði, løgræði, rættindum og skyldum.*

*Henda stjórnarskipan er fram um lógir. Eingin lóg ella siðvenja má tí vera hildin galda, bara tí hon er eldri enn henda skipan ella hevur verið told í langa tíð.*

# Fyrsti partur – Stjórnarskipan

## 1. STJÓRNARSKIPAN

### §1. Fólkið og landið

(1) Føroyingar eru tjóð og Føroyar eru land.

(2) Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki.

(3) Føroyar kunnu fara upp í samveldi við onnur lond og ríki.

(4) Fara Føroyar upp í samveldi við onnur lond og ríki, skal samveldissáttmáli samtykkjast sum ásett í hesi skipan.

(5) Eitt og hvørt samveldislíknandi samstarv kann sigast úr gildi sum ásett í hesi skipan.

### §2. Stýrislag

(1) Føroyar eru land við fólkaræði.

(2) Løgting og kommunustýri eru altíð fólkavald.

(3) Løgmaður kann vera fólkavaldur ella tingvaldur.

(4) Onnur størv kunnu vera fólkavald ella vald á tingi.

(5) Fólkið skal altíð hava sum mest av ávirkan á landsins stýri.

### §3. Valdsbýti, løgræði og rættvísi

(1) Stjórnarskipanin er grundað á valdsbýti, løgræði og rættvísi.

(2) Allar lógir og siðvenjur skulu virða hesa skipan.

### §4. Landsins fremstu stovnar

(1) Fremstu stjórnarstovnar landsins eru Løgtingið, Landsstýrið og Løgrætturin.

(2) Landið er skipað í kommunur.

### §5. Ímyndir og mál

(1) Føroyar hava flagg, tjóðsang og skjaldramerki.

(2) Almenna málið er føroyskt.

# Annar partur – Rættindi

## 2. ALMENN RÆTTINDI OG SKYLDUR

### §6. Rættindi og verja teirra

(1) Rættindi kunnu einans avmarkast, um tað er neyðugt og í samsvari við fólkaræðisliga og samhaldsfasta stjórnarskipan.

(2) Tingið kann í serligum førum knýta rættindi at heimarætti ella bústaði.

(3) Landsins stovnar skulu altíð verja rættindi hjá íbúgvunum.

### §7. Onnur rættindi

(1) Umframt rættindi ásett í hesi skipan, verjir hon onnur rættindi, sum eru sjálvsøgd, ómissandi ella neyðug.

### §8. Skyldur

(1) Øll skulu virða hesa skipan og tær lógir og skyldur, sum verða til í samsvari við hana.

(2) Øll eiga at virða landsins arv og tilfeingi eins og rættindi hjá øðrum.

## 3. JØVN RÆTTINDI

### §9. Javnstøða

(1) Øll fólk eru javnsett uttan mun til eyðkenni ella frábregði.

(2) Tingið kann samtykkja at rætta tann mun, ið áður hevur verið gjørdur á fólki vegna eyðkenni ella frábregði.

(3) Eingi forrættindi kunnu vera varandi.

## 4. PERSÓNLIG RÆTTINDI

### §10. Lív og trygd

(1) Øll eiga rætt til lív og trygd.

(2) Eingin kann verða revsaður ella viðfarin miskunnarleyst ella óvirðiliga.

(3) Deyðarevsing kann ikki ásetast.

### §11. Persónligt frælsi

(1) Øll eru fræls og frí.

(2) Tingið kann samtykkja lógir um frælsistøku. Avgerð sambært slíkari lóg kann leggjast fyri dómara.

(3) Verður ein handtikin fyri brotsverk, skal hann fyri dómara innan 24 tímar. Bert dómari kann staðfesta ella leingja handtøku.

(4) Dómari kann áleggja longri varðhald, tó í mesta lagi fýra mánaðir, og bert um longri revsing er væntandi.

(5) Dómari kann í heilt serligum førum áleggja varðhald í einingi ella partvísari avbyrging, tó bert í tveir mánaðir.

### §12. Bústaður og samskifti

(1) Bústaðir, før og alt privat samskifti eru vard fyri almennum inntrivum.

(2) Eru rannsókn, hald ella onnur inntriv neyðug sambært lóg og landsins tørvi, skal dómari í úrskurði gera av, um tað er loyviligt. Er tað ógjørligt undan inntrivinum, skal úrskurður gerast aftaná.

(3) Í lóg kann tingið loyva alneyðugum kanningum uttan úrskurð frammanundan. Slík inntriv skulu tó altíð kunna roynast.

### §13. Ognarrættur

(1) Allar ognir og øll rættindi eru vard fyri ágangi.

(2) Almennur myndugleiki kann eftir mannagongd í lóg taka ræði á privatari ogn ella rætti. Tílík ognartøka skal fara fram sambært neyðugum og átrokandi almennum tørvi.

(3) Fyri slíka ognartøku skal fult endurgjald latast.

## 5. TRÚARRÆTTINDI

### §14. Trúarfrælsi

(1) Øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv á tann hátt, tey vilja.

(2) Tingið kann veita kristnitrúnni serligar sømdir, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir.

(3) Fólkakirkjan eigur lut eftir gomlum siði og skipar seg sjálv.

## 6. POLITISK RÆTTINDI

### §15. Valrættur

(1) Íbúgvar landsins eiga rætt at velja umboð á ting, í stýri og í stovnar.

(2) Íbúgvar landsins eiga rætt at taka støðu til lógir og viðtøkur við fólkaatkvøðu. Tingið kann lata fólkinum heimildir sínar eftir hesi skipan.

(3) Eru tingmenn ónøgdir við samtykta tinglóg, kann triðingur av tingmonnum krevja lógina lagda fyri fólkið í síðsta lagi viku eftir, at hon er samtykt.

### §16. Framsøgufrælsi

(1) Ein og hvør eigur rætt at hava og seta fram hugsan, áskoðan og sjónarmið á ein og hvønn hátt.

(2) Á sama hátt eiga øll rætt at vera við í samskifti og taka ímóti upplýsing.

(3) Fjølmiðlarnir eiga serligan rætt at kanna, lýsa og bera fram.

### §17. Felagsfrælsi

(1) Øll hava rætt at taka seg saman í feløg og fylkingar til eitt og hvørt endamál.

(2) Feløg og fylkingar kunnu avsigast, um atlit at trygd, friði og landaskili krevur tað.

### §18. Savningarfrælsi

(1) Øll eiga rætt at savnast á almennum stað, um hetta ikki brýtur landaskil.

## 7. VINNURÆTTINDI

### §19. Vinnurættur

(1) Øll eiga rætt til vinnu og handil.

(2) Vinnuligar samtøkur, sterkar vinnufyritøkur ella vinnuligar samanleggingar mugu ikki avlaga neyðuga vinnuliga kapping. Heldur ikki má almennur stovnur gera størri inntriv, enn virki hansara krevur.

### §20. Arbeiði

(1) Øll eiga rætt at arbeiða.

(2) Landið tryggjar øllum møguleika fyri frálæru ella útbúgving til tess at kunna arbeiða ella vinna.

## 8. SOSIAL RÆTTINDI

### §21. Skúli

(1) Rætt at fáa neyðugan skúla og undirvísing eigur hvør einstakur alt lívið. Øll hava skyldu at taka við skúla og undirvísing í barna- og ungdómsárum.

(2) Foreldur kunnu gera av, at tey sjálvi taka á seg ábyrgd av skúla og undirvísing barnanna, men støðið má vera nóg gott.

### §22. Sosial trygd

(1) Landið skal tryggja øllum sømilig kor.

(2) Landið skal hava umsorgan fyri, at øll fáa eftirløn ella pensjón.

(3) Tann, sum hvørki sleppur fram at egnari vinnu ella løntum arbeiði, eigur at fáa almennan stuðul og styrk.

### §23. Familja

(1) Trivnaður familjunnar er fyritreyt fyri støðugari sosialari menning. Landið tryggjar familjuni góð kor.

(2) Børn eiga at verða uppfostrað í einum familjuumhvørvi við gleði, kærleika og samljóði, har tað, ið er best fyri barnið, skal vera fremsta atlit.

## 9. BÚRÆTTINDI

### §24. Innløgurættindi

(1) Hvør eigur rætt til egna innløgu.

(2) Nú reka menn hval á land upp; tá skal tað mesta vera drápspartur ella heimapartur.

(3) Landið skal bert gera tær avmarkingar, sum neyðugar eru at tryggja fæstovnar, innløgurætt ella búseting.

(4) Í øllum førum, tá ið búfólk leggja inn á sjónum ella á landi til sín sjálvs, uttan at gjald er uppií, skal innløgan vera teimum frí og fingin.

### §25. Hvørsmansrættur

(1) Hvør eigur rætt at ferðast og fara á sjógvi og landi, tá ið tað ikki er til ampa fyri fólk, fæ, ogn, vøkstur og náttúru.

### § 26. Óðalsjørð og landsjørð

(1) Óðalsjørð er ognarjørð, kortini so at tingið kann áseta reglur um støðd.

(2) Landsjørðin er fólksins ogn. Verður landsjørðin ella stórur partur av landsjørðini einskild, skal fólkið spyrjast við fólkaatkvøðu.

### § 27 Tilfeingi og umhvørvi

(1) Margfeldið á landi og á havleiðum landsins, undirgrundin, loftrúmið, vindur, væta, avfall og sjógvur, streymurin í sundunum og kring Føroyar og alt annað, sum einskild ikki eiga, og sum nytta í komandi tíðum kann fáast burturúr, er tilfeingi og ogn fólksins.

(2) Landið tryggjar, at tilfeingi fólksins verður umsitið á ein sjálvberandi hátt við umsorgan fyri umhvørvi okkara.

## 10. FYRISITINGARLIG RÆTTINDI

### §28. Alment innlit

(1) Øll eiga rætt til innlit í almenn viðurskifti.

(2) Innlit fevnir um egin viðurskifti, avgerðarmál og fyrisiting annars.

### §29. Hoyring

(1) Tá ið almennur stovnur ella myndugleiki tekur avgerð, skal hvør, ið avgerðin viðkemur, hoyrast. Fer almennur stovnur ella myndugleiki undir tilgongd ella fyriskipan, skal bera til hjá áhugaðum at koma til orðanna við tilmælum sínum.

### §30. Umboðan

(1) Øll eiga rætt at lata onnur umboða seg í almennum málum.

(2) Hevur málið stóran týdning fyri tann einstaka, ella kann málið gerast fordømi, skal tað almenna rinda rímiligan kostnað.

### §31. Skipan

(1) Tingið skal skipa fyrisitingarlig rættindi og mannagongdir í tinglóg.

## 11. RÆTTARLIG RÆTTINDI

### §32. Ákæra

(1) Einans fúti ella landssakførari kunnu seta fram ákæru.

(2) Útinnandi ella fyrisitandi myndugleikar kunnu seta fram skuldsetingar, sum teir síðan leggja fyri rætta ákærumyndugleika.

(3) Eingin strong revsing kann krevjast, uttan at løgrættufólk hava góðkent, at ákæra verður reist.

(4) Eingin kann revsast uttan dóm.

(5) Eingin dómur kann sigast, uttan revsilóg var undan brotinum.

### §33. Løgrættufólk

(1) Løgrættufólk skulu døma í revsimálum.

(2) Í rættarmálum kunnu eisini vera fakdómarar.

### §34. Rættarmál

(1) Øll eiga rætt at vera umboðað í revsimálum ella øðrum málum, sum tað almenna reisir móti teimum.

(2) Hevur hin einstaki ikki ráð at gjalda málskostnað, skal landið gjalda rímiligan kostnað.

(3) Allir lógarspurningar kunnu skjótast inn fyri løgrættin.

# Triði partur – Stýrisskipan

## 12. ALMENT

### §35. Stjórnarstovnar og vald

(1) Fólkið hevur alt alment vald í Føroyum og fremur tað gjøgnum stjórnarstovnar landsins.

(2) Stjórnarstovnar landsins verða eftir hesi skipan. Greiður skilnaður skal vera stjórnarstovnanna millum.

(3) Hvør stjórnarstovnur hevur vald ella stjórnarøki at røkja einsæris ella í felag við aðrar. Teir standa til svars fyri virksemi sítt, og valdið er altíð avmarkað.

### §36. Val og skipan

(1) Stjórnarstovnar landsins skulu annaðhvørt vera undir tingvaldari ella beinleiðis valdari leiðslu undir tingsins eftirliti.

(2) Tingið kann skipa stovnar, nevndir og ráð í lóg.

### §37. Rættindi og avmarkingar

(1) Stjórnarstovnar landsins og stovnar teirra skulu virða rættindi fólksins og tær avmarkingar í valdinum, sum gjørdar eru í hesi skipan.

## 13. AVMARKINGAR

### §38. Valdsregla

(1) Allir stovnar skulu halda seg innan fyri vald sítt og heimildir.

(2) Nýtir stovnur óviðkomandi heimildir, ella vil hann røkka óheimilaðum málum, verður atgerðin at falla.

### §39. Heimildarregla

(1) Allar lógir, dómar, avgerðir og ásetingar hjá almennum stovnum og myndugleikum mugu vera í samsvari við andan í hesi lóg og hava uppruna í henni.

(2) Er ósamsvar millum lógir ella ógreiða, fellur lægri áseting fyri hægri og ógreiða fyri rættvísi og frælsi.

### §40. Markregla

(1) Eingin lóg, kunngerð ella avgerð, einki boð ella krav kann fara um mark.

(2) Ásetingar mugu vera skikkaðar at røkka máli sínum.

### §41. Líkaregla

(1) Øll eru líka fyri lógini.

(2) Skal meting gerast, skal tað líka verða líka og tað ólíka verða ólíka viðfarið.

### §42. Tilfeingi

(1) Landsins stovnar varða um tilfeingi fólksins.

(2) Er ætlan at vinna úr tilfeingi, skal landið krevja gjøld ella tryggja øllum vinnurætt.

## 14. LØGTING

### §43. Heimildir

(1) Á tingi fær fólkið rødd og tekur støðu sína.

(2) Tingið hevur lóggávuvald og fíggjarvald og lut í eftirlitsvaldi og uttanríkisvaldi.

(3) Umframt løgtingsmenn kunnu landsstýrismenn leggja uppskot fyri tingið.

### §44. Stevna

(1) Tingið kann lóggeva til tess
at uppfylla og skipa hesa stjórnarskipan,
at skipa og tryggja búskapin,
at tryggja og veita lóg og landaskil,
at veita og virða vælferð og trygd,
at virða og fremja fólksins rættindi og landsins áhugamál.

(2) Tingið kann ikki geva lógir, sum av røtt-

um eru dómar ella avgerðir, ella sum ikki eru í samljóði við fólksins rættindi.

### §45. Lóggávumannagongd

(1) Uppskot kunnu leggjast fyri tingið alt valskeiðið.

(2) Eftir val falla øll framløgd uppskot burtur.

(3) Tingformaðurin beinir uppskot í nevnd eftir framløgu. Nevndirnar kunnu skipa almennar hoyringar og kanningar, ið neyðugar eru. Nevndirnar kunnu skjóta upp broytingar, ið virða upprunauppskotið.

(4) Uppskot skulu fyri tingið tríggjar ferðir. Eftir aðru viðgerð kunnu bert átøkar broytingar gerast.

(5) Er lóg samtykt, staðfestir og kunnger løgmaður hana.

(6) Tveir av trimum tingmonnum kunnu samtykkja, at lóg fær gildi við afturvirkni.

(7) Løgtingið kann veita landsstýrismonnum ella óheftum stovnum heimild at áseta almennar reglur í kunngerð.

### §46. Val

(1) Tingið ásetur tingmannatal.

(2) Tingið ásetur valskipan.

(3) Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til tingið.

(4) Tingið ger sjálvt av, hvør av røttum er valdur.

(5) Tingið ger av, um tingmaður, ið er dømdur í minsta lagi fýra mánaða fongsul fyri brotsverk, eftir at hann varð valdur, eigur at sita á tingi.

### §47. Valskeið

(1) Tingið skal veljast í fýra ár í senn.

(2) Eru tveir triðingar av øllum tingmonnum fyri, kann tingið samtykkja, at val skal vera í ótíð.

(3) Gamla tingið eigur sæti, til nýggja tingið er sett.

(4) Tingformaður setur tingið innan tvær vikur eftir val.

### §48. Tingstarv

(1) Tingmenn røkja sætið sum álitisstarv eftir sannføring síni.

(2) Samtykkir tingið samsýningar tingmanna ella landsstýrismanna, fær henda samtykt gildi eftir næsta val.

(3) Tingmenn mugu ikki vera í álitisstørvum, í ráðum og nevndum undir landinum ella sita sum dómarar.

### §49. Tingformaður

(1) Tingið velur formann og næstformenn.

(2) Tingformaður situr alt valskeiðið, uttan so at fýra fimtingar av øllum tingmonnum krevja hann frá.

### §50. Tingseta

(1) Tingið verður sett á ólavsøku eftir gomlum siði.

### §51. Tingsins virki

(1) Tingið sjálvt ásetur tingskipan sína, og tingformaður skipar tingsins virki.

(2) Umframt tingmenn sjálvar kunnu bert løgmaður, landsstýrismenn og tignarlig umboð møta og taka orðið á tingi.

(3) Er uppskot lagt fyri tingið, skulu fleiri tingmenn vera møttir enn ikki, um samtykt skal verða. Eru fleiri fyri enn ímóti, er uppskot samtykt.

(4) Tá ið tingið hevur umrøtt mál, kann tað gera sínar niðurstøður í samtykt.

### §52. Nevndir

(1) Tingið skipar seg í nevndir, og umboðini verða vald eftir lutfalli.

(2) Tingið skal í øllum førum velja rættarnevnd, fíggjarnevnd og uttanríkisnevnd.

(3) Nevndirnar skipa seg sjálvar.
(4) Nevndirnar kunnu fremja hoyringar og kanningar, lógarfyrireiking og annars viðgera øll mál á sínum øki.

### §53. Innlit

(1) Tingfundir eru almennir. Frítt er at endurgeva og varpa út tingfundir.
(2) Eisini nevndarfundir, hoyringar og aðrar viðgerðir eiga at vera til skjals og kunnu vera almenn.
(3) Bæði tingfundir og aðrar viðgerðir kunnu tó lokast, um tað er neyðugt.

### §54. Sømdir tingmanna

(1) Eingin má handtaka tingmann ella reisa ákæru uttan samtykki frá tinginum. Tó kann tingmaður takast á búri.

## 15. LANDSSTÝRI

### §55. Stjórnarstovnar

(1) Landsstýrið er ovasti stjórnarstovnur.
(2) Heimildir kunnu sambært lóg ella tingsamtykt ella fyriskipan løgmans latast einstøkum landsstýrismonnum ella óheftum stovnum.

### §56. Stjórnarstarv

(1) Stjórnarstovnarnir skulu fremja, halda og útinna hesa skipan og allar tinglógir.

### §57. Fyrisiting

(1) Á hvørjum málsøki skal vera fyrisiting skipað samsvarandi greiðari heimild.

### §58. Skipan

(1) Í landsstýrinum sita løgmaður, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, ið er varaløgmaður, og aðrir landsstýrismenn.
(2) Løgtingið skipar løgmansval. Atkvøður minni enn helmingurin av øllum tingmonnum ímóti, er løgmaður valdur.
(3) Heldur tingið, at løgmaður skal fara frá, verður skipað fyri viðgerð og atkvøðugreiðslu. Atkvøður meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum fyri, tekur varaløgmaður við, til nýggjur løgmaður er valdur.
(4) Løgmaður tilnevnir landsstýrismenn.
(5) Løgmaður kann loysa landsstýrismann úr starvi. Atkvøður meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann úr starvi.

### §59. Umskipan

(1) Løgmansembætið kann umskipast sambært tinglóg.
(2) Verður løgmansembætið umskipað, verður løgmaður nevndur forsætisráðharri og tingformaður nevndur løgmaður.
(3) Tá verður løgmaður fólkavaldur og samstundis evsta umboð landsins í mun til fremmandar ríkisleiðarar og eigur harumframt heimildirnar at leiða og samskipa tingsins virki, at staðfesta lógir og at seta og loysa úr starvi landsstýrismenn eftir áheitan frá forsætisráðharra.
(4) Í førum har meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann úr starvi.

### §60. Ábyrgd

(1) Nú metir tingið, at landsstýrismaður hevur ikki hildið skyldur sínar ella er farin út um heimildir sínar; tá kann tingið staðfesta ónøgd sína við ábreiðslu, samtykt ella við at ákæra fráfarnan landsstýrismann.

### §61. Málsøki

(1) Løgmaður býtir tey málsøki millum landsstýrismenn, sum tingið ikki hevur býtt ella lagt til óheftar stovnar.

(2) Landsstýrismenn fáa tær heimildir, sum í siðvenju ella lóg eru lagdar til tey málsøki, teir hava fingið.

### §62. Samskipan

(1) Løgmaður boðar regluliga til landsstýrisfundir.

(2) Landsstýrið tekur í felag støðu til lógir, samtyktir og fíggjarætlan, ið skulu leggjast fyri tingið.

### §63. Landssakførari

(1) Løgmaður leggur uppskot um landssakførara fyri tingið at góðkenna, áðrenn hann tilnevnir hann.

(2) Landssakførarin tekur sær av rættarmálum landsins og veitir landsins stovnum ráð.

## 16. DÓMSTÓLAR

### §64. Dómsvald

(1) Dómstólarnir í Føroyum eru løgrætturin og teir lægru rættir, ið skipaðir verða, umframt millumtjóða rættir, sum landið viðurkennir. Aðrar dómstólar kann løgtingið ikki áseta, men bert skipa framferðina hjá nevndu stovnum.

(2) Løgmaður leggur uppskot um dómarar fyri tingið at góðkenna eftir hoyring, áðrenn hann tilnevnir teir. Dómstólarnir skipa seg sjálvir við dómaraforseta.

(3) Dómstólarnir royna øll mál um revsing, trætur millum manna og fyrisitingarmál. Tingið kann tó lata fyrisitingarligar dómstólar taka sær av trætum og fyrisitingarmálum. Hesi mál kunnu síðan altíð leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

(4) Dómstólarnir skulu døma eftir lógini, rætta lógina og gera lóg á, har eingin lóg er.

(5) Dómstólarnir skulu royna allar lógir, kunngerðir, avgerðir og aðra almenna framferð og tryggja, at henda skipan verður hildin.

(6) Er dómstólur varur við skeiva framferð, kann hann velja betri tulking uttan afturvirkni.

(7) Er dómstólur varur við eldri lóg, ið stríða kann móti andanum í stjórnarskipanini, kann hann velja at senda tinginum hana at viðgera av nýggjum.

## 17. FÍGGJARVALD

### §65. Skattur

(1) Eingin skattur skal líknast á uttan við lóg. Kommunur kunnu tó líkna skatt á við heimild í lóg.

(2) Skattur kann ikki líknast á við afturvirkni.

### §66. Fíggjarætlan

(1) Landsins stovnar kunnu ikki gjalda útreiðslur uttan heimild í landsins fíggjarætlan, dómi ella aðrari fíggjarheimild.

(2) Fram til apríl kunnu útreiðslur gjaldast eftir farnu fíggjarætlanini.

(3) Óheftir stovnar nýtast ikki at vera við á fíggjarætlan landsins.

(4) Heimildarlógir og almennir sáttmálar kunnu treyta, at fíggjarkrøv krevja játtan.

### §67. Játtanarskipan

(1) Almenn játtanarskipan skal samtykkjast sum lóg.

### §68. Mannagongd

(1) Landsstýrið leggur fyri mikkjalsmessu fram uppskot um fíggjarætlan landsins fyri komandi ár.

(2) Er fíggjarætlanin ikki samtykt fyri ársskiftið, skal landsstýrið leggja fram uppskot um fyribilsjáttan.

(3) Fíggjarætlanin skal hava tríggjar viðgerðir umframt nevndarviðgerð.

(4) Tingið tekur ímóti serligum umbønum frá dómstólunum og óheftum stovnum.

**§69. Eykajáttan**

(1) Tingið kann veita landsstýrinum ella øðrum stovnum eykajáttan.

(2) Hevur mál skund og er peningaliga lítið týðandi, kann fíggjarnevndin veita eykajáttan.

**§70. Roknskapir**

(1) Landsstýrið og allir óheftir stovnar leggja innan seks mánaðir eftir fíggjarárslok roknskapir sínar til góðkenningar á tingi.

**§71. Grannskoðan**

(1) Tingið velur nakrar løgtingsmenn at vera løgtingsgrannskoðarar.

(2) Tingið velur eisini landsgrannskoðara at kanna og ummæla allar almennar roknskapir.

**§72. Landsbanki**

(1) Landsbankin skal umsita fæ landsins og tey fíggjar- og búskaparmál, sum ikki eru løgd landsstýrinum at umsita.

(2) Eftir uppskoti frá løgmanni velur løgtingið triðjahvørt ár tríggjar nevndarlimir bankans at sita í seks ár. Nevndin velur stjórn bankans.

**§73. Búskapargrunnur**

(1) Landsbankin skal umsita búskapargrunn.

(2) Metir landsbankin tað ráðiligt, kann grunnurin lata av vinninginum í landskassan ella at býta millum íbúgvar landsins.

## 18. EFTIRLITSVALD

**§74. Eftirlitsvald**

(1) Dómstólarnir ansa eftir, at henda skipan og lógir og mannagongdir verða hildnar. Tingið ansar eftir, at landsstýrið og fyrisitingin virka sambært lóg.

**§75. Fyrispurningar**

(1) Tingmenn og tingnevndir kunnu hvør í sínum lagi spyrja landsstýrismenn, tingformann og óheftar stovnar um embætisførslu teirra.

(2) Fyrispurningar kunnu setast og svarast munnliga ella skrivliga og verða svaraðir innan hóskiliga tíð.

**§76. Nevndareftirlit**

(1) Tingnevndirnar kunnu skipa hoyringar.

(2) Tingnevndirnar kunnu skriva frágreiðingar um kanningar sínar.

**§77. Fólksins umboðsmaður**

(1) Tingið velur fólksins umboðsmann.

(2) Umboðsmaðurin kannar fyrisiting, avgerðir og dómar hjá landsins myndugleikum. Umboðsmaðurin kann ummæla og gera tilmæli, men kann ikki taka ella broyta avgerðir.

## 19. UTTANRÍKISVALD

**§78. Uttanríkisvald**

(1) Landsstýrið umboðar Føroyar í altjóðasamfelagnum.

(2) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum er landsins uttanríkispolitiski leiðari og samskipari og hevur ábyrgdina av altjóðaviðurskiftum Føroya.

(3) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum stendur á odda fyri uttanríkistænastuni, ið er skipað við uttanríkismálaráði og sendistovum.

(4) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kann í serligum førum heimila øðrum landsstýrismonnum at virka í sínum stað.

(5) Uttanríkisnevndin umboðar tingið mótvegis landsstýrismanninum í uttanríkismálum.

(6) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum skal biðja uttanríkisnevndina um ráð,

áðrenn farið verður undir samráðingar um millumtjóða sáttmála, ið fevnir um lóggávuvald. Somuleiðis skal landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kunna uttanríkisnevndina á ein hóskandi hátt, meðan tílíkar samráðingar fara fram til tess at tryggja sær bestu ráð frá uttanríkisnevndini. Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kann samstundis áseta trúnað í tílíkum málum.

(7) Millumtjóða sáttmáli, ið fevnir um lóggávuvald, skal samtykkjast sum lóg ella sum vanlig samtykt, áðrenn hann kann verða settur í gildi.

### §79. Samveldi

(1) Føroyar kunnu vera í samveldi við onnur lond og ríki sambært millumtjóða sáttmála.

(2) Fara Føroyar upp í samveldi við onnur lond og ríki, skal tingið samtykkja samveldissáttmála sum lóg við avgjørdum meiriluta, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða. Sama mannagongd er í gildi, fara Føroyar úr samveldi við onnur lond og ríki.

(3) Ein og hvør samveldisstøða, har samveldisstovnar fáa vald, ið annars liggur hjá landsins stjórnarstovnum, skal verða væl greind í millumtjóða sáttmála. Samveldið kann ikki gera seg inn á fólksins rættindi. Landsins stjórnarstovnar ansa eftir, at andin í hesi stjórnarskipan, landsins sjálvræði og fólksins sjálvsavgerðarrættur ikki koma í vanda í samveldisstøðu.

## 20. KOMMUNUR

### §80. Kommunur

(1) Føroyar eru skipaðar í kommunur undir landsins eftirliti.

(2) Kommunustýrini eru fólkavald og skipa viðurskiftini á staðnum.

## 21. NEYÐRÆTTUR

### §81. Neyðstøða

(1) Í neyðstøðu kann løgmaður lýsa undantaksstøðu í landinum. Tá kann hann seta til viks lógir og fyriskipanir, at ikki størri virði fara fyri skeytið ella landsins trygd kemur í vanda.

(2) Berst so á, at landsins stovnar fáa ikki hildið hesa skipan ella landsins lógir í neyðstøðu, skulu avvarðandi stovnar skjótast til ber boða tinginum frá.

(3) Løgrætturin skal meta, um rætt er atborið í neyðstøðu.

## 22. SAMTYKT OG GILDI

### §82. Samtykt

(1) Henda stjórnarskipan eins og seinni broytingar í henni skulu samtykkjast á tingi við avgjørdum meiriluta, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða.

(2) Stjórnarskipanin ella broytingar í henni fáa gildi sama dag, sum fólkið hevur tikið avgerð sína.

# STJÓRNARSKIPAN FØROYA

## Viðmerkingar

# Stjórnarskipan Føroya við viðmerkingum

## *Formæli*

*Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundarlag undir stýri okkara og fyriskipanin, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.*

*Vit bygdu landið í fornari tíð og skipaðu okkum við tingi, lógum, rættindum og skyldum.*

*Vit hava hildið ting til henda dag og skipað okkum eftir tørvi okkara um landið alt.*

*Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki. Einki kann tó sløkkja sjálvræði landsins ella sjálvsavgerðarrætt okkara. Landsins egnu lógir og avgerðir eru einans tær, sum framdar eru á rættan hátt í landinum sjálvum eftir fólksins vilja.*

*Føroyar verða skipaðar eftir nútíðar tørvi á siðaarv okkara við fólkaræði, løgræði, rættindum og skyldum.*

*Henda stjórnarskipan er fram um lógir. Eingin lóg ella siðvenja má tí vera hildin galda, bara tí hon er eldri enn henda skipan ella hevur verið told í langa tíð.*

# Fyrsti partur – Stjórnarskipan

## 1. STJÓRNARSKIPAN

### §1. Fólkið og landið

(1) Føroyingar eru tjóð og Føroyar eru land.
(2) Føroyar hava í øldir samstarvað við onnur lond og ríki.
(3) Føroyar kunnu fara upp í samveldi við onnur lond og ríki.
(4) Fara Føroyar upp í samveldi við onnur lond og ríki, skal samveldissáttmáli samtykkjast sum ásett í hesi skipan.
(5) Eitt og hvørt samveldislíknandi samstarv kann sigast úr gildi sum ásett í hesi skipan.

**Viðmerkingar**

Føroyar eru millum heimsins elstu lond. Føroyska tjóðin hevur ment seg frá tí degi, norrønir landnámsmenn høvdu við sær stjórnarligar siðir úr Norðanlondum eins og bretsku oyggjunum og skipaðu seg við tingi, løgrættu, vártingum og helst eisini útinnandi og fyriskipandi høvdingum (goðum). Tíverri eru ikki mangar skrivligar keldur frá eldri tíð, men tær, ið eru, saman við keldum og siðum í øðrum sambærligum londum, eitt nú Noregi, Íslandi og Man, bera vitni um eina framkomna og støðuga skipan. Síðani hava Føroyar viðurkent norskar og danskar kongar og verið knýttar at tí danska ríkinum seinastu øldirnar, uttan tó nakrantíð at hvørva sum land og løgdømi.

Fyrsta stykki tekur samanum stjórnarsøgu og stjórnarstøðu Føroya. Føroyar eru politisk eind, nevnd land, ið fólk hava bygt, skipað og áhaldandi tikið undir við. Føroyar sum stjórnarlig eind eru ikki heimilaðar ella stovnaðar í nakrari útlendskari lóg ella sambært altjóða reglum, heldur byggja Føroyar á søgu og støðuga undirtøku frá fólkinum í landinum.

Annað stykki lýsir tann veruleika, at Føroyar eru og í mangar øldir hava verið í eini sáttmálastøðu við onnur lond og ríki. Føroyar eins og hini norrønu londini í vestri gjørdu sáttmála við norska kongin seint í trettandu øld. Sjálvur tann skrivligi sáttmálin hjá Føroyum, um slíkur varð gjørdur, er ikki varðveittur, men tann hjá Íslandi er, eins og vit vita um aðrar. Í øllum førum var talan um eina føroyska viðurkenning av samveldisstøðu. Sáttmálastøða Føroya broyttist tó, tá ið norska og danska kongsættin runnu saman, og í langa tíð var ymiskt, hvussu kongur virdi Føroya fólk og ting, serliga eftir 1814, tá ið kongur læt frá sær Noreg og vildi ikki kalla løgtingið saman í mong ár eftir tað. Føroyar vórðu tó altíð virdar sum egið løgdømi, land við egnum lógum og skipanum. Føroyingar vórðu bidnir at svørja kongi trygdareið, lógir vórðu kunngjørdar her, kongur metti tær sum „vort land Færø“ og brúkti føroyska veðrin sum part av vápnaprógvi sínum.

Støða Føroya sum eitt land, ið kundi formliga ella í verki virka úteftir og gera

sáttmála, sýntist serliga væl undir og beint eftir seinna heimskríggj, tá ið danir viðurkendu, at Føroyar kundu loysa frá Danmark, tó at danska stjórnin ikki vónaði, at so fór at vera. Endin var sum øllum kunnugt tann nýggi sáttmálin, heimastýrisskipanin.

Hesin veruleiki, at Føroyar ígjøgnum tað ting, føroyingar velja, í verki hava viðurkent eina samveldisstøðu, verður við stjórnarskipanini staðfestur. Samstundis verður eisini heimildin samtykt antin at halda fram, ella at broyta verandi støðu, ella at gera sáttmála við onnur samveldi – ella taka Føroyar úr samveldisstøðu.

Triðja stykki ásetur, at føroyingar við at samtykkja hesa stjórnarskipan avráða sínámillum, at týðandi broytingar í samveldisstøðu, tað verði seg taka seg úr samveldi, týðandi at umskipa verandi støðu ella at ganga inn í annað samveldi, skulu samtykkjast á serligan hátt. Hesin háttur verður lýstur seinni í stjórnarskipanini.

## §2. Stýrislag

(1) Føroyar eru land við fólkaræði.
(2) Løgting og kommunustýri eru altíð fólkavald.
(3) Løgmaður kann vera fólkavaldur ella tingvaldur.
(4) Onnur størv kunnu vera fólkavald ella vald á tingi.
(5) Fólkið skal altíð hava sum mest av ávirkan á landsins stýri.

**Viðmerkingar**

Stjórnarskipanin byggir á fólkaræði. Fólkaræði merkir innlit, ávirkan, virðing, umboðan og semjusøkjandi mannagongdir. Til endans merkir fólkaræði meirilutaræði, men áðrenn meirilutin tekur støðu, skulu orðaskifti, nevndarviðgerð og hoyringar føra við sær semju og tillagingar.

Veljarin skal hava sum mest av ávirkan. Sum minstamát skulu tingið og kommunustýri veljast beinleiðis. Fjórða stykki heimilar, at onnur størv antin verða beinleiðis vald ella vald á tingi. Størv, ið kunnu hugsast at verða vald beinleiðis ella á tingi, kunnu vera dómarar, sýslumenn, valstýrislimir, fólksins umboðsmaður, landsbankastjóri, almennir nevndarlimir, aðalstjórar, løgmaður, ella einstakir landsstýrismenn, ið skulu virka óheftir, eitt nú løgmálaráðharrin.

Í summum førum kann slíkt val skipast sum frítt val, í øðrum førum sum val eftir uppskoti frá ávísum stovni, í uppaftur øðrum førum kann valið avmarkast eftir førleika.

## §3. Valdsbýti, løgræði og rættvísi

(1) Stjórnarskipanin er grundað á valdsbýti, løgræði og rættvísi.
(2) Allar lógir og siðvenjur skulu virða hesa skipan.

**Viðmerkingar**
Stjórnarskipanin byggir á nakrar grundreglur, ið verða gjørdar ítøkiligar í seinni pørtum og kapitlum.

Fyrra stykki nevnir valdsbýti, ið merkir, at eingin stovnur má hava óavmarkað vald. Í sjálvum sær verður valdið býtt ímillum einstaklingar og bólkar øðrumegin og almenna valdið hinumegin. Rættindaparturin lýsir, hvat vald tað almenna ikki hevur, og hvussu tað almenna skal fara fram á markinum til privata rúmið. Síðani eru mangir stovnar skipaðir og lýstir, bæði høvuðsstovnar sum tingið, landsstýrið og løgrættur, men eisini óheftir stovnar sum fólksins umboðsmaður, landsbanki og landssakførari, eins væl og teir stovnar, ið eru partar av megin-stovnunum, tingnevndir, landsstýrismenn, løgmaður, lægri rættir og so fram-eftir.

Fyrra stykki nevnir eisini løgræði og rættvísi. Løgræði merkir stýri sambært lóg, hugtakið tekur saman um valdsreglu, heimildarreglu, lóggávumannagongd, kunngerðarlóggávu og fyrisiting, ið verða lýst seinni í skipanini. Rættvísi tekur sum hugtak saman um markreglu, mannagongdir, frælsi, rættindi og aðrar mangar ásetingar í skipanini. Vit kunnu siga, at løgræði krevur, at vit fylgja samtyktunum, men rættvísin mýkir úrslit og viðferð.

Seinna stykki vísir á, at stjórnarskipanin, umframt at vera sáttmáli føroyinga við hvønn annan um at varðveita og framhaldandi skipa landið Føroyar, eisini er at meta sum lóg, ið stendur oman fyri aðrar lógir.

## §4. Landsins fremstu stovnar

(1) Fremstu stjórnarstovnar landsins eru Løgtingið, Landsstýrið og Løgrætturin.
(2) Landið er skipað í kommunur.

**Viðmerkingar**
Tað ber ikki til at stýra landinum uttan ígjøgnum stovnar, ið umboða fólkið. Fyrsta stykki nevnir sum fremstu stovnar okkara løgtingið, elsta stovn okkara, og landsstýrið, ið sum framhald av landsnevnd løgtingsins hevur útint og fyrisitið tingsins vegna síðstu øldina.

Verandi skipan okkara fevnir ikki um dómstólar sum altýðandi part av valds-býtinum. Tó at ofta verður sagt, at rættirnir eru partur av valdsskákanini, er tað ikki so í roynd og veru. Dómstólarnir seta næstan ongantíð tinglógir ella kunngerðir til viks, og teir tulka ikki alment lógir ella seta orð á rættarligar siðvenjur. Í hesi stjórnarskipan verður lagt upp til, at hetta kann broytast nakað, og tí verða tingið, landsstýrið og løgrætturin allir nevndir sum fremstu stovnar landsins.

Eisini kommunurnar verða í øðrum stykki lýstar millum meiri týðandi stovnar

landsins, og víst verður til meira ítøkiligu viðmerkingarnar um kommunurnar í viðmerkingum til grein áttati.

## §5. Ímyndir og mál

(1) Føroyar hava flagg, tjóðsang og skjaldramerki.

(2) Almenna málið er føroyskt.

**Viðmerkingar**

Ímyndir landsins hava altíð havt stóran týdning. Stríðið um Merkið, flagg Føroya, er ofta tiltikin partur av tjóðskaparstríði føroyinga. Seinna stykki viðvíkur almenna málinum, ið er føroyskt.

# Annar partur – Rættindi

**Viðmerkingar**
Annar partur lýsir tey rættindi, fólkið hevur. Rættindi eru antin tað vald, ið landsins almennu stovnar ikki hava, ella tær avmarkingar í valdinum, sum stovnarnir mugu virða. Tað verður hildið neyðugt at orða rættindini nágreiniliga í stjórnarskipanini fyri at tryggja avgerðarheimild løgtingsins og fyri at tryggja almennu tilvitanina um rættindini. Føroyar kunnu gerast partur av altjóða sáttmálum.

## 2. ALMENN RÆTTINDI OG SKYLDUR

**Viðmerkingar**
Annar kapittul inniheldur almennu reglurnar um rættindi og skyldur borgarans. Meira ítøkiligu rættindini, sum koma í seinni kapitlum, mugu tí altíð verða lisin í ljósinum av ásetingunum í hesum almenna kapitli.

### §6. Rættindi og verja teirra

(1) Rættindi kunnu einans avmarkast, um tað er neyðugt og í samsvari við fólkaræðisliga og samhaldsfasta stjórnarskipan.
(2) Tingið kann í serligum førum knýta rættindi at heimarætti ella bústaði.
(3) Landsins stovnar skulu altíð verja rættindi hjá íbúgvunum.

**Viðmerkingar**
Í mongum fremmandum stjórnarskipanum og sáttmálum verða treytir fyri rættindaavmarking ásettar neyvt í sambandi við tey einstøku ítøkiligu rættindini. Í hesum uppskoti verða treytirnar fyri at avmarka rættindini ásettar einaferð fyri allar í almenna partinum. Kortini verður vikið frá hesum útgangsstøði í ávísum førum, har serliga er neyðugt at greina út treytirnar.

Fyrsta stykki sigur frá, at útgangsstøðið er, at borgarar hava rættindi, og at serligar orsøkir mugu til, um rættindini skulu verða avmarkað. Talan er um legitim endamál, sum heimila at víkja frá útgangsstøðinum um rættindi. Orðið ”neyðugt” er standardur, ið ikki er neyvur ella objektivur, men sum skal finnast og mýkjast í praksis. Orðið teingir seg eisini at øðrum grundreglum í hesi stjórnarskipan, serliga markregluni, men eisini regluni um rættvísi.

At meta um avmarking av frælsinum, er neyðugt at kanna, um inntrivið er ógvisligari enn verjuáhugamálið kann bera. Sum dømi kunnu myndugleikar ikki forða fólki við ávísum meiningum at savnast, bert tí illgruni er um, at ófriðarkroppar eru teirra millum. Annað dømi kann vera avmarking í innløgurættinum. Ætlar landið at skerja rættin at fiska til húsarhaldið, má landið kunna vísa á eitt haldgott verjuáhugamál; tað kundi verið stovnsrøkt, og síðani at áhugamálið krevur júst hesa avmarkingina, kanska at leiðir verða stongdar.

Bæði endamálið og miðilin mugu vera í lagi og kunna ávísast ítøkiliga við kanningum, tølum og frágreiðingum, skulu rættindini avmarkast.

Eisini tilvísingarnar til fólkaræði og samhaldsfesti vísa til normar, sum er standardir heldur enn reglur. Tulkandi stovnarnir verða eisini her at gera av, nær rættindaavmarking er ov víðgongd í mun til grundleggjandi virði um fólkaræði og samhaldsfesti, soleiðis sum ættarliðini tulka tey.

At løgtingið sambært stykki tvey í serligum førum kann teingja rættindi at bústaði ella heimarætti, er natúrlig avleiðing av, at Føroyar fevna um eitt politiskt samfelag, ið kann veita íbúgvum ella borgarum, føroyingum, sersømdir av ymsum slag. Slíka skipan hava at kalla øll lond.

Triðja stykki áleggur ikki einans dómstólunum, men øllum landsins stovnum, altíð at virða og verja fólksins rættindi. Serliga á løgtingi, har fólkið fær rødd, er tað týðandi, at stjórnarskipanin javnan verður tikin fram. Gongur henda avmarking nú fólksins rættindum ov nær? Er endamálið nóg dygt at grunda so víðgongd inntriv? Antin talan er um fiskiveiðu, barnavernd, skúlaskap, fólkanøvn, ferðslu, vinnulív, býarskipan ella onnur mál, so mugu vit altíð viga borgaranna rættindi og frælsi eftir stjórnarskipanini og gomlum siði mótvegis teimum nýggju ætlanum og reglum, sum eru í uppskoti.

## §7. Onnur rættindi

(1) Umframt rættindi ásett í hesi skipan, verjir hon onnur rættindi, sum eru sjálvsøgd, ómissandi ella neyðug.

**Viðmerkingar**

Grein átta endurspeglar í rættindahøpi grundregluna um, at valdið kemur frá fólkinum. Føroya fólk er heimilari, og myndugleikarnir eru fulltrúar. Valdið er upprunaliga hjá fólkinum, og stjórnarskipanin lýsir heimildir myndugleika og nøkur av rættindum fólksins, men heimilarin – Føroya fólk – hevur ikki við hesi stjórnarskipan endaliga og tømandi ásett fólksins rættindi. Stjórnarskipanin nevnir í stuttum og almennum orðingum rættindi, sum síðan mugu latast upp í tulking og gerast ítøkilig. Henda tilgongd fer at vísa seg á tingi, í fyrisiting, í rættarskipan og í almenna orðaskiftinum.

## §8. Skyldur

(1) Øll skulu virða hesa skipan og tær lógir og skyldur, sum verða til í samsvari við hana.
(2) Øll eiga at virða landsins arv og tilfeingi eins og rættindi hjá øðrum.

**Viðmerkingar**

Oftast verður tað ikki sagt, men samfelag við stjórnarskipan ber ikki til uttan skyldur. Tá fólkið samtykkir hesa stjórnarskipan, taka tey undir við at virða skipanina og tær lógir, sum á rættan hátt og við virðing fyri rættindum fólksins

verða til sambært hesi skipan. Fólkið er á tann hátt bæði harri og tænari, hevur og skapar valdið við at taka undir við skipanini og má samstundis geva seg undir valdið. Á sama hátt samtykkja vit at virða rættindi hvør hjá øðrum, eins og landsins arv og tilfeingi.

## 3. JØVN RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Jøvn rættindi eru tey rættindi, ið vit kunnu lýsa sum samtyktar reglur um at seta øll fólk javnt í metum. Søguliga hava summar stættir havt framíhjárættindi (konglig, aðalsfólk, ríkfólk) og kallmenn havt rættindi fram um kvinnur. Summar ásetingarnar í kapitlinum um jøvn rættindi taka støði í søguligum veruleika, men eins og ásetingarnar í stjórnarskipanini annars, kunnu tær eisini nýtast í framtíðar politiskari og rættarligari menning og støðutakan sum javndømi á øðrum økjum.

### §9. Javnstøða

(1) Øll fólk eru javnsett uttan mun til eyðkenni ella frábregði.

(2) Tingið kann samtykkja at rætta tann mun, ið áður hevur verið gjørdur á fólki vegna eyðkenni ella frábregði.

(3) Eingi forrættindi kunnu vera varandi.

**Viðmerkingar**

Henda áseting er serliga tikin við vegna teir mismunir, ið gjørdir eru á kvinnu og manni frá gamlari tíð, men onnur eyðkenni og frábregði kunnu eisini verða nevnd. Ásetingin loyvir undantaki frá líkaregluni, nevnd "positiv diskrimination", og vit kunnu á føroyskum kalla hana framumregluna.

Orsøkin til at nýta eina slíka reglu kann vera mannminkandi atburður, ið fyrr er framdur og hevur havt við sær týðandi skeivleikar. Dømi, sum longu eru nevnd, eru mismunir gjørdir vegna kyn. Í slíkum førum kann vera neyðugt, til tess at fáa javnvág í, at áseta kvotur ella onnur tiltøk, sum annars verða mett at gera mun á fólki.

Hugsast kann, at kynskvotan fyri almennar nevndarlimir hevur havt við sær, at fleiri kvinnur hava fingið royndir av nevndararbeiði og eru slopnar at vísa, hvussu tær roynast. Men framumreglan kann gera, at best skikkaði persónurin ikki verður valdur, men einans best skikkaði av kyninum, ið ikki hevur fingið sítt. Slíkt er annars at rokna sum mismunur, men kann í serstøkum førum verða gjørt at rætta skeivleikar.

Av tí at endamálið í slíkum føri er at rætta ein gamlan mismun, er umráðandi at hava umsjón við, um ásetingin virkar eftir ætlan.

Triðja stykki ásetur, at framumreglan bert skal verða nýtt í avmarkaða tíð at

rætta ein skeivleika. Tá ið javnvág má haldast at vera komin í, mugu øll aftur verða javnsett fyri lógini.

# 4. PERSÓNLIG RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Persónlig rættindi eru tey, ið viðvíkja einstaklinginum og integriteti hansara. Hesi rættindi hoyra til tey stjórnarsøguliga elstu rættindini.

## §10. Lív og trygd

(1) Øll eiga rætt til lív og trygd.

(2) Eingin kann verða revsaður ella viðfarin miskunnarleyst ella óvirðiliga.

(3) Deyðarevsing kann ikki ásetast.

**Viðmerkingar**

Ásetingin setur nakrar standardir fyri virðiligari viðferð av einstaklinginum.

Í øðrum stykki verða standardirnir miskunnarleyst og óvirðiliga innsettir. Hvat liggur í hesum, skal mennast og broytast við tíðini, samsvarandi fatan hjá fyrisitararum, lógkønum eins væl og hjá leikfólki, ið virka sum løgrættufólk (nevningar) í revsimálum.

Sum dømi um miskunnarleysa viðferð kann nevnast, at danski staturin javnan er fyri ábreiðslum, tí skuldsett ov ofta verða hildin leingi aftur í einsemi.

Dømi um óvirðiliga ***viðferð*** kundi verið, at fólk í innkrevjingarmáli mistu klæði, búnýti ella onnur tól, ið teimum tørvaðist. Slík regla er í dag kend í rættargangslóg, men verður nú í meiri almennum líki partur av stjórnarskipanini.

Dømi um óvirðiliga ***revsing*** kundi verið likamlig revsing, órímiliga stórar bøtur ella fongsul í einsemi ella fjart burtur frá familju og vanligum umhvørvi.

At almannakunngera dómar er ikki í sjálvum sær miskunnarleyst ella óvirðiligt, men tvørturímóti neyðugt bæði vegna tann dømda og samfelagið alt, men ávísar upplýsingar, ella í heilt sjáldsomum førum eisini navnið á tí dømda, kunnu viðhvørt haldast aftur ella broytast til onnur nøvn í tí almannakunngjørda dóminum.

Deyðarevsing er dømi um brot á rættin til lív eins væl og óvirðiliga revsing, og forboðið móti deyðarevsing kundi tí eins væl verið útleitt frá teimum fyrru reglunum; men í staðin er deyðarevsingin greitt tikin við, so ivin er burtur um tann spurningin.

## § 11. Persónligt frælsi

(1) Øll eru fræls og frí.

(2) Tingið kann samtykkja lógir um frælsistøku. Avgerð sambært slíkari lóg kann leggjast fyri dómara.

(3) Verður ein handtikin fyri brotsverk, skal hann fyri dómara innan 24 tímar. Bert dómari kann staðfesta ella leingja handtøku.

(4) Dómari kann áleggja longri varðhald, tó í mesta lagi fýra mánaðir, og bert um longri revsing er væntandi.

(5) Dómari kann í heilt serligum førum áleggja varðhald í einingi ella partvísari avbyrging, tó bert í tveir mánaðir.

**Viðmerkingar**

Ásetingin um persónliga frælsið lýsir, hvat vald ikki er latið tí almenna, og hvussu almennir myndugleikar skulu bera seg at, tá teir nærkast rúminum hjá tí einstaka.

Fyrsta stykki er almenna reglan. Vanliga eru reglur um frælsistøku í heimildarlóg hjá løgreglu ella ásett sum revsing í brotsmálum, men eisini frælsistøka á annan hátt enn í revsihøpi kann hugsast. Dømi um slíka kann vera varðhald innan sjúkra-, sinnis- ella ellisrøkt, har viðkomandi persónar ofta ikki megna at geva samtykki til viðgerðina og tí eru fyri frælsistøku.

Annað stykki viðurkennir rættin hjá tinginum at taka frælsið frá fólki, og at hetta skal altíð kunna roynast í rættinum.

Síðani verður ásett, hvussu leingi handtøka kann vara. Føroyar eru lítið land við góðari samferðslu, tí eru 24 tímar vanliga ivaleyst til tess at leggja málið fyri rættin, um longri handtøka krevst. Markreglan merkir tá, at er handtøka í ein tíma nóg mikið, skal viðkomandi latast leysur innan. Samsvarandi øðrum stykki kann eisini styttri handtøka enn 24 tímar roynast.

Dómari fær heimild at leingja handtøku, um tað er neyðugt og endaliga revsingin kann gerast longri. Dómari fær eisini heimild at loyva varðhaldi í einingi í avmarkaða tíð.

## § 12. Bústaður og samskifti

(1) Bústaðir, før og alt privat samskifti eru vard fyri almennum inntrivum.

(2) Eru rannsókn, hald ella onnur inntriv neyðug sambært lóg og landsins tørvi, skal dómari í úrskurði gera av, um tað er loyviligt. Er tað ógjørligt undan inntrivinum, skal úrskurður gerast aftaná.

(3) Í lóg kann tingið loyva alneyðugum kanningum uttan úrskurð frammanundan. Slík inntriv skulu tó altíð kunna roynast.

**Viðmerkingar**

Ásetingin verjir tað privata rúmið móti órættvísum ágangi. Fyrsta stykki lýsir tað privata rúmið við dømum um tað varda.

Annað stykki lýsir mannagongdina, um kanning ella annað inntriv er neyðugt. Innihaldsliga treytin fyri slíkum inntrivi er, at tað er neyðugt; talan er harvið um ein standard, ið skal mennast og mýkjast í siðvenju. Tann myndugleiki, ið heldur inntrivið vera neyðugt, skal leggja tað fyri dómara at meta um, hvørt tað er neyðugt. Myndugleikin kann tá ikki skjóta seg undir, at talan er um meting, sum myndugleikin frítt ræður yvir, men skal veruliga kunna sannføra dómaran, tí er ivi, fellur ógreiða fyri frælsi, og inntrivið verður ikki góðkent. Í summum førum er ógjørligt at leggja málið fyri dómara. Talan kann vera um inntriv á sjónum ella í knappari vend. Tá skal myndugleikin leggja spurningin, um inntrivið var loyviligt, fyri dómaran eftir hendingina.

Triðja stykki loyvir í alneyðugum førum tinginum at heimila inntrivum uttan úrskurð frammanundan. Tann, ið er fyri inntrivi, kann tó altíð krevja málið roynt, og skal myndugleikin tá rættvísgera framferð sína. Um ávíst inntriv alment er alneyðugt, og tinglógin harvið í sjálvum sær er innan heimildina hjá tinginum samsvarandi grein 44, og inntrivið eisini ítøkiliga er alneyðugt, stendur til dómaran at eftirmeta.

## §13. Ognarrættur

(1) Allar ognir og øll rættindi eru vard fyri ágangi.

(2) Almennur myndugleiki kann eftir mannagongd í lóg taka ræði á privatari ogn ella rætti. Tílík ognartøka skal fara fram sambært neyðugum og átrokandi almennum tørvi.

(3) Fyri slíka ognartøku skal fult endurgjald latast.

**Viðmerkingar**

Fyrsta stykki lýsir innihaldsliga fevnið hjá ognarrættinum, har allar ognir og øll rættindi samsvarandi siðvenju og dómalóg eru vard.

Annað stykki lýsir, nær og hvussu myndugleikar sum undantak kunnu gera seg inn á ognarrættin. Talan skal vera um tinglógarásetta, almenna skyldu, ið myndugleiki skal fremja. Síðan skal ítøkiligi tørvurin bæði vera neyðugur og átrokandi, og viðkomandi myndugleiki skal týðiliga ávísa hetta fyri viðkomandi royndarstovni, so ógreiða ikki er um tað. Nú er alt hetta ávíst; tá kann viðkomandi stovnur við tvingsli keypa rættin ella ognina.

Triðja stykki lýsir, hvussu hann, ið misti ognarrætt sín, skal samsýnast. Talan skal vera um fullan prís, antin endurreisingarvirði, nyttuvirði ella handilsvirði, hvat ið hægst av teimum er. Eins og alment er galdandi, skal ivi ella óvissa koma tí til góðar, hvørs ognir vóru tiknar í sambandi við tvingsilskeypið.

# 5. TRÚARRÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Rætturin til at hava gudstrúgv sína í friði er grundleggjandi fyritreyt fyri einum fólkaræðiligum rættarsamfelag. Trúgvin er insta sjálvsfatan, fólk hava. Skal samfelagið vera fyri øll, mugu øll kenna, at tey ekkaleys kunnu trúgva og liva eftir trúgv síni. Hesin rættur er tí partur av innasta kjarnanum av teimum gomlu frælsisrættindunum. Rætturin at trúgva er serliga nær tongdur at teimum politisku rættindunum, tí uttan rætt til at koma saman og seta fram áskoðan sína eru trúarrættindini lítið verd.

## §14. Trúarfrælsi

(1) Øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv á tann hátt, tey vilja.

(2) Tingið kann veita kristnitrúnni serligar sømdir, tó uttan at gera seg inn á aðrar fatanir.

(3) Fólkakirkjan eigur lut eftir gomlum siði og skipar seg sjálv.

**Viðmerkingar**

Stykki eitt vísir á útgangsstøðið, at øll eiga rætt at trúgva og útinna sína trúgv á ein og hvønn hátt. Frælsi at trúgva merkir tó ikki bara rætturin til at hava og útinna gudstrúgv sína í friði, men fevnir um samvitskufrælsi í breiðari merking. Harvið er eisini rætturin tryggjaður til ikki at hava nakra trúgv og at liva eftir teirri sannføring.

Annað stykki endurspeglar ta serligu støðu í søgu og mentan føroyinga, ið kristnitrúgvin hevur. Tí er eisini loyvt tinginum at veita henni serligar sømdir, um ikki tingið ger seg inn á aðra trúgv. Hervið verður eisini boðað frá, at trúarfrælsið ikki setur allar trúargreinir javnt. Tað ber til at hava kristnar halgidagar, kristnan morgunsang í almennu skúlunum, morgunlestur í almenna útvarpinum, uttan at tað er at mett at stríða ímóti trúarfrælsinum.

Fólkakirkjan hevur í øldir havt serligan lut í føroyskum kristnilívi. Hvørja støðu hon skal hava, fara fólk altíð at kjakast um. Tí er frægast at lata siðvenju og framtíð skipa kirkjuna heldur enn at grundfesta ávísa støðu í stjórnarskipanina. Ásetingin um fólkakirkjuna er tískil ikki bindandi fyri møguliga framtíðar skipan av kirkjuni; eitt nú skilnað millum stat og kirkju.

# 6. POLITISK RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Eins og trúarrættindini eru eisini tey politisku rættindini partur av kjarnanum av teim góðu gomlu frælsisrættindunum, ið av álvara vórðu vunnin, tá ið fólkaræðið móti endanum á átjandu øld fór at vinna fram í Vesturheiminum.

Heldur ikki politisku rættindini eru óavmarkað, men kunnu sambært ásetingunum í serliga øðrum kapitli vigast móti rættindunum hjá øðrum og avmarkast,

um hetta annars er neyðugt og samsvarandi fólkaræðisligari og samhaldsfastari samfelagsskipan.

## §15. Valrættur

(1) Íbúgvar landsins eiga rætt at velja umboð á ting, í stýri og í stovnar.
(2) Íbúgvar landsins eiga rætt at taka støðu til lógir og viðtøkur við fólkaatkvøðu. Tingið kann lata fólkinum heimildir sínar eftir hesi skipan.
(3) Eru tingmenn ónøgdir við samtykta tinglóg, kann triðingur av tingmonnum krevja lógina lagda fyri fólkið í síðsta lagi viku eftir, at hon er samtykt.

**Viðmerkingar**

Beinleiðis fólkaræðishugsjón kemur til sjóndar í fyrsta stykki í fimtandu grein. Her verður gjørt greitt, at fólkið ikki fær nakran rætt, men longu frammanundan hevur rætt til at velja umboð á ting og í stýri og stovnar. Hetta kemur til sjóndar við, at henda stjórnarskipan verður góðkend beinleiðis av fólkinum fyri at fáa gildi.

Annað stykki tryggjar rættin til við fólkaatkvøðu at taka støðu til lógir og viðtøkur, eins og tingið kann lata fólkið beinleiðis velja størv og stovnar, sum annars verða vald av tinginum.

Sambært triðja stykki hevur minniluti av tingmonnum, um hann er ónøgdur, rætt til at leggja samtykta lóg fyri fólkið í síðsta lagi viku eftir, at hon er samtykt. Hetta verður hugsandi mest brúkt í málum, har ivi er um rætta vigan av rættindum fólksins, ella lógin ber í sær víðfevndar broytingar. Vandi er neyvan fyri, at mál koma fyri fólkið í tíð og ótíð, tí tann, sum roynir at gera sær dælt av hesum rætti, missir skjótt trúvirði millum manna, og tí kemur javnvág í av sær sjálvum.

## §16. Framsøgufrælsi

(1) Ein og hvør eigur rætt at hava og seta fram hugsan, áskoðan og sjónarmið á ein og hvønn hátt.
(2) Á sama hátt eiga øll rætt at vera við í samskifti og taka ímóti upplýsing.
(3) Fjølmiðlarnir eiga serligan rætt at kanna, lýsa og bera fram.

**Viðmerkingar**

Framsøgufrælsi er av týdningarmestu politisku rættindum og grundarlag undir og fyritreyt fyri virkandi fólkaræði.

Fyrsta stykki leggur dent á frælsið hjá øllum til bæði at hava og seta fram sína meining. At hetta kann verða gjørt á ein og hvønn hátt, tryggjar, at ivi ikki stendst um, hvørt ávísir miðlar ella hættir at bera fram ella taka ímóti eru fevndir av rættinum.

Til tess at rætturin til framsøgufrælsi skal hava veruligt innihald, hevur stykki tvey áseting um, at øll á sama hátt skulu hava rætt til at vera við í samskifti og taka ímóti upplýsing. Tískil vil avmarking av møguleikanum hjá borgarum at taka ímóti boðum ella upplýsingum vera eins greitt brot á rættin til framsøgufrælsi.

Fjølmiðlarnir verða ofta nevndir fjórða valdið í fólkaræðisligum samfelag. Tann sannleiki er í hesum, at uttan kritiskar fjølmiðlar er fólkaræðið lítið vert. Tí veitir triðja stykki fjølmiðlunum serligan rætt og verju.

### §17. Felagsfrælsi

(1) Øll hava rætt at taka seg saman í feløg og fylkingar til eitt og hvørt endamál.
(2) Feløg og fylkingar kunnu avsigast, um atlit at trygd, friði og landaskili krevur tað.

**Viðmerkingar**
Feløg endurspegla samfelagið og geva bólkum og áhugamálum rødd og umstøður. Samtøk og fylkingar av mongum sløgum eru fortreyt fyri so mongum táttum av samfelagslívinum. Flokkar í politisku skipanini, vinnufeløg at reka virki, fakfeløg at umboða verkafólkið, áhugafeløg, trúarsamfeløg, lokalfeløg, samtøk av øllum sløgum, øll eru neyðug til tess at varðveita frælsi og fjølbroytni. Tessvegna verða feløg ofta kúgað og plágað í einaræði og harðræði. Skipan okkara verjir rættin at stovna feløg og ásetur, at tey einans kunnu avsigast, um sera álvarsamar og tungar orsøkir kunnu ávísast.

### §18. Savningarfrælsi

(1) Øll eiga rætt at savnast á almennum stað, um hetta ikki brýtur landaskil.

**Viðmerkingar**
Eisini rætturin til at savnast á almennum stað er týðandi fyritreyt fyri fólkaræðisligum samfelag. Hetta frælsið og felagsfrælsið eru samstundis treyt fyri, at framsøgufrælsið fær veruligt innihald.

Greinin gevur øllum rætt til at savnast á almennum stað. Eisini her er serliga ásett, at hesi rættindi einans kunnu avmarkast, um vandi er fyri broti á landaskil.

## 7. VINNURÆTTINDI

**Viðmerkingar**
Vinnurættindi eru ikki millum elstu alment lýstu frælsisrættindi. Tey treyta ikki einans, at tað almenna letur borgaran vera í frið hjá sær sjálvum, men krevja ofta eisini av myndugleikunum, at teir taka ítøkilig stig til at verja rættindi hjá borgararum. Hóast ikki partur av eldri mannarættindalýsingum, hevur støðugt stríð verið fyri fríum handli, rætti at vinna, rætti at arbeiða og ikki minst fortreytum fyri vinnu og arbeiði.

### §19. Vinnurættur

(1) Øll eiga rætt til vinnu og handil.

(2) Vinnuligar samtøkur, sterkar vinnufyritøkur ella vinnuligar samanleggingar mugu ikki avlaga neyðuga vinnuliga kapping. Heldur ikki má almennur stovnur gera størri inntriv, enn virki hansara krevur.

**Viðmerkingar**

Grein nítjan sigur frá, at partur av grundleggjandi virðunum undir hesi stjórnarskipan er rætturin til fría kapping á einum frælsum marknaði.

At fyrra stykki ásetur, at øll eiga rætt til vinnu og handil, merkir ikki, at tað almenna uttan mun til førleika og krøv skal geva øllum hesi rættindi. Meira verður sipað til, at eingin ógrundaður ella ósakligur munur má vera, ið forðar fyri hesum. Tað er tí einki til hindurs fyri, at tað almenna kann krevja ávísan førleika ella ávísa útbúgving til einstakar vinnur og einstakan handil. Eitt nú kann eingin verða tannlækni uttan at hava lokið eina góðkenda tannlæknaútbúgving.

Annað stykki staðfestir grundreglur frá kappingarlóg, ið skulu tryggja, at fyritøkur ikki nýta kappingaravlagandi miðlar við til dømis at leggja saman og gerast so máttmiklar, at tær í ov stóran mun koma at ráða einsamallar á marknaðinum. Á sama hátt mugu almennir stovnar heldur ikki við óneyðuga stórum inntrivum leggja seg út í kapping við privat.

### §20. Arbeiði

(1) Øll eiga rætt at arbeiða.

(2) Landið tryggjar øllum møguleika fyri frálæru ella útbúgving til tess at kunna arbeiða ella vinna.

**Viðmerkingar**

At øll hava rætt til at arbeiða, merkir ikki at ein, ið ikki hevur fingið arbeiði, kann fara í rættin og krevja at verða settur í okkurt starv. Tað, at øll eiga rætt at arbeiða, snýr seg her um, at tað almenna skal tryggja, at ósakligur munur ikki verður gjørdur á fólki, ið bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum.

Annað stykki teingir aftur sosial rættindi at vinnurættinum. Henda áseting krevur, at tað almenna skapar fortreytirnar fyri at menna vinnuligan førleika.

## 8. SOSIAL RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Sosialu rættindini eru ikki eins gomul og tey politisku frælsisrættindini. Tí verða tey eisini søgd at hoyra til annað ættarlið av rættindum. Sosial rættindi eru sprottin úr eini hugsjón um samhaldsfesti, ið ikki metir, at tey politisku frælsisrættindini eru nakað verd, um samfelagið einans virðir rættindini borgar-

ans at verða í frið, uttan eisini at átaka sær beinleiðis ábyrgd av vælferðini hjá borgarunum.

Umframt at innihalda fleiri standardar enn reglur krevja sosialu rættindini eisini meira virknan leiklut frá myndugleikunum enn frælsisrættindini. Hesi rættindi er tí ikki eins løtt at handhevja í verki sum t.d. rættindi hjá skuldsettum. Ásetingarnar um sosial rættindi geva borgarunum og tingmonnum grundreglur at styðja seg til, tá ið almannaverk og skúli skulu skipast, og tá ið ivi er um sosial rættindi sum tingmál og sum fyrisitingarmál.

## §21. Skúli

(1) Rætt at fáa neyðugan skúla og undirvísing eigur hvør einstakur alt lívið. Øll hava skyldu at taka við skúla og undirvísing í barna- og ungdómsárum.

(2) Foreldur kunnu gera av, at tey sjálvi taka á seg ábyrgd av skúla og undirvísing barnanna, men støðið má vera nóg gott.

**Viðmerkingar**

Fyrri liður í fyrra stykki tryggjar øllum neyðugan skúla og undirvísing alt lívið, meðan annar liður í sama stykki áleggur sum skyldu at taka við skúla og undirvísing í barna- og ungdómsárum. At tað er skylda at taka við skúla og undirvísing í barna- og ungdómsárum svarar til ein rætt, sum øll eiga til hetta í ávísum og alment ásettum tíðarskeiði í ungum árum. Rætturin til neyðugan skúla og undirvísing alt lívið hevur við sær, at tað almenna framhaldandi hevur skyldu at dagføra útbúgving borgaranna, so at ikki vantandi nýggjur kunnleiki tarnar teimum í starvi og menning. Júst hvussu hetta verður skipað, og hvussu nógv tingið skal játta til hetta, fer framtíðin at gera av.

Sambært seinna stykki kunnu foreldur eisini velja sjálvi at taka sær av útbúgving barnanna. Men tá setur tað almenna krøv til dygdina í undirvísingini, so at hon í øllum førum ikki verður verri enn tann útbúgving, sum tað almenna bjóðar borgarunum.

## §22. Sosial trygd

(1) Landið skal tryggja øllum sømilig kor.

(2) Landið skal hava umsorgan fyri, at øll fáa eftirløn ella pensjón.

(3) Tann, sum hvørki sleppur fram at egnari vinnu ella løntum arbeiði, eigur at fáa almennan stuðul og styrk.

**Viðmerkingar**

Fyrsta stykki inniheldur ta mest grundleggjandi sosialu skyldu, at landið skal veita øllum sømilig sosial kor. Hetta er samstundis ein sera almennur lógstandardur, ið rættarskipanin kann koma at hava ilt við at handhevja; tess kravmiklari eru tey moralsku boðini til løgting og almannafyrisiting um at fremja tey virði, sum fólkið við hesi stjórnarskipan hevur tikið undir við.

Næsta stykki merkir ikki, at landið skal veita øllum eftirløn ella pensjón úr landskassanum, men at landið skal síggja til, at tað verður gjørt møguligt hjá øllum at tryggja sær eftirløn ella pensjón. Henda skylda er uttan mun til, um borgarin hevur verið virkin á arbeiðsmarknaðinum ella ikki.

Triðja stykki teingir sosial rættindi saman við vinnurættindum, tí um umstøðurnar eru so, at eitt fólk ikki sleppur framat vinnu ella løntum arbeiði, so áliggur tað myndugleikunum at tryggja viðkomandi neyðugan stuðul og styrk fyri at kunna koma í arbeiði aftur og styrk til eitt sømiligt lív, meðan bíðað verður. Eisini eigur at verða veitt teimum, sum als ongan møguleika hava at koma at arbeiða, stuðul, so at tey kunnu hava eitt virðiligt lív.

**§23. Familja**

(1) Trivnaður familjunnar er fyritreyt fyri støðugari sosialari menning. Landið tryggjar familjuni góð kor.

(2) Børn eiga at verða uppfostrað í einum familjuumhvørvi við gleði, kærleika og samljóði, har tað, ið er best fyri barnið, skal vera fremsta atlit.

**Viðmerkingar**

Familjan er eftir einstaklingin samfelagsliga og búskaparliga grundeindin í samfelagnum, og trívist familjan ikki, hevur tað ringa ávirka á ta sosialu menningina. Álagt er tí landinum at hava umsorgan fyri, at tann búfelagsskapurin, sum familjan er, fær hóskandi umstøður at trívast undir. Í seinna stykki verður mint á, at børn eru viðkvæm og tí eiga at liva undir korum merkt av kærleika og friðsemi.

## 9. BÚRÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Hesi rættindi samsvara aldagamlari føroyskari fatan og siðvenju, har øll hava rætt til at fara á flot ella á seiðaberg og veiða til egið brúk, eins og tað higartil hevur verið vanligt í Føroyum. Til egið brúk eigur í hesum føri eisini at verða roknaður tann gamli føroyski siðurin at bera vinum og skyldfólki eitt kók. Grindaveiða kemur eisini undir hesa reglu, so leingi grindabýtið fer fram eftir fornum siði.

**§24. Innløgurættindi**

(1) Hvør eigur rætt til egna innløgu.

(2) Nú reka menn hval á land upp; tá skal tað mesta vera drápspartur ella heimapartur.

(3) Landið skal bert gera tær avmarkingar, sum neyðugar eru at tryggja fæstovnar, innløgurætt ella búseting.

(4) Í øllum førum, tá ið búfólk leggja inn á sjónum ella á landi til sín sjálvs, uttan at gjald er uppií, skal innløgan vera teimum frí og fingin.

**Viðmerkingar**
At leggja inn, vinna sær og sínum til matna og húsarhalds er grundleggjandi rættur í Føroyum, partur av bygdamentanini og fortreyt fyri at fólkið viðurkennur stjórnarskipanina, tí hesi rættindi eru eldri enn politiska skipanin í Føroyum. Grindaveiða kemur eisini undir hesa reglu, so leingi grindabýtið fer fram eftir fornum siði og ikki er vinnuligt.

Fyrsta stykki tekur saman um innløgurættin og staðfestir, at øll eiga rætt til innløgu.

Annað stykki lýsir býtið, tá ið ræður um grind. Fyrri liður er ein beinleiðis orðing úr Seyðabrævinum, men seinni liður er tann býtisháttur, vit kenna í dag. Henda áseting kann eisini víðkast til aðra veiðu, har ikki almennar kvotur, ognarrættur (t.d. landpartur) ella onnur skipan forðar tí.

Triðja stykki lýsir tær innihaldsligu avmarkingar, ið landið kann gera. Umframt at verja sjálvan innløgurættin kann landið verja tað livandi tilfeingið fisk, hval, fugl og so framvegis og eisini tryggja búseting. Til hetta síðsta kann hugsast, at har stovnur er sera lítil og viðkvæmur, verður veiða eftir honum avmarkað til teirra, ið búgva á smáplássum ella nærhendis hesum stovni.

Fjórða stykki lýsir, at innløgan hjá búføstum fólkum í Føroyum er skattafrí. Innløga kemur ikki undir kvotur ella aðrar avmarkingar, tí hon er í veiðunøgd avmarkað í sjálvari sær. Verður tað, sum veitt verður, selt ella á annan hátt latið øðrum við vinningi fyri eyga, so er innløgan ikki longur frí og fingin; tá kemur hon undir vanligar skattingarreglur.

## §25. Hvørsmansrættur

(1) Hvør eigur rætt at ferðast og fara á sjógvi og landi, tá ið tað ikki er til ampa fyri fólk, fæ, ogn, vøkstur og náttúru.

**Viðmerkingar:**
Hvørsmansrætturin gevur í meginreglunum hvørjum menniskja rætt til at ferðast og fara allastaðni í landinum. Hagi og fjøll eru í dag eitt upplivingarøki. Tað skal tí verða loyvt hjá fólki at ganga í haganum bert fyri at njóta náttúruna og fyri at styrkja seg til likams og sálar. Hetta skal ikki vera náttúruni, fenaði, fuglameingi, gróðri, gróti og øðrum til ampa.

## § 26. Óðalsjørð og landsjørð

(1) Óðalsjørð er ognarjørð, kortini so at tingið kann áseta reglur um støðd.
(2) Landsjørðin er fólksins ogn. Verður landsjørðin ella stórur partur av landsjørðini einskild, skal fólkið spyrjast við fólkaatkvøðu.

**Viðmerkingar:**

Føroyar hava frá gamlari tíð havt óðalsjørð og landsjørð, tað sum fyrr varð nevnt kongsjørð. Munurin er, at óðalsjørðin er einskild og kann arvast og seljast eins og onnur ogn; tað kann landsjørðin ikki. Fyri at jørðin ikki skal syndrast í alt ov smáar lutir, kann løgtingið áseta reglur fyri minstustødd av óðalseindum og um frámatrikulering. Landsjørðin kann eins og higartil verða latin sum festi ella til traðir, har tað verður kravt gjald ella leiga. Landsjørðin verður umsitin fíggjarliga og búskaparliga á besta hátt sum annað tilfeingi landsins. Landsjørðin kann eins og higartil í smáum verða latin til byggiøki og seld einstaklingum. Tekur løgtingið avgerð um at einskilja alla ella stórar partar av landsjørðini, er hetta at meta sum so álvarsligur spurningur, at hann eigur at fara til fólkaatkvøðu.

### § 27 Tilfeingi og umhvørvi

(1) Margfeldið á landi og á havleiðum landsins, undirgrundin, loftrúmið, vindur, væta, avfall og sjógvur, streymurin í sundunum og kring Føroyar og alt annað, sum einskild ikki eiga, og sum nytta í komandi tíðum kann fáast burturúr, er tilfeingi og ogn fólksins.

(2) Landið tryggjar, at tilfeingi fólksins verður umsitið á ein sjálvberandi hátt við umsorgan fyri umhvørvi okkara.

**Viðmerkingar**

Tilfeingi er ymist til ymiskar tíðir. Fyri at talan skal vera um tilfeingi, so má nytta kunna fáast burtur úr tí. Tað er tí lýst rættiliga breitt, hvat tilfeingi er, tí okkurt sum í dag ikki kann nýtast, kann koma at hava stóran týdning í framtíðini. Aðaltankin er, at alt tilfeingi grundleggjandi er ogn Føroya fólks og skal umsitast á besta hátt í løtuni og við atliti at komandi tíðum. Myndugleikarnir skulu við atliti at vistfrøðiligu heildini saman við atliti at bestu úrtøkumøguleikum skapa karmar at virka undir. Eisini skulu myndugleikarnir síggja til, at rættur til nýtslu av tilfeingi og vunnin tilfeingisrættindi aðrastaðni ikki gleppa Føroya fólki av hondum. Har tilfeingi er einskild ogn, eigur við lóg at verða skipað so fyri, at hetta tilfeingi verður nýtt á besta hátt og flest møguligum at gagni uttan kortini at gera seg inn á ognarrættin.

Eisini skulu myndugleikarnir síggja til, at rættur til nýtslu av tilfeingi og vunnin tilfeingisrættindi aðrastaðni ikki gleppa Føroya fólki av hondum. Har tilfeingi er einskild ogn, eigur við lóg at verða skipað so fyri, at hetta tilfeingi verður nýtt á besta hátt og flest møguligum at gagni uttan kortini at gera seg inn á ognarrættin.

## 10. FYRISITINGARLIG RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Fyrisitingarligu rættindini eru helst tey mest viðkomandi og mest nýttu rættindini í okkara tíð. Meðan tað almenna í eldri tíð setti forboð fyri slíkum, ið fólk ikki skuldu gera, og revsaði tey, sum brutu forboðini, so krevur tað almenna á

okkara døgum ofta, at fólk søkja um loyvi ella skulu hava góðkenning frá tí almenna, lata inn roknskap, sjálvuppgávu ella á annan hátt greiða frá ella rættvísgera atferð og ætlanir sínar. Tann fyrisitingarliga prosessin er tí tann mest viðkomandi fyri tey flestu, og tey grundleggjandi rættindini innan ta prosessina mugu tryggjast.

## §28. Alment innlit

(1) Øll eiga rætt til innlit í almenn viðurskifti.

(2) Innlit fevnir um egin viðurskifti, avgerðarmál og fyrisiting annars.

**Viðmerkingar**

Alment innlit, herundir innlit í nøvn, umstøður, lógarfatan og alt annað í almennum málum, verður hervið tryggjað. Undantøk frá innliti mugu sambært heimildini í grein fjørutiogfýra grundast í trygd ella vælferð. Dømi um hetta kann vera, at burturav persónlig viðurskifti ella atlit til landsins trygd kunnu, innan karmarnar á markregluni, verða undantikin.

## §29. Hoyring

(1) Tá ið almennur stovnur ella myndugleiki tekur avgerð, skal hvør, ið avgerðin viðkemur, hoyrast. Fer almennur stovnur ella myndugleiki undir tilgongd ella fyriskipan, skal bera til hjá áhugaðum at koma til orðanna við tilmælum sínum.

**Viðmerkingar**

Hoyring munnliga ella skrivliga er sjálvur kjarnin í rættinum hjá tí einstaka at gera sjónarmið síni galdandi og ávirka málsviðgerðina. Hvussu hoyringin skal skipast, er spurningur um, hvat best gagnar viðkomandi parti, og hvat ger avgreiðsluna av málinum so smidliga og ódýra sum gjørligt.

## §30. Umboðan

(1) Øll eiga rætt at lata onnur umboða seg í almennum málum.

(2) Hevur málið stóran týdning fyri tann einstaka, ella kann málið gerast fordømi, skal tað almenna rinda rímiligan kostnað.

## §31. Skipan

(1) Tingið skal skipa fyrisitingarlig rættindi og mannagongdir í tinglóg.

**Viðmerkingar**

Føroyar hava lógir um fyrisiting og innlit í fyrisiting, umframt eina røð av serligum ásetingum um fyrisiting í ymsum heimildarlógum. Ásetingin áleggur tinginum at varðveita slíkar reglur og dagføra tær samsvarandi stjórnarskipanini og teirri fatan av fyrisitingarligu rættindunum, sum tingið, rættirnir, umboðsmaðurin og aðrir stovnar alsamt menna.

Millum regluverk, ið eiga at koma í tinglóg í næstum, eftir at stjórnarskipanin

er samtykt, kunnu nevnast tinglóg um kærumál og alment innlit í dómar, kæruavgerðir og tilíkar autoritativar og prinsippiellar niðurstøður.

## 11. RÆTTARLIG RÆTTINDI

**Viðmerkingar**

Tey rættarligu rættindini hoyra til tey klassisku rættindini í rættarsamfelagnum. Áðrenn tann almenna vælferðarhugsjónin vann frama, vóru at kalla bara politisk og rættarlig rættindi á stjórnarstigi.

### §32. Ákæra

(1) Einans fúti ella landssakførari kunnu seta fram ákæru.

(2) Útinnandi ella fyrisitandi myndugleikar kunnu seta fram skuldsetingar, sum teir síðan leggja fyri rætta ákærumyndugleika.

(3) Eingin strong revsing kann krevjast, uttan at løgrættufólk hava góðkent, at ákæra verður reist.

(4) Eingin kann revsast uttan dóm.

(5) Eingin dómur kann sigast, uttan revsilóg var undan brotinum.

**Viðmerkingar**

Í fyrsta stykki verður ásett, at einans fúti ella landssakførari kunnu seta fram ákæru. Tó sæst av øðrum stykki, at aðrir útinnandi ella fyrisitandi myndugleikar – sum løgregla, sjóverja ella skattamyndugleikar – skulu kunna skuldseta, men málið má altíð fyri rætta ákærumyndugleikan.

Strong revsing er so víðgongt inntriv móti tí einstaka, at ikki einans dómur, men eisini ákæran í tí sambandi er sera tyngjandi fyri viðurskiftini hjá tí ákærda mótvegis samfelagnum. Tí ásetur triðja stykki, at leikfólk, løgrættufólk, eisini skulu góðkenna, um ákæra kann verða reist í málum, har strong revsing kann verða kravd. Hvat ið til eina og hvørja tíð skal verða mett sum strong revsing, verður tingið at gera av.

Fjórða stykki staðfestir gamla grundreglu, sum hevur verið kallað dómstólaprinsippið. Hon tryggjar borgarum í revsimálum at verða dømdir av dómstólum og ikki til dømis at verða revsaðir við dømandi lóg. Sí eisini viðmerkingarnar beint niðanfyri til fimta stykki.

Fimta stykki staðfestir grundregluna um løgræði á revsirættarøkinum. Ásetingin merkir, at lógin undan brotinum skal hava hildið júst viðkomandi brot vera revsivert, ið dømt verður um. Hugtakið lóg í fimta stykki má verða skilt smalt sum tinglóg. Vanliga er eingin annar myndugleiki enn tingið legitimeraður at áseta almennar reglur um revsing. Rættarsiðvenja kann tó grundað á tinglóg um revsing nærri skipa og tulka revsilóg.

At eingin kann verða dømdur uttan eftir lóg, er eyðkenni fyri samfelag grundað

á løgræði, har ein myndugleiki ásetur almennu reglurnar og annar myndugleiki dømir eftir teimum. At reglan, lógin, eisini er løgd framman undan brotinum, er enn meira grundleggjandi í rættarsamfelag, og serliga tá ið tað snýr seg um revsing. Eru reglurnar ikki samtyktar og kunngjørdar frammanundan, hava borgararnir ikki gjøgnum síni umboð verið við til at áseta tær og hava heldur onga vitan frammanundan um rættarstøðuna, og tá er ikki talan um løgræði, men heldur um politikk við lógini sum amboð. At lógin skal vera frammanundan brotinum, hevur uppruna í elligamlari rættvísisfatan, ið er at finna í teimum elstu modernaðu rættindayvirlýsingunum sum teimum upprunaligu amerikonsku og annars so tíðliga sum í landslógini hjá Magnusi Lagabøta í trettandu øld.

### §33. Løgrættufólk

(1) Løgrættufólk skulu døma í revsimálum.
(2) Í rættarmálum kunnu eisini vera fakdómarar.

**Viðmerkingar**

At verða dømdur er enn størri inntriv at tola enn at verða skuldsettur. Tí ásetur fyrra stykki, at løgrættufólk skulu døma í revsimálum. Eitt niðari mark verður tingið at seta, so løgrættufólk ikki noyðast at døma í revsimálum av lítlum týdningi, ið til dømis ikki kunnu hava fongsulsrevsing við sær.

### §34. Rættarmál

(1) Øll eiga rætt at vera umboðað í revsimálum ella øðrum málum, sum tað almenna reisir móti teimum.
(2) Hevur hin einstaki ikki ráð at gjalda málskostnað, skal landið gjalda rímiligan kostnað.
(3) Allir lógarspurningar kunnu skjótast inn fyri løgrættin.

**Viðmerkingar**

At øll eiga rætt til umboðan, bæði í revsimálum og øðrum málum, sum tað almenna reisir, verður tryggjað í fyrsta stykki. Annað stykki tryggjar í slíkum málum øllum, at tað almenna innan rímiligt mark skal gjalda kostnaðin.

Triðja stykki er staðfesting av grundregluni um, at tveir instansir skulu vera í øllum rættarmálum.

# Triði partur – Stýrisskipan

**Viðmerkingar**

Triði partur um stýrisskipanina inniheldur ásetingarnar um vøldini øll og viðurskiftini hjá teimum hvørjum mótvegis øðrum. Í øllum førum upprunaliga hevur parturin um stýrisskipanina verið hildin at vera mest týðandi í eini stjórnarskipan. Í tíðini stutt eftir, at fyrstu modernaðu stjórnarskipanirnar vórðu til, var heilt vanligt at halda stjórnarskipanina sjálva bara fevna um stýrisskipanina.

## 12. ALMENT

### §35. Stjórnarstovnar og vald

(1) Fólkið hevur alt alment vald í Føroyum og fremur tað gjøgnum stjórnarstovnar landsins.

(2) Stjórnarstovnar landsins verða eftir hesi skipan. Greiður skilnaður skal vera stjórnarstovnanna millum.

(3) Hvør stjórnarstovnur hevur vald ella stjórnarøki at røkja einsæris ella í felag við aðrar. Teir standa til svars fyri virksemi sítt, og valdið er altíð avmarkað.

**Viðmerkingar**

Fyrsta stykki sigur aftur frá, at føroyska stjórnarskipanin er grundað á fólkafullveldi, men at landið kortini ikki í praksis er beinleiðis fólkaræði, men heldur umboðsstýri. Hugtakið stovnur hevur í vanligari talu rættiliga ymiskan týdning. Tá ið stovnur verður nevndur í hesi stjórnarskipan, verður sipað til politiskan stovn. Ein politiskur stovnur er ein eind í politisku skipanini, sum verður mett at hava greiða funktión við atliti til at varðveita rættartrygd og fólkaræði. Í hesari skipan verður skilt ímillum tvey støði av stovnum, hægri og lægri stovnar. Í fyrsta stykki verður sagt, at fólkið fremur valdið ígjøgnum stjórnarstovnar landsins. Ein stjórnarstovnur er ein hægri stovnur, sum fólkið hevur sett á stovn við hesari skipan. Tí hava stjórnarstovnarnir hægri tign enn aðrir stovnar. Bestu dømini um stjórnarstovnar eru løgting, landsstýri og dómstólar. Lægri stovnar eru fyrisitingarstovnar, sum ikki beinleiðis eru settir á stovn við hesari stjórnarskipan. Teir lægru stovnarnir verða settir á stovn við tinglóg.

### §36. Val og skipan

(1) Stjórnarstovnar landsins skulu annaðhvørt vera undir tingvaldari ella beinleiðis valdari leiðslu undir tingsins eftirliti.

(2) Tingið kann skipa stovnar, nevndir og ráð í lóg.

**Viðmerkingar**

Henda grein greiðir alment frá um eina meginreglu í hesi skipan, at stjórnarstovnar landsins annaðhvørt kunnu verða valdir av fólkinum beinleiðis ella á tingi og undir tess eftirliti. Serligan týdning hevur tað fyri høg og tignarlig størv, at politisku myndugleikarnir hava rásarúm at meta um tørv á ymiskari fólkaræðisligari legitimering.

### §37. Rættindi og avmarkingar

(1) Stjórnarstovnar landsins og stovnar teirra skulu virða rættindi fólksins og tær avmarkingar í valdinum, sum gjørdar eru í hesi skipan.

**Viðmerkingar**

Eisini í partinum um stýrisskipanina verða myndugleikarnir mintir á, at fólkið hevur rættindi, sum skulu virðast, og at stýrið ikki er óavmarkað, men skal halda seg innan karmarnar, ið fólkið sum heimilari hevur ásett í stjórnarskipanini.

## 13. AVMARKINGAR

**Viðmerkingar**

Avmarkingarnar eru mørk fyri, hvat stjórnarstovnar og stovnar teirra kunnu gera, og hvussu teir kunnu fremja tað, ið innihaldsliga er loyvt teimum.

### §38. Valdsregla

(1) Allir stovnar skulu halda seg innan fyri vald sítt og heimildir.

(2) Nýtir stovnur óviðkomandi heimildir, ella vil hann røkka óheimilaðum málum, verður atgerðin at falla.

**Viðmerkingar**

Valdsreglan tekur saman um grundleggjandi fortreytirnar fyri politiskum eins væl og fyrisitingarligum valdi. Ein og hvør stovnur má hava vald og heimildir sambært stjórnarskipan, tinglóg ella siðvenju.

Eingin tinglóg kann tó leggja upp fyri øllum hugsandi framtíðarhendingum. Væl kent er, at lógstandardir bert kunnu fremjast við meting, ið bert óbeinleiðis er heimilað í lógini. Ásetingar um forsorg ella frádrátt eftir tørvi eru dømi um ásetingar, ið hvønn einasta dag føra við sær avgerðir, uttan at orðarøtt heimild er fyri júst hesum ella hasum. Avbjóðingin tá er at finna fram tey lógligu atlit og harvið tær ítøkiligu heimildir, ið best samsvara við tinglógina.

Seinna stykki tekur upp tey føri, har royndarstovnur heldur ávístu heimildina hjá stovni vera óviðkomandi, eitt nú uttan fyri lógligu metingina, brot á siðvenju ella óhepna nýggja venju. Á sama hátt sum tá ið endamálið við tulkingini ella avgerðini hjá stovninum er ólógligt, skal tá atgerð, hvørt tað so er lóg, kunngerð, avgerð ella annað, falla sum ógildug.

### §39. Heimildarregla

(1) Allar lógir, dómar, avgerðir og ásetingar hjá almennum stovnum og myndugleikum mugu vera í samsvari við andan í hesi lóg og hava uppruna í henni.

(2) Er ósamsvar millum lógir ella ógreiða, fellur lægri áseting fyri hægri og ógreiða fyri rættvísi og frælsi.

**Viðmerkingar**
Heimildarreglan tekur í aftur valdsregluna.

Fyrra stykki byggir á fatan av, at allar lógir, reglur, avgerðir og alment virksemi mugu hava heimild í hægri reglum. Reglur skipaðar í kunngerð mugu hava heimild í tinglóg, og tinglógin má liggja innan fyri heimildina í stjórnarskipanini. Avgerð má grundast á heimild í siðvenju, kunngerð, tinglóg ella aðrari keldu, sum viðkomandi royndarstovnar góðkenna at vera í samsvari við stjórnarskipanina.

Seinna stykki tekur saman um nakrar tulkingarreglur.

Ósamsvar millum lógir er, tá ið tvær reglur um tað sama stríða hvør móti aðrari. Tað kemur sera ofta fyri, at ósamsvar er millum heimildarlóg og mannagongdarlóg, yngri og eldri lóg serstaka og almenna lóg, ella hægri og lægri lóg.

Ógreiða er, tá ið tulkingarivi kemur í av ógreiðum orðingum ella óvæntaðum veruligum umstøðum, ið lógin ikki hevur havt fyri eyga.

Ásetingin í seinna stykki sigur, at tann hægra lógin skal vinna, um lógirnar eru á ymsum stigi. Stjórnarskipanin vinnur soleiðis á øllum øðrum lógkeldum, tinglógir vinna á eitt nú kunngerðarlógum, rundskrivum og sáttmálum, kunngerðir vinna á rundskrivum og lægri keldum; siðvenja kann taka seg upp á øllum stigum. Er annað ósamsvar ella onnur ógreiða, vinna rættvísi og frælsi. Hetta merkir, at tann loysn skal vinna, ið royndarstovnur metir best at samsvara við ta rættvísisfatan, sum samsvarar við stjórnarskipanina.

## §40. Markregla

(1) Eingin lóg, kunngerð ella avgerð, einki boð ella krav kann fara um mark.
(2) Ásetingar mugu vera skikkaðar at røkka máli sínum.

**Viðmerkingar**
Markreglan er sjálvstøðugt hugtak. Hon vísir, eins og aðrar grundreglur í hesi skipan, til føroyska fatan.

Fyrra stykki ásetur, at lógir eins væl og lægri almennar atgerðir mugu ikki fara um mark. Hetta merkir, at miðlarnir mugu standa mát við málið; tess meiri avgerðin tyngir borgaran, tess meiri týðandi má tað vera fyri tað almenna at nýta vald, broyta rættarstøðu ella tvinga á einhvønn hátt.

Seinna stykki setur krøv til ásetingarnar, at tær mugu vera skikkaðar at røkka máli sínum. Vísir miðilin seg at vera óhóskandi, skal reglan ikki fylgjast bert fyri bókstavin, men má heldur setast til viks.

### §41. Líkaregla

(1) Øll eru líka fyri lógini.
(2) Skal meting gerast, skal tað líka verða líka og tað ólíka verða ólíka viðfarið.

**Viðmerkingar**

Líkareglan staðfestir grundregluna um, at øll eru líka fyri lógini. At vera líka fyri lógini merkir, at hvør persónur skal fáa somu viðferð. Henda regla viðførir, at myndugleiki ikki kann geva borgara verri ella betri støðu, enn hann hevur givið øðrum borgara í júst somu støðu.

### §42. Tilfeingi

(1) Landsins stovnar varða um tilfeingi fólksins.
(2) Er ætlan at vinna úr tilfeingi, skal landið krevja gjøld ella tryggja øllum vinnurætt.

**Viðmerkingar**

Tilfeingi fólksins er tað, sum ikki er ogn ella sambært búrættindunum er rættindi hjá tí einstaka.

Fyrra stykki ger atlit til tilfeingi, sum í breiðari merking fevnir um umhvørvi, til lóglig atlit hjá øllum stovnum landsins og áleggur teimum skyldu at varða um tilfeingi og umhvørvi.

Seinna stykki skipar mannagongd, tá tilfeingið skal gagnnýtast. Landið skal antin lata øll søkja um loyvi, kvotu ella onnur slík rættindi á jøvnum føti ella krevja gjøld, ið falla til tað almenna.

## 14. LØGTING

**Viðmerkingar**

Løgtingið er elsti føroyski politiski stovnurin. Fólkið skipaði tingið í Føroyum eftir norrønum siði helst ikki langt eftir fyrsta norrøna landnám fyri meira enn tólv øldum síðani. Tingið er eftir føroyskari fatan framhald av tinghaldinum frá teirri fyrstu tíðini. Føroyska stjórnarskipanin hevur tí uppruna í, at fólkið tók undir og framhaldandi tekur undir við tingsins ræði. Stýrisskipan okkara byggir tí ikki á ávísa útlendska fyrimynd, hvørki ástøðiliga ella ítøkiliga, uttan heldur á fornar siðvenjur.

### §43. Heimildir

(1) Á tingi fær fólkið rødd og tekur støðu sína.
(2) Tingið hevur lóggávuvald og fíggjarvald og lut í eftirlitsvaldi og uttanríkisvaldi.
(3) Umframt løgtingsmenn kunnu landsstýrismenn leggja uppskot fyri tingið.

**Viðmerkingar**

Ting er almenna orðið fyri ta samkomu, ið hevur almennan myndugleika eftir norrønari fatan. Eins og áður skulu tey mest týðandi málini viðgerast á tingi.

Á tingi virka umboðini, løgtingsmenn, sum umboð og rødd hjá fólkinum. Í uppruna var tingið ting, har allir frælsir menn kundu koma saman at taka avgerð. Hóast tingið ikki longur er alting, men heldur umboðsstovnur, ber kortini aftur til í okkara tíð hjá øllum at taka beinleiðis støðu í málum, og hesum er lagt upp fyri í reglunum um fólkaatkvøðu. Men í førum, tá ið fólkið ikki sjálvt tekur støðu, er tað á tingi, at landið tekur støðu í týðandi málum.

Tingið eigur sum fremsti fólkaræðiligi stjórnarstovnur landsins lut í fleiri valdstættum.

## §44. Stevna

(1) Tingið kann lóggeva til tess
at uppfylla og skipa hesa stjórnarskipan,
at skipa og tryggja búskapin,
at tryggja og veita lóg og landaskil,
at veita og virða vælferð og trygd,
at virða og fremja fólksins rættindi og landsins áhugamál.

(2) Tingið kann ikki geva lógir, sum av røttum eru dómar ella avgerðir, ella sum ikki eru í samljóði við fólksins rættindi.

**Viðmerkingar**

Stjórnarskipanin byggir á ta fatan, at fólkið við at taka undir við skipanini letur tinginum vald at samtykkja lógir. Ásetingin reksur úttømandi upp tær heimildir, sum tingið fær. Heimildirnar eru víðfevndar, og virði teirra er, at tann, ið setur fram uppskot um tinglóg skal vísa, hvørja heimild tingið brúkar ítøkiliga. Orðaskiftið kemur so at vísa, um tingmenn, fólkið og at enda royndarstovnarnir halda heimildina vera í lagi.

## §45. Lóggávumannagongd

(1) Uppskot kunnu leggjast fyri tingið alt valskeiðið.

(2) Eftir val falla øll framløgd uppskot burtur.

(3) Tingformaðurin beinir uppskot í nevnd eftir framløgu. Nevndirnar kunnu skipa almennar hoyringar og kanningar, ið neyðugar eru. Nevndirnar kunnu skjóta upp broytingar, ið virða upprunauppskotið.

(4) Uppskot skulu fyri tingið tríggjar ferðir. Eftir aðru viðgerð kunnu bert átøkar broytingar gerast.

(5) Er lóg samtykt, staðfestir og kunnger løgmaður hana.

(6) Tveir av trimum tingmonnum kunnu samtykkja, at lóg fær gildi við afturvirkni.

(7) Løgtingið kann veita landsstýrismonnum ella óheftum stovnum heimild at áseta almennar reglur í kunngerð.

**Viðmerkingar**

Hetta er ein av teimum fáu greinunum – sí serliga fyrsta stykki – sum beinanvegin verður ein munandi ábót av verandi skipan. Verandi skipan hevur ført við sær,

at góð tíð er at fyrireika lógaruppskot. Fyrisiting og løntir serfrøðingar smíða og fyrireika í áravís. Beint eftir ársskifti verður uppskotið við viðmerkingum sent til skrivliga hoyring við 14. daga freist, sum bara nøkur heilt fá feløg og stovnar veruliga megna, so verður tað viðgjørt á landsstýrisfundi, og so samgongufundi, har samgongutingmenn næstan hvørja einastu ferð kenna seg uttan stórvegis ávirkan. Framløgan á tingi er umleið 1. mars saman við øllum øðrum uppskotum, og so fær tingið umleið hálvan annan mánaða at viðgera uppskotini, sum samgongumeirilutin samtykkir, um ikki hann finnur sera góðar grundir fyri at atkvøða ímóti uppskotinum. Við hesi mannagongd, ið nú verður skotin upp, at uppskot kunnu leggjast fyri tingið alt valskeiðið, noyða vit fyrisitingina at arbeiða meira javnt og ikki bíða við at leggja uppskot fram fyrr enn í seinastu løtu við tí avleiðing, at tingmenn í roynd og veru verða uttan stórvegis ávirkan á lóggávuarbeiðið. Eisini til at betra um tingarbeiðið, eru ásetingar í triðja stykki um, at nevndirnar kunnu skipa almennar hoyringar og kanningar í sínum lóggávuarbeiði.

## §46. Val

(1) Tingið ásetur tingmannatal.
(2) Tingið ásetur valskipan.
(3) Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til tingið.
(4) Tingið ger sjálvt av, hvør av røttum er valdur.
(5) Tingið ger av, um tingmaður, ið er dømdur í minsta lagi fýra mánaða fongsul fyri brotsverk, eftir at hann varð valdur, eigur at sita á tingi.

**Viðmerkingar**

Tingið kann fyri næsta valskeiðið áseta, hvussu nógvir tingmenn veljast skulu.

Tingið skal gera valskipan, sum kann fevna bæði um økisumboðan og landsumboðan, og eisini samrenningar av báðum atlitum. Valskipanin er partur av valdsbýtinum í breiðari merking, tí valskipanin ræður fyri, um vit fáa størri ella smærri flokkar, miðstýrdar ella miðspjaddar flokkar og óheftar tingmenn ella tingmenn, ið eru trúgvir móti veljarum og flokki. Framtíðin fer at laga valskipanina, men tað er best í samsvari við stjórnarskipanina og ásetingar hennara um markreglu og ávirkan fólksins, at umskifti hvørki henda tíðum ella kennast ørkymlandi ella gera, at fólk ikki kenna seg nøktandi umboðað.

Ásetingin byggir í triðja og fjórða stykki á eldri grundreglur. Valbæri og valrættur fylgjast sum áður, og tingið hevur vald at døma um egna val sítt.

Fimta stykki ger kortini broyting í mun til galdandi rættarstøðu. Eftir verandi støðu ger tingið metingina, hvør er verdugur at sita á tingi. Nevndin heldur ikki slíka rættarstøðu samsvara væl við fólkaræðisligu hugsjónina aftan fyri uppskotið til hesa stjórnarskipan. Er fólkið heimilari og tingmenn einans fulltrúar,

er ikki rætt, at tingmenn skulu kunna gera av, at tann, ið er valdur av fólkinum, kortini ikki er nóg verdugur til at sita á tingi. Í ávísan mun liggur sama fatan undir heldur løgnu venjuni uttanlands, og her heima eisini, at politiska skipanin vil vraka tingmann sum ráðharra, hóast hann hevur fingið heilt góða undirtøku frá fólkinum. Nevndin heldur ikki, at henda fatanin ber, tí tað ber ikki til, at nakar annar enn fólkið sjálvt er dómari í virðisspurningum. Fyri at gera hetta greitt, tekur fimta stykki burtur heimildina hjá tinginum at vraka ein fólkavaldan løgmann. Tó kann hugsast, at veljarin, tá ið hann valdi, ikki fekk høvi til at taka atlit til møguligt brotsverk hjá valevni. At verja politisku skipanina móti slíkari støðu fær tingið sambært fimta stykki rætt til at taka sessin frá tingmanni, um hann er dømdur fyri brotsverk, men bert tá dómurin er sagdur, eftir at hann varð valdur. At tingið eftir fjórða stykki sjálvt ger av, hvør av røttum er valdur, broytir ikki, at tingið ikki kann seta seg yvir fólksins meting; fjórða stykki ásetir einans, at tingið ger av, hvør av røttum er valdur undir verandi lógum.

### §47. Valskeið

(1) Tingið skal veljast í fýra ár í senn.

(2) Eru tveir triðingar av øllum tingmonnum fyri, kann tingið samtykkja, at val skal vera í ótíð.

(3) Gamla tingið eigur sæti, til nýggja tingið er sett.

(4) Tingformaður setur tingið innan tvær vikur eftir val.

**Viðmerkingar**

Vanligt var fyrr, at kongsvaldið, umboðið fyri tað ófólkaræðisliga, arvaða valdið, hevði rætt at slíta tingið. Soleiðis var eisini eftir stýrisskipanini undan krígnum, eittnú í løgtingslógini frá 1923. Tiltikið er, at eftir henni skrivaði kongur (í roynd og veru stjórn hansara) út val eftir fólkaatkvøðuna í 1946. Eftir at heimastýrisskipanin kom í gildi, mistu danir og embætisvaldið rættin at skriva út val. Eftir hetta var soleiðis í Føroyum eins og í Noreg, har eisini langt stríð var mótvegis kongsveldinum um stjórnarvaldið, at valskeiðini lógu føst. Tó kundi tingið sjálvt skriva út val í Føroyum, men hetta kom ikki fyri fyrr enn í 1980.

Ein partur av misfatanini av valdsbýti og valdskákan í yngru stýrisskipanarlógina var, at rætturin hjá kongi at skriva út val var hildin vera partur av siðbundnari valdsbýtislæru, og vit fingu regluna um, at løgmaður skuldi kunna skriva út val; hetta hóast vit í fornari tíð høvdu ótaldar løgmenn, ið ikki kundu skriva út val, og hóast vit frá 1948 til 1994 høvdu løgmenn uttan hesa heimild, og hóast ríki sum USA og Noreg, ið hildu seg strangt til valdsbýtislærur, ikki høvdu hesa skipan.

Til tess at geva tinginum arbeiðsnáðir, til tess at noyða tingfólk at samstarva, til tess at styrkja tingið mótvegis løgmanni, landsstýri og embætisveldi, verður nú góða gamla skipanin við føstum valskeiði endurreist. Er eingin annar vegur,

verður tó loyvt tinginum sjálvum at skriva út val, men hetta skal vera við breiðari meiriluta enn tí samgongumeiriluta, ið vanliga stuðlar sitandi stjórn.

Seinnu tvey stykkini eru endurtikin úr eldri skipan, tó er tað fráfarandi tingformaðurin (ella hansara varamenn), ið hava umsorgan fyri, at næsta tingið verður sett.

(Í sambandi við viðgerðina av grein 47 er vorðið greitt, at tey flestu av teimum leiðandi politisku umboðunum høvdu aðra fatan. Eftir at 47 varð samtykt av nevndini í plenum, mælti meiriluti í tjóðskaparligu semjunevndini til heldur at staðfesta verandi støðu, har løgmaður kann skriva út val. Grundgevingin var, at grein 47, sum hon stendur, hevur óhepnar avleiðingar fyri valdsskákanina millum landsstýrið og tingið. Kortini er ásetingin varðveitt, tí at nevndin í plenum samtykti hana, áðrenn semjunevndin tók hana upp aftur til viðgerðar).

## §48. Tingstarv

(1) Tingmenn røkja sætið sum álitisstarv eftir sannføring síni.
(2) Samtykkir tingið samsýningar tingmanna ella landsstýrismanna, fær henda samtykt gildi eftir næsta val.
(3) Tingmenn mugu ikki vera í álitisstørvum, í ráðum og nevndum undir landinum ella sita sum dómarar.

**Viðmerkingar**
Fyrsta stykki staðfestir, at tingstarvið ikki er starvsetan við ávísari arbeiðstíð, men álitisstarv, har tinglimurin við veljarum sínum sum arbeiðsgevara skal umboða, tala søk og náa úrslitum teirra vegna. Tingmaður er tó ikki bundin av boðum ella áheitanum frá veljarum, men ræður yvir mandati sínum sjálvur, meðan hann situr.

Annað stykki ásetur, at tingsamsýningin verður ásett fyri komandi valskeið, so ikki teir, ið sjálvir samtykkja, skulu fáa ágóðan av hækking.

## §49. Tingformaður

(1) Tingið velur formann og næstformenn.
(2) Tingformaður situr alt valskeiðið, uttan so at fýra fimtingar av øllum tingmonnum krevja hann frá.

**Viðmerkingar**
Í seinna stykki er ásett, at tingformaðurin skal hava arbeiðsfrið og verða sitandi, uttan so at stórur meiriluti á tingi vil hava hann frá.

## §50. Tingseta

(1) Tingið verður sett á ólavsøku eftir gomlum siði.

### §51. Tingsins virki

(1) Tingið sjálvt ásetur tingskipan sína, og tingformaður skipar tingsins virki.
(2) Umframt tingmenn sjálvar kunnu bert løgmaður, landsstýrismenn og tignarlig umboð møta og taka orðið á tingi.
(3) Er uppskot lagt fyri tingið, skulu fleiri tingmenn vera møttir enn ikki, um samtykt skal verða. Eru fleiri fyri enn ímóti, er uppskot samtykt.
(4) Tá ið tingið hevur umrøtt mál, kann tað gera sínar niðurstøður í samtykt.

**Viðmerkingar**

Stjórnarskipanin setur sjálv nøkur mørk fyri tingarbeiðnum, men annars skal tingið samtykkja nærri reglur um tingarbeiðið.

Innan fyri væbanda á tingi kunnu bert tey valdu umboðini vera og taka orðið umframt tey, ið vald eru í landsstýri ella kunnu metast sum tignarlig umboð.

Triðja stykki lýsir almennu atkvøðuregluna, at meiriluti skal vera møttur (quorum er meiriluti av øllum valdum tingmonnum), og meiriluti av teimum møttu skal atkvøða fyri, skal mál á skrá gerast av, ella onnur støða takast. Aðrar ásetingar í stjórnarskipanini víkja tó frá almennu regluni. Eisini er reglan um umboðsval tingsins lýst.

Løgtingið hevur higartil havt tað haft um beinini, at tingið hevur kunnað umrøtt mál, hvørt tað so eru fyrispurningar, frágreiðingar ella annað, men hevur ikki kunnað staðfest nakran enda á orðaskiftinum. Tó at tingfólk tyktust samd um einhvørja niðurstøðu, bar teimum ikki til at seta orð á hana. Nú er staðfest, at tingið kann samtykkja niðurstøður, helst styttri orðingar samsvarandi uppskoti frá tingmonnum og eftir atkvøðugreiðslu.

### §52. Nevndir

(1) Tingið skipar seg í nevndir, og umboðini verða vald eftir lutfalli.
(2) Tingið skal í øllum førum velja rættarnevnd, fíggjarnevnd og uttanríkisnevnd.
(3) Nevndirnar skipa seg sjálvar.
(4) Nevndirnar kunnu fremja hoyringar og kanningar, lógarfyrireiking og annars viðgera øll mál á sínum øki.

**Viðmerkingar**

Tingsins ávirkan og semjusøkjan eru bygd á nevndararbeiðið. Fyrstu tvey stykkini staðfesta, at tingið skal hava nevndir, í øllum førum tær nevndu.

Triðja stykki setur mørk fyri innanhýsisskipan nevndanna. Loyvt verður nú nevndarformonnunum at skipa undirnevndir. Hesar kunnu verða settar at fyrireika ítøkilig lógaruppskot, at kanna mál, at viðgera bólkar av málum og taka sær køna hjálp.

### §53. Innlit

(1) Tingfundir eru almennir. Frítt er at endurgeva og varpa út tingfundir.

(2) Eisini nevndarfundir, hoyringar og aðrar viðgerðir eiga at vera til skjals og kunnu vera almenn.

(3) Bæði tingfundir og aðrar viðgerðir kunnu tó lokast, um tað er neyðugt.

### §54. Sømdir tingmanna

(1) Eingin má handtaka tingmann ella reisa ákæru uttan samtykki frá tinginum. Tó kann tingmaður takast á búri.

**Viðmerkingar**

Tingmenn skulu verjast móti ágangi frá útinnandi valdinum. Sjálvsagt kann tingmaður tó sjálvur samtykkja í handtøku ella ákæru. Ásetingin forðar bert øðrum myndugleikum enn tinginum sjálvum í at taka avgerð um slíkt, um tingmaður kennir seg ágingnan og tí mótmælir. At vera tikin á búri er at vera tikin í sambandi við brotsverkið. Er ivi í einstøkum føri, ger tingið av.

## 15. LANDSSTÝRI

### §55. Stjórnarstovnar

(1) Landsstýrið er ovasti stjórnarstovnur.

(2) Heimildir kunnu sambært lóg ella tingsamtykt ella fyriskipan løgmans latast einstøkum landsstýrismonnum ella óheftum stovnum.

### §56. Stjórnarstarv

(1) Stjórnarstovnarnir skulu fremja, halda og útinna hesa skipan og allar tinglógir.

**Viðmerkingar**

Henda grein er almenn áseting um, at útinnandi myndugleikarnir skulu halda hesa skipan og tinglógir. Verður henda skylda ikki hildin, kunnu stjórnarstovnarnir vænta átalu ella tiltøk frá eftirlitsmyndugleikunum.

### §57. Fyrisiting

(1) Á hvørjum málsøki skal vera fyrisiting skipað samsvarandi greiðari heimild.

**Viðmerkingar**

Henda grein, um at hvørt málsøki skal hava sína fyrisiting, sigur í veruleikanum nakað rættiliga sjálvsagt. Men henda fyrisiting skal vera skipað sambært greiðari heimild, ið merkir, at skipanin av fyrisitingini skal kunna førast aftur til vilja tingsins ella løgmans.

### §58. Skipan

(1) Í landsstýrinum sita løgmaður, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, ið er varaløgmaður, og aðrir landsstýrismenn.

(2) Løgtingið skipar løgmansval. Atkvøður minni enn helmingurin av øllum tingmonnum ímóti, er løgmaður valdur.
(3) Heldur tingið, at løgmaður skal fara frá, verður skipað fyri viðgerð og atkvøðugreiðslu. Atkvøður meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum fyri, tekur varaløgmaður við, til nýggjur løgmaður er valdur.
(4) Løgmaður tilnevnir landsstýrismenn.
(5) Løgmaður kann loysa landsstýrismann úr starvi. Atkvøður meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann úr starvi.

**Viðmerkingar**

Í hesi grein er ásett, at í stjórnini sita løgmaður, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, ið er varaløgmaður, og aðrir landsstýrismenn, ið løgmaður tilnevnir. Skipanin hevur stjórnarskipanina hjá Evropasamveldinum í uppskoti sum fyrimynd. Harumframt er ásett, at tingið velur løgmann og kann seta løgmann frá samsvarandi skipanini um tingræði, og at varaløgmaður situr sum løgmaður, til nýggjur løgmaður er valdur. Heimildirnar og fyritreytirnar hjá løgmanni at seta í starv landsstýrismenn og at loysa teir úr starvi eru somuleiðis ásettar í hesi grein.

## §59. Umskipan

(1) Løgmansembætið kann umskipast sambært tinglóg.
(2) Verður løgmansembætið umskipað, verður løgmaður nevndur forsætisráðharri og tingformaður nevndur løgmaður.
(3) Tá verður løgmaður fólkavaldur og samstundis evsta umboð landsins í mun til fremmandar ríkisleiðarar og eigur harumframt heimildirnar at leiða og samskipa tingsins virki, at staðfesta lógir og at seta og loysa úr starvi landsstýrismenn eftir áheitan frá forsætisráðharra.
(4) Í førum har meiri enn helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri, skal løgmaður loysa landsstýrismann úr starvi.

**Viðmerkingar**

Í hesi grein er ásett, at løgmansembætið kann umskipast sambært lóg, ið tingið samtykkir og løgmaður staðfestir. Sostatt hevur fólkið givið lóggávuvaldinum serliga heimild til at umskipa evstu stjórnarstørvini eftir givnari mannagongd. Í sambandi við umskipan verður høvuðsbroytingin, at Føroyar fáa ein fólkavaldan forseta undir heitinum løgmaður, ið ikki einans hevur heimildirnar hjá ríkisleiðara, men eisini fer at verða tingformaður við atkvøðurætti í tinginum. Í stjórnini verður løgmaður eftir hetta nevndur forsætisráðharri eftir heimildunum, ið eftir eru sum stjórnarleiðari.

## §60. Ábyrgd

(1) Nú metir tingið, at landsstýrismaður hevur ikki hildið skyldur sínar ella er farin út um heimildir sínar; tá kann tingið staðfesta ónøgd sína við ábreiðslu, samtykt ella við at ákæra fráfarnan landsstýrismann.

**Viðmerkingar**

Henda grein um ábyrgd landsstýrismanna gevur tinginum fleiri hættir á ymsum stigum at gera vart við ónøgd sína, heldur enn sum nú beinanvegin at taka til teir víðgongdastu miðlarnar. Tingið kann í hesum sambandi staðfesta sína ónøgd við ábreiðslu, samtykt ella við at ákæra landsstýrismann, sum annaðhvørt er frákoyrdur ella farin av øðrum orsøkum.

**§61. Málsøki**

(1) Løgmaður býtir tey málsøki millum landsstýrismenn, sum tingið ikki hevur býtt ella lagt til óheftar stovnar.

(2) Landsstýrismenn fáa tær heimildir, sum í siðvenju ella lóg eru lagdar til tey málsøki, teir hava fingið.

**Viðmerkingar**

Í fyrra stykki verður gjørt upp við verandi skipan og frælsi løgmans at býta málsøkini millum landsstýrismenn. Nú kemur tingið í hásætið, soleiðis at løgmaður einans hevur heimild at býta málsøki millum landsstýrismenn, um tingið ikki hevur tikið støðu um annað býti.

**§62. Samskipan**

(1) Løgmaður boðar regluliga til landsstýrisfundir.

(2) Landsstýrið tekur í felag støðu til lógir, samtyktir og fíggjarætlan, ið skulu leggjast fyri tingið.

**§63. Landssakførari**

(1) Løgmaður leggur uppskot um landssakførara fyri tingið at góðkenna, áðrenn hann tilnevnir hann.

(2) Landssakførarin tekur sær av rættarmálum landsins og veitir landsins stovnum ráð.

**Viðmerkingar**

Henda grein heimilar skipan, ið finst í øðrum londum enn teimum norðurlendsku, og hevur við sær, at løgtingið góðkennir, at landið stovnar sakførara-embæti at taka sær av revsirættarmálum og møguliga eisini sivilu rættarmálum landsins, umframt at vera ráðgevi hjá landsins stovnum. Verður slík skipan sett á stovn, fer hon at yvirtaka uppgávurnar hjá verandi fútaembæti, umframt helst eisini at hava breiðari virkisøki.

# 16. DÓMSTÓLAR

Frá uppruna var partur av tingstarvinum at rætta lóg, at døma í trætumálum og rætta ella mýkja lógina eftir teimum veruligu umstøðunum. Merki síggjast í helluni á Tinganesi eftir teimum støðum, har ymsu løgrætturnar sótu.

Við ásetingum í kapitlinum um dómstólar gerst rættarskipanin aftur týðandi

partur av stjórnarskipan Føroya. Men nú verður dómsvaldinum tryggjað óhefti frá politisku skipanini í einstøku rættarmálunum.

Í samveldisstøðu eru eyðvitað oftast samveldisdómstólar. Nú stjórnarskipanin verður til, eru dómsmál felagsmál Danmarkar og Føroya millum, men staðfest er, at føroyingar kunnu stovna egnar dómstólar á sorinskrivarastigi og kærustigi. Tessvegna er frá byrjan eingin andsøgn millum stjórnarskipanina og støðu okkara mótvegis Danmark. Hægstirættur verður at byrja við framhaldandi felagsmál, men eins og í Íslandi á sinni og í grannalandinum Skotlandi í revsimálum, so er bert spurningur um at avtala, hvørt vit skulu hava egnan hægsta dómstól. Men Føroyar eru longu í verandi støðu bundnar at rættinum í Strassborg sum hægstarætti innan mannarættindi, og fara vit uppí ES, verður ES-rætturin í Luxemburg hægstirættur í samveldismálum ES viðvíkjandi, eins og støðan er hjá Danmark, samsvarandi EFTA-rætturin í Luxemburg, ganga vit í EFTA-samveldið eins og Ísland og Noreg.

Skal stjórnarskipanin fáa fullan týdning sum fremsta lóg Føroya og tryggja rættindi føroyinga, er avgjørt neyðugt at fara undir at stovna føroyskan løgrætt, ið skal vera kærurættur fyri sorinskrivaradómar. Føroya rættur er longu nógv merktur av føroyskum starvsfólki, tessvegna verður helst lættari at stovna føroyskan rætt ella rættir á lægri stigi. Men løgrættin er neyðugt at manna við fremstu løgfrøðingum, ið mugu fáa rúma tíð at fyrireka seg, kunna seg við venju í næstu løgfrøðiligu grannalondunum Danmark, Noregi og Íslandi, umframt hinum Norðanlondunum Finlandi, Álandi og øðrum sambærligum londum sum Skotlandi, Man, Onglandi og øðrum enskmæltum londum umframt nevndu samveldisdómstólum.

Stjórnarskipanin verður ikki nýtt og mýkt til fulnar, fara vit ikki innan stutta tíð undir at stovna føroyskar dómstólar.

### §64. Dómsvald

(1) Dómstólarnir í Føroyum eru løgrætturin og teir lægru rættir, ið skipaðir verða, umframt millumtjóða rættir, sum landið viðurkennir. Aðrar dómstólar kann løgtingið ikki áseta, men bert skipa framferðina hjá nevndu stovnum.
(2) Løgmaður leggur uppskot um dómarar fyri tingið at góðkenna eftir hoyring, áðrenn hann tilnevnir teir. Dómstólarnir skipa seg sjálvir við dómaraforseta.
(3) Dómstólarnir royna øll mál um revsing, trætur millum manna og fyrisitingarmál. Tingið kann tó lata fyrisitingarligar dómstólar taka sær av trætum og fyrisitingarmálum. Hesi mál kunnu síðan altíð leggjast fyri vanligu dómstólarnar.
(4) Dómstólarnir skulu døma eftir lógini, rætta lógina og gera lóg á, har eingin lóg er.
(5) Dómstólarnir skulu royna allar lógir, kunngerðir, avgerðir og aðra almenna framferð og tryggja, at henda skipan verður hildin.
(6) Er dómstólur varur við skeiva framferð, kann hann velja betri tulking uttan afturvirkni.

(7) Er dómstólur varur við eldri lóg, ið stríða kann móti andanum í stjórnarskipanini, kann hann velja at senda tinginum hana at viðgera av nýggjum.

**Viðmerkingar**

Ásetingin staðfestir, at bert ein dómstólur skal vera tann ovasti í Føroyum. Aðrir stovnar kunnu tó sambært samveldisstøðu hava vald omanfyri tann ovasta føroyska dómstólin.

Stjórnarskipanin byggir á, at rættirnir eru partur av valdsbýtinum og valdsskákanini. Eftir hesi áseting skal vera ein skipan á tveimum stigum. Teir lægru rættirnir upplýsa málini og siga dóm um allar spurningar. Løgrætturin skal samskipa venjuna, royna lógarfatanina og mannagongdir og rætta lógina sum lýst aðrastaðni í stjórnarskipanini.

Dómsvald er valdið at døma um bæði stjórnarskipan, tinglóg, siðvenju og øll onnur viðurskifti, ið hava at gera við rættindi og skyldur.

Fyrsta stykki staðfestir, at bert ein rættur skal vera ovastur í Føroyum. Hesin skal eita løgrættur. Gamla heitið var ***løgrætta***, kvennkynsorð, ið sipar til, at tey rætta lógina, loysa ivamál, mótsagnir, kanna eftir um alt er farið rætt fram í lægri dómi, og meta um tinglógir samsvara við stjórnarskipan landsins.

Síðani viðurkennir ásetingin, at dómstólar mugu vera í hvørji samveldisskipan. Eisini eftir at settir eru á stovn føroyskir rættir samsvarandi avtaluni um, at stovnast kunnu føroyskir rættir upp til kærustig, verður hægstirættur felags við Danmark og Grønland. Hvussu hann skal skipast, og hvørjar heimildir hansara skulu vera í ávíkavist sermálum og felagsmálum er spurningur um samveldisavtalu og –lóg, sí til dømis niðanfyri nevndu landbúnaðarmál, har innihaldsligi førleiki hægstarættar er avmarkaður.

Lægri rættir kunnu skipast, og til ber at skipa landið í fleiri løgdømi við sorinskrivara ella fleiri í hvørjum. Hugsast kann, at sýslurnar fáa hvør sítt dómhús, ella at javnstørri øki eftir fólkatali verða skipaði, til dømis Suðurstreymoy fyri seg, Norðoyggjar og Eysturoy fyri seg, Norðstreymoy, Vágar, Sandoy og Suðuroy fyri seg – við atliti til kommunur. Til ber at hava fleiri dómhús í hvørjum løgdømi og at lata mál ímóti landinum upp á skift falla til tey ymsu løgdøminí. At skipa landið sundur í løgdømi fer bæði at gera rættarskipanina atkomiligari, men eisini at tryggja, at lógarspurningar verða viðgjørdir í ymsum høpi og við ymsari loysn, áðrenn løgrætturin ger teir endaliga av. Til ber eisini at skipa rættir til bólkar av málum, at skilja ímillum brotsmál, almenn mál og borgarlig mál, ella onnur serstøk mál sum arbeiðstrætur, jarðarmál, ið sum er verða viðgjørd í serligu rættarskipanini nevnd landbúnaðarstevnur, hvørs kærurættur er skipaður beint undir felags hægstarætti okkara, ið bert dømir um lógarspurningarnar.

Løgtingið fær heimild at skipa framferð og mannagongdir hjá hesum stovnum, eisini at gera av, hvørjir teir lægru rættirnir skulu vera, men ikki ber til at stovna aðrar dómstólar til serlig høvi at døma í einstøkum málum ella í bólki av málum leyst av vanligum høpi og skipan.

Annað stykki greiðir frá, hvussu dómarar verða settir. Løgmaður eigur rætt at skjóta upp dómarar. Tingið skal síðani skipa hoyring, har tingið kannar, hvørji atlit eru tikin til fakligan førleika, at talan er um virðilig evni, umframt hvørja fatan dómaraevnini hava av stjórnarskipan, valdsbýti og rættindum fólksins. Tingið skal góðkenna dómarar, áðrenn teir verða tilnevndir. Teir dómstólar, løgrættur og aðrir rættir, ið verða mannaðir við fleiri limum, skulu skipa seg sjálvar við forseta.

Triðja stykki lýsir teir tríggjar høvuðstættirnar í dómsmálum. Revsimál eru mál um brot móti tinglógum. Trætumál eru mál um trætur millum borgarar innanhýsis, grundað á lógir, siðvenju, avtalur ella annað grundarlag. Fyrisitingarmál eru mál millum myndugleikar og borgarar. Stjórnarskipanin leggur upp til, at hesi verða skipaði øðrvísi og betur enn higartil sum ein høvuðstáttur fyri seg heldur enn sum partur av borgarligum trætumálum og sum kærumál í stjórnarráðum ella kærunevndum.

Fjórða stykki staðfestir, hvussu dómstólar arbeiða. Er tinglóg samtykt ella onnur lóg sambært henni í kunngerð, skrivi ella siðvenju, eiga rættirnir at døma eftir hesi lóg. Men eru mótsigandi lógir, tulkingarivar, mótstríð við stjórnarskipan ella samveldislóg, mugu rættirnir rætta lógina, so ivin verður greiddur.

Nú er í summum førum als eingin lóg, tí tingið var ikki varugt við spurningin, ella tí als ikki er lóggivið, ella tí talan er um rættindi borgaranna innanhýsis ella um so stóran tulkingariva, at neyðugt er at fylla út rættartóma rúmd heldur enn bert at tulka lóg ella fordømi. Tá mugu rættirnir gera lóg so almenna, men kortini so avmarkaða sum til ber. Tingið kann tá taka sær um reiggj og geva aðra lóg ella lóggeva nærri samvarandi dómi. Tá ið rættur leggur afturat stjórnarskipanini, má tingið virða dómin eins og stjórnarskipanina.

Fimta stykki staðfestir, at Føroyar hava víða dómaroynd. Til ber at leggja fyri dómstólar allar spurningar um, hvørt lógir, kunngerðir, avgerðir ella onnur framferð samsvarar við stjórnarskipanina. Hugsast kann, at tingið stevnir stjórnini, ella áhugabólkar stevna landinum, ella at onnur áhugaði innan karmar í venju dómstólanna leggja fyri rættirnar spurningar um samvar við stjórnarskipan.

Sætta stykki vísir dómstólum á, at verða teir varugir við, at skeivt er atborið, til dømis at alment gjald ikki er heimilað, ella at skattskylda er tulkað ov vítt, kann rætturin staðfesta røttu tulkingina í hesum og øllum framtíðar málum, og harvið ikki ávikast av, at krøv um endurrindan kunnu gerast landinum ov dýr.

Slík framferð og aðrar kunnu lagaliga rætta lógina heldur enn at velja annaðhvørt at seta fullkomiliga til viks fleiri ára óhepna venju ella at staðfesta hana hóast týðilig lýti.

Sjeynda stykki er á sama hátt sum sætta áseting um, hvussu dómstólar kunnu rætta lógina. Heldur enn at seta tinglóg til viks, ógilda ella stórliga nýtulka hana, kann rættur geva tinginum freist at viðgera lógina av nýggjum. Slík framferð er góð og neyðug, serliga í førum, har eldri lóg er galdandi; lóg givin undan fólkaræðinum, lóg samtykt á danatingi undan yvirtøku, lóg samtykt á løgtingi undan heimastýrisskipanini, eins og lóg samtykt undan stjórnarskipanini kann eyðvitað ikki hava tikið atlit til stjórnarskipanina ella atlit hennara. Men eisini lóg eftir stjórnarskipanina kann vera samtykt, uttan at fyrilit til fulnar eru tikin fyri stýrisskipan landsins ella rættindum fólksins. Tá skal rætturin kunna staðfesta ósamsvar, steðga útinnan hennara mótvegis kærandi borgara og lata tingið fáa høvi at áseta almennu rættarstøðuna.

# 17. FÍGGJARVALD

**Viðmerkingar**

Fíggjarvaldið er valdið at krevja inn skatt, játta útreiðslur og annars ráða og skipa fíggjarstøðu og búskaparmál landsins.
Fíggjarvald er helst politiskt mest týðandi parturin av valdinum, tí fíggjarvaldið fevnir um tær raðfestingar, umfordeilingar og byrðar, ið tey fólkavaldu velja framum aðrar.

Fíggjarvaldið fevnir um skatt og aðrar inntøkur, fíggjarætlan og aðrar útreiðslur, umframt teir stovnar og tær mannagongdir, ið skipa og tryggja skulu landsins fíggjar- og búskaparviðurskifti.

## §65. Skattur

(1) Eingin skattur skal líknast á uttan við lóg. Kommunur kunnu tó líkna skatt á við heimild í lóg.
(2) Skattur kann ikki líknast á við afturvirkni.

**Viðmerkingar**

Ásetingin staðfestir tvær elligamlar grundreglur, at skattur skal líknast á við lóg, og at skattur ikki skal líknast á við virkni longri aftur enn tann dagin, tá ið uppskotið um skattin ella skattingarregluna varð lagt fram.

## §66. Fíggjarætlan

(1) Landsins stovnar kunnu ikki gjalda útreiðslur uttan heimild í landsins fíggjarætlan, dómi ella aðrari fíggjarheimild.
(2) Fram til apríl kunnu útreiðslur gjaldast eftir farnu fíggjarætlanini.
(3) Óheftir stovnar nýtast ikki at vera við á fíggjarætlan landsins.
(4) Heimildarlógir og almennir sáttmálar kunnu treyta, at fíggjarkrøv krevja játtan.

**Viðmerkingar**
Ásetingin skipar fíggjarætlan landsins, ið ikki longur skal eita fíggjarlóg. Fyrsta stykki staðfestir verandi rættarstøðu, at landsins útreiðslur skulu hava heimild í fíggjar-ætlanini, dómi ella aðrari javnlíkari fíggjarheimild.

Annað stykki endurtekur galdandi skipan.

Triðja stykki staðfestir, at óheftir stovnar, sum kortini eru almennir, røkja almennar uppgávur ella á annan hátt eru alment viðurkendir ella heimilaðir, ikki nýtast at vera á fíggjarætlanini. Í hesum liggur eisini, at óheftir stovnar kunnu vera á fíggjarætlanini eftir avmarkaðari skipan, eitt nú einans við eini nettojáttan.

Fjórða stykki ásetur, at heimildarlógir og almennir sáttmálar kunnu áseta, at útgoldið verður einans sambært játtan. Hetta merkir, at tingið til dømis í heimildarlóg kann skipa ein studning til bjálving og í lógini áseta treytir og skipan í sambandi við hendan stuðul. Hvussu nógv útgoldið verður, nýtist tó ikki at standa í heimildarlógini, men fylgir av, hvussu nógv tingið játtar á hvørjum ári.

## §67. Játtanarskipan

(1) Almenn játtanarskipan skal samtykkjast sum lóg.

**Viðmerkingar**
Eins og rættarskipanin og útinnandi fyrisitingin hava sínar lógir um skipan og mannagongdir, skal eisini tann fíggjarligi tátturin av virkinum hjá almennum stovnum skipast nærri í eini tinglóg. Henda tinglóg skal loysa av rundskriv og vegleiðingar, ið higartil hava verið. Lógin skal greitt siga, hvussu landsins fíggjarfyrisiting skal virka.

## §68. Mannagongd

(1) Landsstýrið leggur fyri mikkjalsmessu fram uppskot um fíggjarætlan landsins fyri komandi ár.
(2) Er fíggjarætlanin ikki samtykt fyri ársskiftið, skal landsstýrið leggja fram uppskot um fyribilsjáttan.
(3) Fíggjarætlanin skal hava tríggjar viðgerðir umframt nevndarviðgerð.
(4) Tingið tekur ímóti serligum umbønum frá dómstólunum og óheftum stovnum.

**Viðmerkingar**
Fyrsta stykki ásetur, at uppskot til fíggjarætlan skal verða lagt fyri tingið tveir mánaðir eftir, at tingið verður sett á ólavsøku. Hetta skal tryggja, at nóg góðar stundir verða at viðgera uppskotið til fulnar.

Annað stykki tryggjar, at ósemju um fíggjarætlanina ikki viðførir óbótaligan steðg í virksemi landsins. Uppskot um fyribilsjáttan skal leggja upp fyri lógar-

bundnum útreiðslum og annars at lønir og aðrar fastar áhaldandi og vissar útreiðslur kunnu halda fram.

Triðja stykki er um viðgerðina á løgtingi, ið skal tryggja nágreiniliga og nøktandi gjøgnumgongd av uppskotinum við høvi at eftirhyggja metingar og fortreytir, seta fram broytingaruppskot og finna semjur.

Fjórða stykki tryggjar, at óheftir stovnar fáa beinleiðis lagt umbønir um fíggjartørv fyri tingið, til tess at valdsbýtið harvið verður tryggjað og óhefti stovnanna ikki verður ávirkað av raðfestingum hjá ella ábendingum frá stjórnarráðunum. Óneyðugur ivi um óhefti stovnanna verður harvið beindur burtur og forðaður.

## §69. Eykajáttan

(1) Tingið kann veita landsstýrinum ella øðrum stovnum eykajáttan.
(2) Hevur mál skund og er peningaliga lítið týðandi, kann fíggjarnevndin veita eykajáttan.

**Viðmerkingar**

Eykajáttan krevst á hvørjum ári, tí tann árliga fíggjarætlanin kann ikki forútsíggja allar útreiðslur og inntøkur. Fyrra stykki staðfestir verandi sið, meðan seinna stykki ásetur, at mál, ið hava skund og peningaliga eru lítið týðandi, kunnu avgreiðast í fíggjarnevndini. Ting- og játtanarskipanirnar skipa hetta nærri.

## §70. Roknskapir

(1) Landsstýrið og allir óheftir stovnar leggja innan seks mánaðir eftir fíggjarárslok roknskapir sínar til góðkenningar á tingi.

**Viðmerkingar**

Landsins stovnar skulu virka samsvarandi ásetingunum um játtanarskipan og teimum venjum, ið koma í lag í grannskoðan og dómaroynd. Tingið skal góðkenna roknskapirnar og kann við viðmerkingum sínum gera av teir spurningar, ið taka seg upp í grannskoðan um fíggjarætlan, lóg og játtanarskipan.

## §71. Grannskoðan

(1) Tingið velur nakrar løgtingsmenn at vera løgtingsgrannskoðarar.
(2) Tingið velur eisini landsgrannskoðara at kanna og ummæla allar almennar roknskapir.

**Viðmerkingar**

Ásetingin staðfestir verandi skipan við grannskoðan, partvíst tingmenn og partvíst uttantingsmaður, ið skulu grannskoða almennar roknskapir. Ásetingin hevur neyvt samband við § 67 um játtanarskipan og § 70 um roknskapir.

### §72. Landsbanki

(1) Landsbankin skal umsita fæ landsins og tey fíggjar- og búskaparmál, sum ikki eru løgd landsstýrinum at umsita.

(2) Eftir uppskoti frá løgmanni velur løgtingið triðjahvørt ár tríggjar nevndarlimir bankans at sita í seks ár. Nevndin velur stjórn bankans.

**Viðmerkingar**

Ásetingin staðfestir týdning og uppgávur landsbankans. Landsbankin verður sera óheftur stovnur við egnari leiðslu, ið tingið skal góðkenna.

Fyrra stykki lýsir bankans uppgávur at umsita slík búskaparmál, ið tingið velur at leggja til bankans heldur enn landsstýrisins fyrisiting. Í flestu londum er miðbanki, ið hevur til uppgávu at tryggja gjaldoyra, rentustøðu, kredittvirði, fíggjareftirlit, ávís hagtøl og aðrar tættir av fíggjarmálum, ið krevja serligt óhefti og álit, ikki minst mótvegis fíggjarmarknaði og útlondum.

Seinna stykki tryggjar óhefti bankans, við at ovasta leiðslan verður vald í longri umskarandi tíðarskeið. Á henda hátt er tað altíð politiski viljin, ið ræður fyri almenna politikki bankans, eisini búskapargrunninum viðvíkjandi, men nevndarvalið tryggjar seinking og frástøðu, so at politiska valdið sjálvbindur seg til ikki at taka stuttsiktaðar avgerðir og á tann hátt vissar tjóðina, fíggjarmarknað og útheimin um langsiktaða og miðvísa fíggjarpolitikk landsins.

### §73. Búskapargrunnur

(1) Landsbankin skal umsita búskapargrunn.

(2) Metir landsbankin tað ráðiligt, kann grunnurin lata av vinninginum í landskassan ella at býta millum íbúgvar landsins.

**Viðmerkingar**

Búskapargrunnurin skal vera eitt amboð at varðveita fíggjarfæ landsins. Tann óhefti landsbankin umsitur grunnin. Sitandi landsstýri og ting eru ikki kravd at seta nakrar inntøkur hjá landinum í grunnin. Tað stendur teimum frítt at játta pengar í grunnin. Men er fæ lagt í grunnin, ræður landsbankin fyri, nær tað verður latið úr aftur. Landsbankin kann tá velja antin at lata pengarnar fara í landskassan um árligu fíggjarætlanina ella býta avkastið javnt millum íbúgvarnar í landinum. Ósemja er um, hvør av hesum háttum er tann frægari. Framtíðin fer at ráða yvir hesum, tað veldst um, hvønn løgmaður skjýtur upp, og hvønn tingið góðtekur sum lim í stýrinum.

## 18. EFTIRLITSVALD

**Viðmerkingar**

Í fólkaræðissamfelag er eftirlitsvaldið av stórum týdningi. Mong sløg av eftirlitum eru, bæði eftirlit hjá dómstólum við tingi og fyrisiting, eftirlit hjá tingi við fyrisiting og eftirlit hjá umboðsmanni við fyrisiting.

**§74. Eftirlitsvald**

(1) Dómstólarnir ansa eftir, at henda skipan og lógir og mannagongdir verða hildnar. Tingið ansar eftir, at landsstýrið og fyrisitingin virka sambært lóg.

**Viðmerkingar**

Henda grein ásetur í fyrra liði, at dómstólarnir hava eftirlit við og royna, um lógir og henda stjórnarskipan eru hildnar. Hervið er beinleiðis støða tikin til ofta umstrídda spurningin, um stjórnarskipanin skal kunna roynast sum lóg fyri dómstólunum; tann spurningur er her svar-aður játtandi.

Í øðrum liði er ásett, at løgtingið skal hava eftirlit við, um landsstýri og fyrisiting virka í samsvari við lógina. Hetta er at meta sum almenn áseting um eftirlit, sum verður gjørt meira ítøkiligt í næstu greinunum.

**§75. Fyrispurningar**

(1) Tingmenn og tingnevndir kunnu hvør í sínum lagi spyrja landsstýrismenn, tingformann og óheftar stovnar um embætisførslu teirra.

(2) Fyrispurningar kunnu setast og svarast munnliga ella skrivliga og verða svaraðir innan hóskiliga tíð.

**Viðmerkingar**

Henda grein tekur í mestan mun í aftur verandi mannagongdir í sambandi við eftirlit tingsins við landsstýrinum. Tó er talan um víðkan, har tingmenn og tingnevndir nú eisini kunnu spyrja tingformann og óheftar stovnar um embætisførslu teirra.

**§76. Nevndareftirlit**

(1) Tingnevndirnar kunnu skipa hoyringar.

(2) Tingnevndirnar kunnu skriva frágreiðingar um kanningar sínar.

**Viðmerkingar**

Í fyrra stykki verður eggjað til víðar eftirlitsuppgávur, so nevndirnar eisini kunnu skipa hoyringar í sambandi við kanningar, og í seinna stykki verður staðfest, at tingnevndirnar kunnu skriva frágreiðingar um kanningar sínar. Hesi bæði stykkini eru á ein hátt ikki neyðug, tí sjálvsagt er, at tingið og tess nevndir kunnu gera alt, sum stjórnarskipanin ikki forðar. Men kortini hevur løgtingið so mikið ringt við at venja seg við relativa alvald sítt, at onkuntíð er neyðugt at siga tað sjálvsagda til tess at geva tingmonnum arbeiðsdirvi.

**§77. Fólksins umboðsmaður**

(1) Tingið velur fólksins umboðsmann.

(2) Umboðsmaðurin kannar fyrisiting, avgerðir og dómar hjá landsins myndugleikum. Umboðsmaðurin kann ummæla og gera tilmæli, men kann ikki taka ella broyta avgerðir.

**Viðmerkingar**

Sum nú skal tingið velja umboðsmann at hava eftirlit við landsins myndugleikum. Umboðsmaðurin verður í hesi skipan nevndur fólksins umboðsmaður heldur enn løgtingsins umboðsmaður. Hetta er avleiðing av, at umboðsmaðurin í mestan mun hevur verið og er ætlaður at vera verji hjá meiniga manninum, og at tað heldur ongantíð hevur verið nakar veruleiki í teirri fatan, at umboðsmaðurin umboðar tingið.

Sambært øðrum stykki skal fólksins umboðsmaður ikki einans kanna fyrisitingina og hennara avgerðir, men eisini dómstólarnar og teirra avgerðir. Fleiri vilja halda, at tað ikki ber til, at umboðsmaðurin skal hava eftirlit við dómstólunum. Slík fatan er rættiliga avdúkandi og ber boð um, at tey flestu í veruleikanum fata umboðsmannin sum okkurt slag av faktiskum dómstóli, sum myndugleikar í veruleikanum ikki hava annan møguleika enn at akta; júst haðani stavar mótviljin móti eftirliti við dómstólunum. Hóast lítil veruleiki er í at siga, at danski ella føroyski umboðsmaðurin bara ummæla og gera tilmæli og ikki taka avgerðir, so verður hetta alment fyrigyklað.

Umboðsmaðurin er einstakur persónur at mynda stovn sín og virkar ikki eftir vanligum rættartrygdarstandardum sum dómstólarnir, eitt nú munnligari og beinleiðis próvførslu fyri myndugleikanum. Tí er tað eisini av álvara rættartrygdartrupulleiki, at umboðsmaðurin virkar sum de facto dómstólur.

Ásetingin í seinna stykki ger tað greitt, at umboðsmaðurin skal virka sambært upprunaligu ætlanini og skal vera við til at hava eftirlit við myndugleikum og við sínum fakliga autoriteti virka mennandi við tilmælum. Men hesum tilmælum skulu stovnarnir tó í veruleikanum kunna velja ikki at akta, júst tí talan ikki er um avgerðarmyndugleika. At dómstólarnir eru fevndir av eftirlitinum, kemst av, at roynt verður at skapa umboðsmansstovn við fyrimynd í tí upprunaliga, nevniliga tí svenska frá fyrst í nítjandu øld.

# 19. UTTANRÍKISVALD

**Viðmerkingar**

Í hesum kapitli um uttanríkisvaldið eru ikki bara tær vanligu ásetingarnar um viðurskifti Føroya við umheimin, men eisini reglurnar um samveldi, sum eisini partvíst fevna um ta tjóðskaparligu semjuna, ið er so týdningarmikil fyri hesa stjórnarskipan.

## § 78. Uttanríkisvald

(1) Landsstýrið umboðar Føroyar í altjóðasamfelagnum.

(2) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum er landsins uttanríkispolitiski leiðari og samskipari og hevur ábyrgdina av altjóðaviðurskiftum Føroya.

(3) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum stendur á odda fyri uttanríkistænastuni, ið er skipað við uttanríkismálaráði og sendistovum.

(4) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kann í serligum førum heimila øðrum landsstýrismonnum at virka í sínum stað.
(5) Uttanríkisnevndin umboðar tingið mótvegis landsstýrismanninum í uttanríkismálum.
(6) Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum skal biðja uttanríkisnevndina um ráð, áðrenn farið verður undir samráðingar um millumtjóða sáttmála, ið fevnir um lóggávuvald. Somuleiðis skal landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kunna uttanríkisnevndina á ein hóskandi hátt, meðan tílíkar samráðingar fara fram til tess at tryggja sær bestu ráð frá uttanríkisnevndini. Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kann samstundis áseta trúnað í tílíkum málum.
(7) Millumtjóða sáttmáli, ið fevnir um lóggávuvald, skal samtykkjast sum lóg ella sum vanlig samtykt, áðrenn hann kann verða settur í gildi.

**Viðmerkingar**

Í hesi grein er ásett, eins og fatanin er í altjóðarættinum, at stjórnir umboða ríki í altjóðasamfelagnum, ella sum sagt verður, ***the government is the agent of the state.*** Við øðrum orðum eru ríki altjóðarættarligu eindirnar, og einans stjórnir kunnu umboða tær og binda tær. Í altjóðarættinum er eisini ásett, at einans ríkisleiðarar, stjórnarleiðarar og uttanríkisráðharrar og serligir sendimenn undir uttanríkisráðharrum kunnu binda ríki við ongari fulltrú. Tá ið hugsað verður um stjórn í hesum føri, verður eisini hugsað um løgmann eftir umskipan, vissiliga tí hóast hann verður tingformaður, hevur hann harumframt týðandi stjórnaruppgávur sum forseti í sambandi við útinnandi valdið.

Greinin hevur annars fyrimynd í stjórnarskipanini hjá Evropasamveldinum í uppskoti. Sostatt verður ásett, at landsstýrismaður í uttanríkismálum verður skipaður við egnari fyrisiting, hóast málsøkið einans kann verða yvirtikið við at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki. Hinvegin eru mong dømi um líka skipan, har ósjálvstøðug ríki hava raðfest alheimsgerð høgt, eins og Evropasamveldið hevur gjørt.

Valdsbýtið millum stjórn og ting verður greidliga skilmarkað í hesi grein. Eingin ivi er um, at tað er stjórnin við landsstýrismanninum í uttanríkismálum á odda, ið hevur málsræðið. Hinvegin er heldur eingin ivi um, at stjórnin á ongan hátt kann binda tingið at lóggeva á ein ávísan hátt uttan tingsins samtykki frammanundan. Sostatt skulu allir slíkir sáttmálar leggjast fyri tingið at samtykkja áðrenn teir kunnu verða settir í gildi. Í hesum sambandi verður tað undir viðgerðini uttanríkisnevndin hjá tinginum, ið verður umboð tingsins ímóti landsstýrismanninum í uttanríkismálum. Tingið avger sjálvt, um sáttmálar verða settir í gildi sum liður í vanligari tingsamtykt ella sum lóg.

## § 79. Samveldi

(1) Føroyar kunnu vera í samveldi við onnur lond og ríki sambært millumtjóða sáttmála.
(2) Fara Føroyar upp í samveldi við onnur lond og ríki, skal tingið samtykkja samveldissáttmála sum lóg við avgjørdum meiriluta, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í

minsta lagi eitt hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða. Sama mannagongd er í gildi, fara Føroyar úr samveldi við onnur lond og ríki.

(3) Ein og hvør samveldisstøða, har samveldisstovnar fáa vald, ið annars liggur hjá landsins stjórnarstovnum, skal verða væl greind í millumtjóða sáttmála. Samveldið kann ikki gera seg inn á fólksins rættindi. Landsins stjórnarstovnar ansa eftir, at andin í hesi stjórnarskipan, landsins sjálvræði og fólksins sjálvsavgerðarrættur ikki koma í vanda í samveldisstøðu.

**Viðmerkingar**

Saman við formælinum og grein 1 teingja serliga stykki eitt og tvey í hesi grein seg at spurninginum um ta sokallaðu tjóðskaparligu semjuna; t.e. hvussu føroyingar skulu skilja samband sítt við onnur lond og felagsskapir, serliga Danmark, og eftir hvørjum mannagongdum hetta samband skal kunna broytast. Í viðmerkingunum til formælið og §1 stendur eisini um spurningin um støðu Føroya sum land. Tí skal ikki verða gjørt so nógv burtur úr tí spurninginum her. Heldur eru tað mannagongdir í sambandi við at broyta støðu, sum eru áhugaverdar í hesum sambandi.

Í øðrum stykki verður mannagongdin ásett fyri at broyta í mun til verandi støðu. Krav er um avgjørdan meiriluta – t.e. at vanligur meiriluti krevst av øllum tingmannatalinum uttan mun til, hvussu nógvir eru møttir – og at fólkið við atkvøðu skal taka endaliga avgerð í minsta lagi eitt hálvt ár seinni. Í tí sambandi verður við orðinum samveldi hugsað bæði um ríkisfelagsskap og yvirtjóða felagsskap (ES), og sama mannagongd verður kravd í øllum førum. Hetta er orsakað av, at ásetingin skal verða partur av tjóðskaparligu semjuni; annars eru tað ivaleyst mong, ið halda, at linari krøv áttu at verið sett til avgerð um at taka meira sjálvstýri enn at siga frá sær sjálvræði. Hetta er støðan í sjálvstøðugum londum, har sjálvræði ofta verður hildið at hava ein frammanundan givnan betri rætt. Men vit eru sum nevnt í serligari ríkisrættarligari støðu, og at krøvini til at broyta skipan og vinna meira sjálvræði eru tey somu sum til at lata sjálvræði frá sær, má vera partur av semjuni.

Viðvíkjandi spurninginum um broytingarreglur og tað rætta við at krevja serligan meiriluta, heldur enn seinkan og drál, verður víst til viðmerkingarnar til grein áttatiogtvey. Tað verður tó hildið at vera enn minni legitimt at krevja serligan meiriluta í sambandi við avgerð um at vinna meira sjálvræði enn í sambandi við vanliga broytingaráseting, sum skal hevja stjórnarskipanina yvir vanligar lógir. Serligur meiriluti er heldur ikki kravdur í hesum sambandi; einans krevur stykki tvey meiriluta av øllum tingmonnum. Hetta kann ikki verða sammett við serligan meiriluta, tí ikki er órímiligt at vænta, at allir tingmenn møta til slík stór mál. Tá ið tað kortini er grund til at tryggja, at meiriluti er toliliga støðugur, er hátturin at seinka tilgongdini við at krevja eitt hálvt ár og at gera hana truplari við at krevja avgerð bæði frá tingi og fólki.

Fyrsti liður í triðja stykki áleggur landsins myndugleikum at áseta neyvt ella greina væl í sáttmála tað vald, sum annars liggur hjá landsins stovnum og samveldismyndugleikar fáa. Hetta er krav um neyvleika ella fastleika, sum er kent frá líknandi ásetingum í stjórnarskipanum í øðrum londum um samveldisstøðu. Er valdið ikki neyvt ásett, kann verða ómøguligt at hava eftirlit við og fáa yvirlit yvir sannlíku avleiðingarnar av, at vald verður latið av landinum. Av tí at tað søguliga er lítið sannlíkt, at Føroyar aftur fara at lata vald frá sær til Danmarkar, kundi ein hildið, at henda áseting einans hevur at gera við viðurskiftini mótvegis samveldum sum tí evropeiska. Men so er ikki; ásetingin er eins væl ætlað at fevna um nýskipanir í viðurskiftunum við Danmark ella okkurt annað land sum við felagsskap sum evropeiska samveldið.

Triði liður í triðja stykki áleggur fremstu stovnum landsins at hava eftirlit við, at sjálvræðið og andin í hesi lóg ikki koma í vanda í samveldisstøðu. Hetta er at senda fremstu stovnum landsins tey boð, at vald latið til samveldi kann ikki vera óavmarkað, sum tað nærum hevur verið í øðrum londum í sambandi við ES, og tað er teirra ábyrgd at hava hetta eftirlit.

Týdningarmest við grein nítiogníggju er, at eftir viðtøku av henni er grundarlag fyrstu ferð skapt fyri, at allar stórar politiskar avgerðir um at broyta viðurskifti Føroya við umheimin fara at verða avleiddar av og legitimeraðar í føroyskari stjórnarskipan.

## 20. KOMMUNUR

### §80. Kommunur

(1) Føroyar eru skipaðar í kommunur undir landsins eftirliti.
(2) Kommunustýrini eru fólkavald og skipa viðurskiftini á staðnum.

**Viðmerkingar**

Fyrra stykki hevur mest týdning sum staðfesting av, at landið er skilt sundur í lokalar eindir, ið verða nevndar kommunur. Í orðinum „eftirliti" liggur, at kommunurnar eru undirskipaðar landinum. Á hvønn hátt kommunurnar eru undirskipaðar landinum, er tó ikki ætlanin at áseta í stjórnarskipanini. Um talan einans skal verða um eitt løgligt eftirlit, sum nú, ella eitt breiðari eftirlit, ið eisini metir um tað skilagóða í politiskum tiltøkum, má vera latið til samfelagsmenning og ymiskar politiskar meirilutar at gera av heldur enn at leggja tað fast í stjórnarskipanini. Tá ið samspælið millum lokalu samfeløgini og felags heildina eru, og hava verið politiskt viðkvom evni, eigur hetta økið ikki at verða ásett so neyvt, at natúrlig politisk menning verður tarnað. Tó eru Føroyar sum land ***ein eind***, og samveldisskipan er ikki, og hetta ætlar stjórnarskipanin ikki at broyta. Tí má ásetingin sum tað minsta verða skilt so, at landið hevur skyldu at tryggja, at kommunalt sjálvræði er í landinum, men at landsmyndugleikarnir tó sjálvir gera av, hvørjum stigi hetta sjálvræði skal vera á. Tískil hava lands-

myndugleikar, løgtingið, víðar ræsur at áseta innihaldið í kommunala sjálvræðinum.

Seinna stykki tryggjar yvirskipað verandi støðu, at kommunala sjálvræðið er fólkaræðisliga grundað, og ásetur eisini á líknandi yvirskipaðan hátt sum í fyrra stykki, at kommunustýrini skipa viðurskiftini lokalt uttan tó at siga nakað ítøkiliga um, hvar markið gongur mótvegis landsmyndugleikunum.

# 21. NEYÐRÆTTUR

**Viðmerkingar**

Gamalt orðatak sigur, at neyð brýtur allar lógir. Ein kjarni av sannleika er í hesum orðum. Ofta hoyra vit eisini í útvarpi, at forsetin í tí og tí landinum hevur lýst landið í undantaksstøðu, og tað tykist, at samfeløg allar tíðir hava viðurkent, at reglur og skipanir stýra undir vanligum umstøðum, men at undantakið stýrir í neyðini. So er eisini í okkara tíð og um okkara leiðir.

## §81. Neyðstøða

(1) Í neyðstøðu kann løgmaður lýsa undantaksstøðu í landinum. Tá kann hann seta til viks lógir og fyriskipanir, at ikki størri virði fara fyri skeytið ella landsins trygd kemur í vanda.

(2) Berst so á, at landsins stovnar fáa ikki hildið hesa skipan ella landsins lógir í neyðstøðu, skulu avvarðandi stovnar skjótast til ber boða tinginum frá.

(3) Løgrætturin skal meta, um rætt er atborið í neyðstøðu.

**Viðmerkingar**

Fyrsta stykki í greinini gevur løgmanni heimild til í neyðstøðu at lýsa undantaksstøðu og víkja frá vanligum lógum og fyriskipanum, so størri virði ikki fara fyri skeytið og landsins trygd ikki kemur í vanda. Vanligt er eisini í øðrum londum, at forsetar ella aðrir leiðarar av útinnandi valdinum hava slíka heimild.

Annað stykki áleggur stovnum, sum ikki fáa hildið stjórnarskipanina ella lógir í neyðstøðu, at boða tinginum frá sum skjótast. Í hesum liggur, at ikki einans løgmaður kann víkja frá vanligum lógum og hesi skipan í neyðstøðu. Tað kunnu aðrir stovnar eisini. Munurin er bert, at einans løgmaður hevur heimild til at lýsa landið í undantaksstøðu.

Kravið í øðrum stykki, um at boða tinginum frá sum skjótast, er galdandi fyri allar landsins stovnar og tí eisini løgmann, um hann lýsir landið í undantaksstøðu.

Nógv dømi eru um, at fíggindarnir hjá opna samfelagnum hava gjørt sær dælt við neyðstøðu og hava roynt at nýta hana sum amboð til at seta fólkaræði og løgræði til viks med alla. Tí er ógviliga týðandi, at sera gott eftirlit er við mynd-

ugleikum í neyðstøðu. Hetta eftirlit verður sambært øðrum stykki politiskt útint av tinginum, sí reglu um skyldu um skjóta fráboðan, og løgliga útint av løgrættinum, ið skal meta, um rætt er atborið í neyðstøðu.

Trupult er at siga, hvat fólkið, sum skal góðkenna hesa stjórnarskipan, fer at leggja í orðini "í neyðstøðu". Aðrastaðni hevur verið hildið ógjørligt frammanundan og generelt at siga, hvørji krøv mugu verða sett til støðu, so hon kann verða roknað sum neyðstøða, ið kann grunda, at ásetingar í stjórnarskipanini verða settar til viks. Eisini hevur verið skilt millum meira og minni grundleggjandi reglur í stjórnarskipanini. Sjálvsagt skal meira til fyri at víkja frá grundleggjandi reglum sum rættindi borgaranna enn minni týðandi reglum sum eitt nú mannagongd í tingarbeiði. Er talan um grundleggjandi reglur, er í flestu londum á okkara leiðum semja um, at verulig neyð má vera, so tiltøkini eru neyðug fyri at bjarga týðandi samfelagsvirðum sum statsins tilveru ella teimum fólkaræðisligu stovnunum. Sum vegleiðing kann verða víst til grein 15 í evropeiska mannarættindasáttmálanum, sum nevnir „kríggj ella aðra almenna neyðstøðu, ið hóttir lívið hjá tjóðini".

Klassisk fólkaræðislig fatan er, at víðkaðar heimildir til myndugleikar í sambandi við, at tjóðin verður hótt eftir lívinum, kunnu einans vera fyribils og undantaksvísar. Skal nøkur meining vera í at skilja millum undantak og rættlag, má neyðrættur bæði vera tíðaravmarkaður, tongdur at serligari støðu og avmarkaður í innihaldi til ikki at fara longri enn til at seta partar av stjórnarskipanini til síðis og ikki skipanina í síni heild.

At neyðrætturin er avmarkaður í innihaldi, hevur sostatt við sær, at tiltøk, ið tikin verða í neyðstøðu, mugu virða almennu grundreglurnar í hesi skipan. Serligan týdning hevur markreglan, ið skal tryggja, at virðini, ið neyðrætturin verður ákallaður til at bjarga, ikki eru av minni týdningi enn tey virði, ið verða sett til viks í sambandinum.

# 22. SAMTYKT OG GILDI

**Viðmerkingar**

Hesin kapittul er á ein hátt tann mest avgerandi av øllum. Samtyktar- og broytingarreglan er hon, ið flytur hesa skipan undir annað hválv enn lógir. Broytingarreglan gevur ikki bara skipanini hægri støðu, men við fyrivarni fyri serligari politiskari mentan er tað eisini treytað av henni – hvussu tung ella løtt, hon er – um stjórnarskipanin fær høga ella lága støðu, kemur at virka meira ella minni væl og liva leingi ella stutt.

## §82. Samtykt

(1) Henda stjórnarskipan eins og seinni broytingar í henni skulu samtykkjast á tingi við avgjørdum meiriluta, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár seinni, har vanligur meiriluti skal ráða.

(2) Stjórnarskipanin ella broytingar í henni fáa gildi sama dag, sum fólkið hevur tikið avgerð sína.

**Viðmerkingar**

Fyrra stykki í hesi grein hevur ásetingar um mannagongd at samtykkja og seinni at broyta stjórnarskipanina. Fyrst skal tingið samtykkja við avgjørdum meiriluta, og síðani skal broytingin góðkennast á fólkaatkvøða, og fólkaatkvøðan kann ikki verða, fyrr enn minst hálvt ár er gingið síðan tingsamtyktina.

At stjórnarskipanin er verri at samtykkja og at broyta enn vanlig lóg, er sum nevnt høvuðsháttturin at geva skipanum hægri gildi. Fá munnu halda, at einans ein subjektiv tilvitan um, at hetta er hægri skipan, er nóg mikið. Tí mugu eisini objektivir munir vera. Tekur samfelag undir við virðunum aftan fyri konstitutionalismu, er eisini greitt, at samfelagið tekur undir við, at onnur virði enn fólkaræði eru, og at hesi virði í ávísan mun kunnu koma í stríð við fólkaræðið, men at so er í sambandi við modernaðar stjórnarskipanir. Men endamálið má kortini vera, at hátturin at samtykkja og broyta stjórnarskipanina ger seg sum minst inn á fólkaræðið.

Stjórnarskipanin í uppskoti er eins trupul at viðtaka sum at broyta. Harvið verður eisini boðað frá, at nevndin hevur ta áskoðan, at tað er minni legitimt at viðtaka eina stjórnarskipan eftir einfaldari mannagongdum, enn tað skal vera at broyta hana. At stjórnarskipanir eru verri at broyta enn at samtykkja, kemur ofta fyri. Tá hava seinni ættarlið verri umstøður at broyta enn viðtakandi ættarliðið. Slíkt kann meira metast sum ein roynd hjá samfelag at binda onnur – seinni ættarlið – enn seg sjálvt, ið ætlanin helst skuldi verið við eini stjórnarskipan.

Ymiskir hættir eru at broyta. Krøv kunnu vera um bæði vanligan og serligan meiriluta á tingi, fólkaatkvøðu við krøvum um bæði serliga uppmøting og vanligan ella serligan atkvøðumeiriluta umframt ymiskar samansetingar av hesum. Allir hesir hættir kunnu kortini skiljast sundur í tveir høvuðsbólkar. Tann fyrri setur krav um endurtikna viðtøku frá góðkennandi stovni sum til dømis tveimum tingum, ella bara at ymiskir stovnar skulu viðtaka, sum til dømis tingið og fólkið. Endamálið er gjøgnum seinkan ella drál at fáa fólk at umhugsa avgerðina serliga gjølla og á tann hátt at fáa skipanina hevjaða upp um vanliga lóg. Tann seinni og úti í heimi var vanligasti hátturin at hevja skipanina upp um lógir setur krøv um serligan meiriluta í góðkennandi stovninum, eitt nú tríggjar fimtingar ella tveir triðingar.

Av nevndu háttum er tað tann fyrri, sum virðir fólkaræðið í mestan mun. Tí er eisini fyrri hátturin valdur í uppskotinum til hesa stjórnarskipan, tí hann røkir virðini aftan fyri konstitutionalismu á nøktandi hátt, samstundis sum atlit til fólkaræðið eisini verða tikin í mestan mun. Seinna skipanin við serligum meiri-

luta gevur einum minniluta og verandi skipan áhaldandi betri rætt enn meirilutanum og broytingini, og slíkt hevur við sær fólkaræðisligar trupulleikar og er heldur ikki neyðugt fyri at skipa hægri rætt.

Av praktiskum orsøkum, men eisini fyri at leggja dent á, at fólkið hevur evsta politiska vald, heldur enn tingið ella annar stjórnarstovnur, sum fólkið sjálvt hevur skipað, verður í seinna stykki ásett, at stjórnarskipanin og broytingar í henni fáa gildi sama dag, sum fólkið hevur tikið avgerð sína.

# STJÓRNARSKIPAN FØROYA

## Minnilutaálit

# Minnilutaálit

## JÓANNES HANSEN, BÁRÐUR LARSEN OG INGIBJØRG BERG, NEVNDARLIMIR

Tórshavn, 11. desember 2006

Undirritaðu nevndarlimir taka sum heild undir við fyriliggjandi áliti til føroyska stjórnarskipan, men skulu gera viðmerkingar til part av uppskotinum og tilgongdini, ið vit ikki halda vera nóg góða.

**Valdsbýti**
Fyrra Flaggdagsálit (Frágreiðing frá formanninum í Grundlógarnevndini, latin Flaggdagin 2004), hevði uppskot til føroyska stjórnarskipan, ið var tað grundarlagið, sum nú endaliga álitið tók støði í. Stjórnarskipanaruppskotið í Flaggdagsálitinum var grundað á ta fatan, at hugsanin aftan fyri valdsbýtið í verandi stýrisskipanarlóg er óheppin og ikki í tráð við veruleikan. Í Flaggdagsálitinum varð roynt at broyta valdsjavnvágina millum løgting og landsstýri aftur til fyrimuns fyri tingið.

Í Flaggdagsálitinum misti løgmaður rættin til at senda tingið til hús og útskriva val, rættin til at nokta at staðfesta lógir og rættin til einsamallur at tilnevna og góðkenna landsstýrismenn. Grundgevingin í Flaggdagsálitinum fyri at taka hesar heimildir frá løgmanni var, at valdsbýtið skilt sum valdsskákan og innanhýsis eftirlit millum løgting og landsstýri ikki hevur nakra meining í okkara skipan. Okkara skipan byggir á tingræði (parlamentarismu). Tá ið tingið er ovast, og løgmaður og landsstýrismenn sita av tingsins náði, ber ikki til samstundis at siga, at løgmaður hevur heimildir at skáka tingið við.

Ein og hvør eygleiðari av politisku skipanini í Føroyum veit, at løgmaður kann ikki skáka tingið við ikki at staðfesta samtykt lógaruppskot, við at hótta við at senda tingið til hús ella við sjálvur at velja at loysa landsstýrismenn úr starvi. Í verandi politisku skipan eru tað tvey vøld, ið skáka hvørt annað, og tey eru samgonga á tingi/landsstýri mótvegis andstøðu á tingi.

Í øllum týðandi avgerðum er neyðugt hjá løgmanni at ráðføra seg við sínar samgongufelagar. Um hann noktar at staðfesta lógir, loysir landsstýrismenn úr starvi av sínum eintingum ella sendir tingið til hús, so ger hann tað bara, tá hann hevur telvað seg fastan, og tá hann ikki longur hevur grundarlag at halda fram sum løgmaður og samgonguleiðari.

Tí halda vit, at ásetingarnar í stýrisskipanarlógini frá 1994 um heimildirnar hjá løgmanni onki hava við veruliga valdsbýtið at gera, og soleiðis verður tað, so

leingi løgmaður og landsstýri ikki hava sjálvstøðugt grundarlag, eitt nú við at verða valt beinleiðis av fólkinum.

Vísandi til hesa veruleikafjaru valdsbýtisskipan undir verandi stýrisskipanarlóg vilja vit staðiliga mæla frá, at uppskotið í Flaggdagsálitinum um greiðari og betri samanhangandi valdsbýtisskipan nú aftur verður snarað á móti óhepnu og ósamanhangandi skipan undir verandi stýrisskipan. Júst hetta verður avleiðingin av teimum avgerðum um valdsbýtið, sum undirnevndin til Stjórnarskipanarnevndina, ið var sett at viðgera tjóðskaparspurningin, gjørdi av at fremja (kortini treytað av, at skipanin í uppskotinum til stjórnarskipan ikki verður umskipað eftir serstøku § 59).

Eftir hetta hevur stjórnarskipanin í uppskoti hesa skipan í valdsbýtisspurninginum:

Løgtingið skipar eftir § 58 (2) løgmansval, har løgmaður er valdur, um bara minni enn helmingurin av øllum tingmonnum atkvøða ímóti. Vit mæla til meira fólkaræðisliga og positiva skipan við kravi um, at fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti í sambandi við løgmansval.

Løgmaður tilnevnir landsstýrismenn eftir § 58 (4). Vit mæla til eina meira fólkaræðisliga skipan, har tingið í minsta lagi eftir uppskoti frá løgmanni skal góðkenna uppskot til landsstýrismenn.

Løgmaður skal skriva út val. Hetta hevur undirnevndin í tjóðskaparspurninginum avgjørt, hóast § 47 ikki er rættað til. At skriva út val kann vera gott amboð. Vit mæla tó frá, at løgmaður skal hava hetta amboð, tá ongin valdsskákan er í hesum.

Løgmaður staðfestir og kunngerð lógir samsvarandi § 45 (5). Vit mæla frá, at løgmaður skal staðfesta lógir, tá hann onki lóggávuvald hevur og í veruleikanum ikki kann sýta at staðfesta.

**Freist og dygd**

Aðrar atfinningar hava verið móti arbeiðinum í nevndini. Víst hevur verið á, at tíðin hevur verið ov knøpp, og at mangar ásetingar ikki hava fingið veruliga umrøðu í nevndini, m.a. ásetingarnar um skipanina av vøldunum, ið sum nevnt eru avgreiddar í undirbólki. Vit eru samd í hesum, at fleiri ásetingar ikki eru viðgjørdar nóg væl í nevndini. Ein avleiðing er, at týðandi ásetingar kundu verið betur umhugsaðar. Vísandi til hetta kann verða hildið, og er víst á í minnilutaáliti frá andstøðu á tingi, at freistin at skriva álitið liðugt átti at verið útsett nakað. Hóast tað eru lutir í álitinum, sum tað kundi havt verið arbeitt meiri við, so er uppskotið í hesum áliti kortini ikki endaliga uppskotið, ið skal til fólkið at atkvøða um. Fyriliggjandi uppskot fer nú í politisku skipanina, og har verður

aftur høvi til at gera broytingar, áðrenn fólkið endaliga sleppur at siga sína hugsan.

Ongin orsøk er at meta um arbeiðið hjá nevndini, sum hevði hon heimildir til endaliga at geva Føroya fólki eina stjórnarskipan. Áðrenn Føroya fólk við síni samtykt gevur skipanini støðu sum grundleggjandi politiskt og løgligt skjal, er skipanin í uppskoti ikki at rokna sum annað enn deyðir bókstavir.

Eisini eru praktiskar orsøkir til, at nevndin letur endaligt uppskot frá sær nú. Nevndin hevur skjótt sitið í átta ár, og tá er tíð at fáa arbeiðið liðugt. Um nevndin heldur, at tað er góð tíð at gera uppskotið liðugt, og at tað altíð ber til at útseta freistina, so er sannlíkt, at tað verður seinur dagur, áðrenn endaligt uppskot verður latið.

8. desember 2006

Hvørki Grundlógarnevndin ella Stjórnarskipanarnevndin fingu nakrantíð nøktandi umstøður.

Frá byrjan misfatanin, at bert uttanveltað, fullvalda lond hava grundlógir. Men bæði næstu norrønu grannalond okkara, Ísland og Noreg, fingu stjórnarskjøl síni, meðan tey enn vóru í samveldisstøðu. Hjá báðum hesum londum vóru skjølini, nevnd ávikavist Constitution, seinni Grunnlov og Stjórnarskrá, til stóra signing. Stjórnarskjøl staðfesta land sum stjórnareind, menna tjóð og byggja brúgv millum ymsar ríkisrættarligar støður. At fullfíggjað stjórnarskipan ber til hjá landi og tjóð sum okkara, er ikki trupult at sannføra vanliga fólkið í Føroyum um.

Tá ið fundir eru hildnir, almennir, í politiskum feløgum, fyri altjóða serfrøðingum, er undirtøka breið, savnandi og sannførandi. Bert tveir bólkar eru ímóti føroyskari stjórnarskipan, teir eru danskt-útbúnir føroyskir løgfrøðingar og føroyskir politikarar. Teir fyrru eru nervaðir av vánaligari, søgu- og heimspekileysari útbúgving, teir seinnu av teirri stillu samansvørjing, ið er um at geva góðu gomlu stýrisskipanarlógini skyldina fyri vanstýring teirra í árunum undan kreppuni sonevndu.

Síðani valið seinast hevur Grundlógarnevndin undir nýggjum navni virkað eftir lóg, ið fekk fleiri atkvøður, men kortini minni undirtøku á tingi enn tann undanfarna heimildarlógin. Nevndin varð merkt av, at ov lítið samband var millum undanfarna arbeiðið og at nevndin spakuliga misti ondina av trongum umstøðum. Rættasta var, at tingið gav nevndini sama steðg í tingarbeiðnum, sum Norðurlandaráðið og Útnorðurráðið fáa, at løgmaður og landsstýrismaður tryggja fíggjarligar og aðrar umstøður, og at dentur síðani varð lagdur á almennar hoyringar grundaðar á ***Fyrra Flaggdagsálitið***, umframt altjóða ráðstevnu grundaða á ráðstevnuna í 2003, men hesaferð um innihaldsligu ásetingarnar heldur enn mest tjóðskaparligu semjuna sum ta ferðina.

Tíverri gjørdist hetta ikki so, nevndin fór heldur við lágum blussi at kóka Fyrra Flaggdagsálit niður. Nógvir nýggir limir høvdu áhuga í at steðga ella broyta arbeiðið. Mangir politikarar halda seg hava áhuga í at verja ta út av lagi veruleikafjaru og vánaligu stýrisskipanarlóg, ið vit stríðast við. Aðrir misfata støðuna og halda, at onkur orðing av óvart antin kann fremja loysing ella tvørturímóti leinkja okkum at øðrum landi í allar ævir.

Stjórnarskipanaruppskotið, ið nú verður handað, er ov nógv merkt av at vera

nevndarsemja. Fyrra Flaggdagsálitið var meira merkt av at vera trúfast ímóti tí støði, ið lagað varð fyrstu árini og sum umboð fyri allar flokkar vóru saman um, men kortini at vera heilt og sannførandi í stíli og skipan.

Vegna hesi atlit, at okkum tørvar at betra stýrisskipan okkara, at vit kunnu fáa stórt gagn av fullfíggjaðum stjórnarskjali við tjóðskaparligari semju, ríkisrættaráseting, rættindum og valdsavmarkingum, verður staðiliga mælt løgmanni – ella øðrum, ið eiga rætt at leggja fram uppskot á Føroya Løgtingi – at leggja fram uppskot um Stjórnarskipan Føroya at koma í staðin fyri yngru stýrisskipanarlógina.

Men vegna betri grundað arbeiðslag, betri stíl og skipan, og innihaldsliga hepnari og frælsari ásetingar, mæli eg til, at uppskotið í Fyrra Flaggdagsálitinum við teimum rættingum, sum vórðu gjørdar í heftinum við ensku umsetingini, verður lagt fyri tingið heldur enn endaliga tilmælið hjá nevndini. Í øðrum lagi taki eg tó undir við tilmæli nevndarinnar, tað er í øllum førum betri enn verandi skipan.

8. desember 2006

Orðaskifti hevur verið í nevndini, serliga í undirnevndini, um heitini landsstýrismaður og ráðharri, tó uttan nakra greiða niðurstøðu. Nakrir nevndarlimir meta, at heitið ***ráðharri*** skal nýtast ístaðin fyri ***landsstýrismaður***. Eri eg sannførdur um, at tey heitini, sum hava vunnið sær hevd, skal mann ikki beina burtur. ***Landsstýrismaður*** er serføroyskt, meðan ***ráðharri*** ella ***ministari*** er tað heitið, sum øll onnur brúka. Tí haldi eg uppá, at vit eiga at brúka heitið landsstýrismaður. Av júst somu grund haldi eg, at heitið løgmaður, sum síðan 1948 hevur merkt formaðurin fyri landsstýrinum, hevur vunnið sær hevd í hesum týdninginum. Tí er tað als ikki rætt at gera eina áseting, sum letur upp fyri møguleikanum at venda aftur til gamla týdningin fyri formannin í Løgtinginum. So kundi eins væl verið umhugsað at brúkt hetta heitið til hægsta embætið í rættarskipanini. Eg mæli tískil frá at samtykkja tær ásetingar í § 59, sum snúgva seg um umskipan av løgmansembætinum.

Eg taki als ikki undir við, at einasti landsstýrismaður, hvørs starv er allýst í stjórnarskipanini, er landsstýrismaðurin í uttanríkismálum. Hví verður ikki landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ella landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nevndur? Tað er løgið í eini stjórnarskipan at allýsa ein landsstýrismann, og á einum málsøki, sum Danmark umsitur fyri okkum. Vit kunnu ikki yvirtaka uttanríkismál fult og heilt, fyrr enn vit hava loyst. Men heldur ikki tá, meti eg, at tað er rætt, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum skal vera fyriskrivaður í stjórnarskipanini. Haraftrat fær, sambært uppskotinum, landsstýrismaðurin í uttanríkismálum leiðsluna á øllum uttanríkisviðurskiftum, so at løgmaður ikki kann hava eftirlit við honum, tí á tí økinum hevur hesin landsstýrismaður leiðsluna. Á innanríkisviðurskiftum hevur løgmaður ábyrgdina, sambært uppskotinum, men ikki, tá ið tað snýr seg um uttanríkisviðurskifti. Harumframt er ásett í uppskotinum, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum skal vera varaløgmaður. Til hetta er at siga, at varaløgmaður er vanliga partur av býtinum millum flokkarnar og hongur ofta saman við starvsaldri. Í Danmark er uttanríkisráðharrin ikki varamaður hjá forsætisráðharranum, ei heldur í Onglandi. Í Grønlandi tykist fatanin at vera, at uttanríkismál er ov lítið til at vera eitt sjálvstøðugt málsøki, og tí umsitur tann ráðharrin eisini fíggjar- og búskaparmál umframt sjálvstýrismál og norðurlandamál. Eg síggi, at við hesum uppskotinum um landsstýrismann í uttanríkismálum/varaløgmann við heimildum, sum eru fyriskrivaðar í stjórnarskipanini, verður gamla siðvenjan tikin burtur, at tað er løgmaður, sum býtir málsøkini út, tí hetta málsøki er givið frammanundan. Ein fær næstan ta kenslu, at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum fær meira rúmd í hesum uppskoti enn løgmaður, og tá er lagt á heilt annan bógv. So hesum taki eg als ikki undir við.

Løgmansembætið kann umskipast við tinglóg. Hetta er sera óheppið fyri lógararbeiðið. Vit gera eina stjórnarskipan, sum hevur truplar mannagongdir fyri broytingum, men so verður sagt í sambandi við eitt sera týdningarmikið embæti, at tað kann umskipast við tinglóg – tað ber ikki til. Hetta er í andsøgn við grundarlagið fyri stjórnarskipanarsmíðinum, tí hugsanin er, at grundleggjandi broytingar krevja broytingar í stjórnarskipanini. Tað er sera løgið, og í stríð við andan í teirri nýggju skipanini, at staðfestingarrætturin hjá løgmanni kann flytast til tingformannin við tinglóg. Staðfestingarrætturin er ein so týdningarmikil og grundleggjandi heimild hjá útinnandi valdinum, at tað er ikki rætt at taka hesa heimild frá løgmanni, og kann tað, sambært uppskotinum, fremjast við broyting í tinglóg (sí § 59, stk. 3). Staðfestingarrættin skal løgmaður hava, og skulu broytingar fara fram hesum viðvíkjandi, skal henda grundleggjandi broytingin fremjast við broyting av stjórnarskipanini.

Tá ið verandi stýrisskipanin kom í gildi í 1995, var ein týdningarmikil partur hetta, at tað var ein ávís valdsjavnvág millum løgting og landsstýri. Tí fekk løgmaður møguleikan at skriva út val. Hetta hava vit havt góðar royndir av, kanska ikki tær, ið vit hoyra um, men serliga tær, sum vit ongantíð hoyra um. Tí taki eg ikki undir við, at løgmaður missir henda møguleikan, og eg haldi, at valdssúlurnar forskjóta seg, um hesin rættur verður tikin frá løgmanni. Eg rokni eisini við, at vit kunnu vænta óstabilari politisk viðurskifti, um hesin rættur verður tikin frá løgmanni.

